# Royndin

Hans Andrias Sølvará

# Royndin

*Ein kjakbók um søgu og søguskriving*

fróðskapur

Faroe University Press

Royndin
Ein kjakbók um søgu og søguskriving
© 2020 Hans Andrias Sølvará og Fróðskapur
Permumynd: Fróðskapur
Bókin er sett við Adobe Garamond Pro, 11,5 pkt
Umbrotið, prentað og heft hevur Føroyaprent
Bókin er útgivin við stuðli frá Mentanargrunninum
2. upplag
(Rættingar á s. 6: Royndini Fríðu til North Star og á baksíðu: apríl 1808 til juni 1808)

ISBN: 978-99918-65-92-8

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Inngangur . . . . . . . . . . 5

Nýggjasta granskingin um Nólsoyar-Páll . . . . . . . . . . 10

Spurningar og søgufakligar meginreglur handan viðgerðina 14

Nøkur innleiðandi dømi um tesur,
hall og arbeiðslag í nýggjastu granskingini . . . . . . . . . . 18

Løbner var fyrstur at koppseta í Føroyum . . . . . . . . . . 23

Nólsoyar-Páll framdi loynihandil . . . . . . . . . . 44

Nólsoyar-Páll breyt allar siglingarreglur og sáttmálar . . . . . . . . . . 47

Nólsoyar-Páll rýmdi frá neyðarrópi
og hungrandi landsmonnum . . . . . . . . . . 54

Nólsoyar-Páll fekk Baugh til at hertaka skansan . . . . . . . . . . 63

Nólsoyar-Páll gav Baugh upplýsingar
um fíggindaskip á Havnini . . . . . . . . . . 74

Tað var rætt av Løbner at yvirgeva skansan . . . . . . . . . . 85

Nólsoyar-Páll fekk Hompesch at koma
aftur á Havnina fyri at ræna handilin . . . . . . . . . . 97

Nøkur orð afturat um háttalag . . . . . . . . . . 112

Tjóðskaparrørslan skapti mytuna við støði
í einum gloymdum Nólsoyar-Pálli . . . . . . . . . . 115

Ein uppgerð við mytuna um Nólsoyar-Páll . . . . . . . . . . 119

Níggju søgufakligar meginreglur . . . . . . . . . . 125

Niðurstøða . . . . . . . . . . 152

Bókmentir . . . . . . . . . . 155

# Inngangur

Hetta er ein kjakbók um søgugransking og søguskriving. Bókin er ætlað øllum søguáhugaðum, men vónandi kann hon eisini vera eitt íkast til undirvísing og kjak um søgu á hægri lærustovnum. Tilfarið í bókini er ítøkilig søgugransking og søguskriving um søgulig evni í føroyskari søgu, men høvuðsendamálið við hesi bókini er at geva eitt meira alment fakligt íkast til søgugransking og søguskriving í einum føroyskum samanhangi. Fleiri tílíkar bøkur eru á øðrum málum og við útlendskum evnum og keldutilfari, men eingin tílík bók er skrivað á føroyskum við støði í einans føroyskum evnum og keldutilfari. Nógv rættiliga áhugaverd evni, keldutilfar ella søgubøkur um føroyska søgu kundu verið tikin fram í hesum sambandi, men fyri eina tílíka fakliga kjakbók er tað ein fyrimunur at finna eitt ávíst samlandi evni og eitt ítøkiligt keldutilfar, sum viðgerðin kann skipast rundanum - heldur enn at viðgera ymisk evni ella spjatt keldutilfar, sum ikki hongur saman. Fyri at viðgera eitt keldutilfar krevst ein ávís mongd og fjølbroytni av keldutilfari, sum harumframt snýr seg um eitt ávíst søguligt evni. Harumframt er tað ein fyrimunur, at evnið og keldutilfarið er so mikið viðkomandi og umstrítt í tí føroyska almenninginum, at góðir møguleikar eru fyri at gera tað áhugavert í sambandi við eitt fakligt kjak um søgugransking og søguskriving. Seinastu árini eru fleiri bøkur um føroyska søgu givnar út, sum kundu verið væl egnaðar til hetta endamálið, m.a. bókin hjá Charlotte Langkilde um Carl Emil Dahlerup (Langkilde 2018), Føroya søgan hjá Óla Breckmann (Breckmann 2019) og bókin hjá Rolf Guttesen um Nólsoyar-Páll. Í tveimum ummælum havi eg verið við til at

peikað á, hvussu umstríddar bøkurnar hjá Langkilde og Guttesen eru (Hovgaard og Sølvará 2019 og Sølvará 2020). Bókin hjá Breckmann hevur eisini umstríddar tulkingar, m.a. av Nólsoyar-Pálli, sum nærum verður lýstur sum fólkafloksmaður (Breckmann 2019, s. 29), men hon er ov breið til endamálið í hesi bók. Bøkurnar hjá Langkilde og Guttesen eru meira avmarkaðar til ávís evni og eru tí betur egnaðar. Bókin hjá Guttesen hevur hinvegin teir avgjørdu fyrimunir, 1) at hon viðger eitt sera viðkomandi evni í føroyskari søgu (Nólsoyar-Páll), og 2) at Guttesen endurgevur og vísir til hópin av keldutilfari um evnið, sum viðgerðin kann taka støði í – tað ger Langkilde ikki. Nólsoyar-Páll er tí evnið, sum eg havi valt at viðgera í hesi bókini; keldutilfarið hevur samband við leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í hansara tíð, meðan tulkingarnar, sum verða viðgjørdar í hesi bók, eru úr nýggju bókini hjá Guttesen um Nólsoyar-Páll.

Tað ber væl til at lesa hesa bókina uttan nakrar fyritreytir, men tað er ein fyrimunur at hava lisið bókina hjá Guttesen um Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019), og verður bókin nýtt sum liður í søguundirvísingini á hægri stigi, verður mælt til eisini at hava viðkomandi partar av bókini hjá Guttesen sum part av lestrarætlanini. Tað ber eisini til at nýta hesa kjakbókina sum part av einum skeiðsevni um Nólsoyar-Páll og hansara tíð.

Poul P. Nolsøe (1766-1808), Nólsoyar-Páll, telist millum tær føroysku hetjurnar. Nólsoyar-Páll er nevndur í hópinum av keldutilfari frá samtíðini, og nógv er skrivað um hann, síðan hann sjólætst á veg heim til Føroya við North Star í 1808. Tað var kortini ikki fyrr enn í 1892, at hann fekk sína ævisøgu, sum Jákup Jakobsen (1864-1918) skrivaði á donskum. Í 1912 skrivaði Jákup Jakobsen dagførda ævisøgu um hann á føroyskum. Hendan bókin hevur í nógv ár verið høvuðsverkið um Nólsoyar-Páll, men síðan er nógv skrivað um Nólsoyar-Páll í nógvum søgubókum. M.a. Páll J. Nolsøe (1908-1995), landsskjalavørður 1951-1978, hevur í síni stóru siglingarsøgu savnað og prentað hópin av skjølum um Nólsoyar-Páll; Óli Olsen sjómansskúlalærari læt í 2016 eitt bókaverk úr hondum um siglingarmannin og yrkjaran Nólsoyar-Páll, og seinast hevur

geografurin Rolf Guttesen (1943-) skrivað tað drúgvasta søguverkið um Nólsoyar-Páll, sum kom út í 2019. Hetta bendir alt á, hvussu stóran týdning Nólsoyar-Páll hevur fingið fyri føroyska søgu og mentan. Minnisvarðar eru reistir til minnis um Nólsoyar-Páll í Havn og í Vági, skip eru uppkallað eftir honum, í Klaksvík hevur ein høvuðsgøta í býnum fingið navnið Nólsoyar Páls gøta og bóndahúsini hjá honum á Biskupsstøð í Klaksvík eru endurreist við støði í privatum initiativi. Hóast Nólsoyar-Páll nærum kann sigast at vera tjóðarhetja í Føroyum, so hevur kortini ongantíð verið semja um dygdirnar hjá honum, og nógvar eru frásagnirnar um hann – bæði jaligar og kanska serliga í seinastuni neiligar. Onkuntíð fær ein illgruna um, at rithøvundar, sum ikki eru heilt kunnugir við evnið, nærum halda, at alt, sum er skrivað um Nólsoyar-Páll, er myta (Langkilde 2018, s. 506). Aðrastaðni fær ein kanska fatan av, at alt, sum hevur verið skrivað um Nólsoyar-Páll, er eftirfarandi. Avbjóðingin er, at ongastaðni hava vit sæð nakra kvalifiseraða søgufakliga uppgerð við myndina av Nólsoyar-Pálli, sum Jákup Jakobsen setti fram í 1892 – heldur ikki í seinastu bókini um hann. Tá danski høvundurin Charlotte Langkilde (1950-), uttan nakra tilvísing, í bók um Føroyar frá 2018 skrivar, at „Nyere forskning har punkteret mange af bogens," t.e. bókaverkið hjá Jákupi Jakobsen um Nólsoyar-Páll, „påståede heltegerninger" hjá Nólsoyar-Pálli, kann eg bert undrast, tí eg veit ikki, hvørja nýggjari gransking hon sipar til. Heilt galið verður tað, tá sama Langkilde beinleiðis staðfestir, at „Ifølge myten sejlede Páll nogle ture til København med brunkul, som ikke var omfattet af monopolet, men embedsmændene i Thorshavn skumlede, fordi de følte sig truet på deres levebrød" (Langkilde 2018, s. 506). Túrarnir hjá Nólsoyar-Pálli til Keypmannahavnar við Royndini Fríðu og mótstøðan hann fekk frá embætismonnunum er væl skjalpróvgað í samtíðarkeldunum, og mær kunnugt hevur eingin gransking sett spurnartekin við hetta. Óli Breckmann (1948-), søguútbúgvin føroyskur politkari, hevur sostatt rætt, tá hann í síni nýggju Føroya søgu skrivar, at „Kanska fer komandi søgugransking at royta nakrar fjaðrar av okkara tjóðarhetju" (Breckmann 2019, s. 30), tí enn hevur eingin megnað at roytt nakrar fjaðrar av varðveittu

myndini av Nólsoyar-Pálli, soleiðis sum hon er sett fram í verkum hjá Jákupi Jakobsen.

Harvið havi eg eisini sagt, at nýggjasta verkið hjá Rolf Guttesen, sum er áhugavert og leggur fram nógv nýtt keldutilfar, heldur ikki veruliga megnar at gera upp við hevdvunnu myndina av Nólsoyar-Pálli. Verkið er ein roynd at gera upp við varðveittu myndina av Nólsoyar-Pálli, men í mun til endamálið er ov lítið nýtt í bókini.

Í hesi bók fari eg hvørki at verja ella gera upp við nakra mynd av Nólsoyar-Pálli, men eg fari at viðgera nakrar tesur um Nólsoyar-Páll, sum verða settar framm í tí nýggjasta bókaverkinum hjá Guttesen um Nólsoyar-Páll. Útgangsstøðið er bókin hjá Guttesen, men av tí, at evnini í hesi bókini stórt sæð eru tey somu, sum fyrr hava verið viðgjørd av m.a. Jákupi Jakobsen, eru niðurstøðurnar viðkomandi fyri meginpartin av tí, sum fyrr er skrivað um Nólsoyar-Páll. Guttesen kemur onkuntíð til aðrar niðurstøður enn tey, sum undan honum hava skrivað um Nólsoyar-Páll, men talan er vanliga um aðrar niðurstøður um somu evni, sum Jákup Jakobsen hevur umrøtt. Onkrar niðurstøður eru nýggjar, men tær taka ofta støði í keldutilfari, evnum og hendingum, sum eru kend. Tó so, Guttesen hevur eisini leitað fram nógv nýtt keldutilfar, sum ikki hevur verið viðgjørt fyrr. Fyri at fáa eina hóming av hesum evnum, skal bygnaðurin av bókini hjá Guttesen - Poul P. Nolsöe. Skúmisleiv og tjóðarhetja - stutt lýsast niðanfyri.

Poul P. Nolsöe. Skúmisleiv og tjóðarhetja, er sett saman av 14 kapitlum, einum fororði og einum stuttum inngangi. Kapittul 1 snýr seg um barndóm og uppvøkstur hjá Nólsoyar-Pálli, og kapittul 2 lýsir samfelagsligu umstøðurnar í Føroyum, meðan hann vaks upp. Kapittul 3 snýr seg um tíðina Nólsoyar-Páll sigldi við skipum hjá Rybergs handli og skipum hjá Kongaliga einahandlinum úti í heimi, og til hann kom aftur til Føroya umleið 1800. Kapittul 4 snýr seg um tíðina á Oyri og á Biskupsstøð, meðan kapittul 5 snýr seg um Royndina Fríðu, ið Nólsoyar-Páll saman við øðrum bygdi suðuri í Vági í 1804. Kapitlarnir 6, 7 og 8 snúgva seg um teir 5 túrarnar, sum Nólsoyar-

Páll gjørdi við Royndini Fríðu til Danmarkar og Noregs 1805-1808, frískt koppingarevnið, sum hann flutti til Føroya við Royndini Fríðu í september 1805, og um ósemjur, rættarmál og dómar, sum hann orsakað av truplum viðurskiftum við embætisfólkini í Føroyum og Kongaliga Einahandilin gjørdist partur av í hesum tíðarskeiðinum. Kapittul 8 snýr seg ikki so nógv um Nólsoyar-Páll, men meira um neyðarárið 1808 og tað stóra arbeiðið, sum Emilius M.G. Løbner (1766-1849), kommandantur á Havnar skansa, ið harumframt umsat amtsviðurskiftini í Føroyum, javnaldur og høvuðsmótstøðumaður Nólsoyar-Pálls, sambært Guttesen gjørdi fyri at bøta um vánaligu støðuna og fyri at verja tey veiku og fátøku í Føroyum móti teimum sterkaru. Kapitlarnir 10 og 11 snúgva seg um bretsk herskipaálop og rán í Havn í 1808, tá ið Løbner yvirgav skansan, og um leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í hesum stórhendingum. Kapittul 12 snýr seg um rættarliga eftirspælið í London í 1808-1811, meðan kapitlarnir 13 og 14 tykjast vera eitt slag av niðurstøðum, sum snúgva seg um persónin Nólsoyar-Páll og hansara uppreisn til tjóðarhetju í 1880-árunum, serliga við søguligu verkunum hjá Jákupi Jakobsen doktara. Bókin hevur eisini ein enskan samandrátt, sum er ætlaður útlendskum lesarum.

Hetta er ein bygnaður, sum stórt sæð er samlíkur við bygnaðin og tey viðgjørdu evnini í verkinum hjá Jákupi Jakobsen frá 1912, hóast Jákup Jakobsen sjálvandi í sínum pionerarbeiði hvørki viðger nakran spurning um, hvussu Nólsoyar-Páll gjørdist føroysk tjóðarhetja, ella ger upp við nakra varðveitta mynd av Nólsoyar-Pálli. Ein grundleggjandi munur er kortini, at nærum helvtin av bókini hjá Jákupi Jakobsen, hon er 350 síður, snýr seg um skaldskapin hjá Nólsoyar-Pálli, sum hann kanska er mest kendur fyri í Føroyum, meðan Guttesen í sínum 496 síður drúgva verki onga sjálvstøðuga lýsing hevur av skaldskapinum hjá Nólsoyar-Pálli. Her er talan um val hjá høvundunum, sum eru útbúnir innan ymisk fak og virka í ymiskum tíðarskeiðum, men eingin bók um Nólsoyar-Páll kann geva eina fullfíggjaða mynd av manninum, uttan at yrkjarin eisini verður lýstur.

**Nýggjasta granskingin um Nólsoyar-Páll**
Í hesum brotinum verður ein lýsing av tilfari og arbeiðshátti í nýggjastu bókini hjá Rolf Guttesen sett fram.

Bókin byggir á rúgvusmikið keldutilfar, sum høvundurin hevur savnað saman í ymiskum skjalasøvnum og í bókum. Nakað av keldutilfarinum er kent, men nógv ókent keldutilfar um Nólsoyar-Páll, sum ikki fyrr hevur verið brúkt, verður eisini lagt fram og brúkt, og høvundurin endurgevur eins og Páll J. Nolsøe undan honum nógv keldutilfar, soleiðis at ein lesari fær høvi til sjálvur at gera metingar av verkinum. Í veruleikanum er so nógv og gott keldutilfar endurgivið í bókini, at tað ber til at gera sjálvstøðugar rannsóknir í bókini. Og tað er í veruleikanum eisini ein neyðug dygd, tí ein lesari gerst skjótt varugur við, at høvundurin ikki einans hevur eina óhefta søguvísindaliga tilgongd til evnið, men hann tykist eisini hava egin anti- og sympatiir mótvegis teimum persónum, sum verða umrøddir í hesi bók – serliga eru tað lýsingarnar av Nólsoyar-Pálli og Løbner, sum í tjóðskaparligu søguskrivingini hava verið ávikavist jaligar og neiligar, sum verða vendar á høvdið. Tann føroyska tjóðskaparliga hetjan verður ein sjálvsøkin ráksnúningur, lógbrótari og smuglari, sum sjáldan hevur heilt reint mjøl í posanum, meðan Løbner kommandantur verður tann ósjálvsøkni, siðiligi, umsorganarfulli og skilagóði persónurin við stórum samfelagssinni og hjartanum á røttum stað (Guttesen 2019, s. 306 og 314).

Høvundurin hevur lagt eitt sera stórt arbeiði í bókina og tað er alla æru vert at royna at gera upp við eldri tjóðskaparliga søguskriving, sum hevur fylt nógv í Føroyum til fyri 30 árum síðan. Hinvegin ger høvundurin ofta tann feilin, at hann fer í hina grøvina, har alt verður eins svart og hvítt, bert við øvugtum fortekni. Tað skemmur hesa góðu bókina, sum í mun til drúgva tilfarið kundi verið bókin um Nólsoyar-Páll og hansara tíð.

Heldur ikki leggur Guttesen fram nakað ástøði, háttalag ella spurdóm, sum hann hevur arbeitt við støði í og eingin yvirskipað lýsing av keldutilfarinum - styrkir og veikleikar - er at finna í bókini. T.d. kundi nakað verið sagt um, hvørjar avbjóðingar standast av at

lýsa ein persón, ið stríðist ímóti tí (konservativu) almennu skipanini, bóndasamfelagi og einahandli, við støði í keldum, sum í høvuðsheitum stava frá skjalasøvnum hjá almennum myndugleikum, men tað verður ongantíð gjørt. Tvørturímóti verður tað í viðgerðini av tilfarinum nærum tikið fyri givið, at tann (varðveitandi) almenna skipanin altíð hevur rætt, meðan gerðir og átøk hjá einstaklinginum, t.e. Nólsoyar-Pálli, sum bjóðar skipanini av, verða mettar í mun til sjónarmiðini hjá teimum almennu myndugleikunum í Føroyum. Eisini hóast tað onkuntíð tykist týðiligt, at myndugleikar í Danmark, t.d. krúnprinsurin, vóru meira opnir enn varðveitandi myndugleikarnir í Føroyum fyri at stuðla átøkum, sum miðaðu ímóti at flyta føroyska samfelagið burtur úr gomlu skipanini við bóndabúskapi og einahandli. Hesin problematikkurin verður kortini ongantíð tikin upp í bókini – heldur ikki tá krúnprinsurin beinleiðis í stríð við avgerðir hjá føroysku ella donsku einahandilsmyndugleikunum tekur støðu fyri tiltøkum hjá Nólsoyar-Pálli. M.a. fær Nólsoyar-Páll krúnprinsin til at lækka kornprísin og fær sjálvur til uppgávu at bera boðini til Føroya, samstundis sum krúnprinsurin gav Nólsoyar-Pálli loyvi til at hava korn við heimaftur til Føroya (Mortensøn 2014). Tað tykist eisini týðiligt, at krúnprinsurin helt, at embætisverkið setti forðingar í vegin fyri Nólsoyar-Páll, sum hevði uppiborið at vera stuðlaður (Nolsøe 1963, s. 130), men tað ger høvundurin lítið við í bókini.

Heldur ikki verður nøkur roynd gjørd upp á at lýsa og skjalprógva ta tjóðskaparligu mytuna um Nólsoyar-Páll, sum høvundurin sigur seg vilja gera upp við. Í innganginum verður víst til minnisvarðar yvir Nólsoyar-Páll og tað, at nógv er skrivað um hann, men ongastaðni fáa vit nakra greining av, *hvat* hesir rithøvundarnir hava skrivað um Nólsoyar-Páll. Tann nýtsla, ið høvundurin móti endanum á bókini, í síni roynd at seta fram eina kritiska mynd av persóninum Nólsoyar-Pálli, ger av seinni tilfari, sum stórt sæð alt er útgivið í 20. øld, gevur heldur onga ábending um, at nøkur tjóðskaparlig semja nakrantíð hevur verið í Føroyum um, at Nólsoyar-Páll var ein lýtaleysur persónur (Guttesen 2019, s. 423-435 og 21-22, í ávísum førum serliga tilvísingarnar). Hugsan hansara um, at persónurin

Nólsoyar-Páll, stutt eftir at hann doyði, var nærum gloymdur (Guttesen 2019, s. 424) fyri seint í 1800-talinum at rísa uppaftur sum føroysk tjóðarhetja (Guttesen 2019, s. 440, 443), serliga hjá Jákupi Jakobsen, tykist heldur ikki heilt sannførandi. Løgið tykist tað í hesum sambandi vera, at framsetingin tíðum er heft at akkurát upplýsingum í høvuðsverkinum hjá Jákupi Jakobsen frá 1912, sum Guttesen uttan kritiskar viðmerkingar gagnnýtir (sí t.d. Guttesen 2019, s. 184-185, 340, 342, 349 og 367).[1]

Merkisvert er tað eisini, at ongastaðni í bókini sæst ein grundleggjandi uppgerð við ta ímynd av Nólsoyar-Pálli, ið Jákup Jakobsen hevur teknað, og tað eru bert smávegis feilir, ið verða peikaðir á í bókini hjá Jákupi Jakobsen um Nólsoyar-Páll (eg havi einans funnið heilt fáar, ein snýr seg um talið á kanónum á skansanum, men tann feilurin varð rættaður av Páll J. Nolsøe í 1963 (Guttesen 2019, s. 353-354)) – sum oftast hevur Jakobsen rætt, tá Guttesen samanber við sítt tilfar (sí t.d. Guttesen 2019, s. 262) og lesarin fær sum nevnt ikki veruliga at vita, hvat hugsað verður um við tilsiping til mytuna um Nólsoyar-Páll - ella hvat sipað verður til við hugtakinum ein myta. Og tá hann onkuntíð finst at upplýsingum hjá Jákupi Jakobsen, fer hann ofta skeivur (t.d. Guttesen 2019, s. 157), ið vísast skal á seinni. Heldur ikki verður skjalprógvað, hvussu útbreidd „mytan" um Nólsoyar-Páll er millum føroyingar. Onkuntíð tykist tað við hugtakinum myta verða sipað til banalar feilir í eldri framsetingum, sum ikki eru annað enn tað (t.d. Guttesen 2019, s. 417), og til tíðir

1 Í hesi bók byggi eg av sjálvsøgdum grundum rættiliga nógv á bókina hjá Guttesen, men eg verji ikki míni sjónarmið við tilsipingum til Guttesen. Hinvegin meti eg ofta um verkið hjá Guttesen við at vísa til Guttesen, ið er nakað heilt annað. Eisini sipi eg ofta til Guttesen í sambandi við keldutilfar, sum Guttesen endurgevur, tí tað ger tað lættari at fylgja við hjá lesaranum, men tá havi eg, - sum lesarin leggur merki til - í tann mun tað hevur borið til, kannað, um upplýsingar ella endurgevingar eru heilt rættar. Hinvegin sipi eg ofta til keldutilfar, sum Guttesen av onkrari grund ikki endurgevur. Tá má eg sjálvandi vísa til aðrar heimildir. Tá eg beinleiðis byggi á okkurt, sum Guttesen skrivar í bókini, er tað tí, at tað er neyðugt fyri at meta um t.d. samanhangin í verkinum hjá Guttesen. Eg byggi ikki ókritiskt á upplýsingar í verkinum hjá Guttesen fyri at grundgeva fyri mínum egnu sjónarmiðum, men tað er greitt, at til tess at meta um fakligu dygdina í sjálvum søguverkinum hjá Guttesen, so er verkið hjá Guttesen høvuðskeldan, bæði tá tað snýr seg um tað, sum verður nevnt og endurgivið í verkinum, og tá tað snýr seg um tað, ið onkursvegna ikki verður nevnt ella endurgivið í verkinum.

verður tann avdúkaða „mytan" sett framaftur sum søguligur veruleiki seinni í bókini (Guttesen 2019, s. 479). Tað kann ikki bæði vera myta *og* søguligur veruleiki, at Royndin Fríða gjørdist vrak á veg inn til Gøteborg í 1808. Søgan um, at Royndin Fríða ikki gjørdist vrak í Gøteborg er annars fortald av Páll J. Nolsøe í 1963 (Nolsøe 1963, s. 163), so skuldi talan verið um „mytu," at Royndin Fríða gjørdist vrak, so er hon ikki nýliga avdúkað.

Móti endanum á bókini, í kapitlinum Uppreisn til tjóðarhetju, verða hesi orðini hjá bókmentafrøðinginum Kim Simonsen endurgivin: „In my view there is no deeper logical connection between Nólsoyar-Páll's life and the later use of him as a national hero and cultural saint" (Guttesen 2019, s. 440). Hetta sitatið kundi havt verið ein góð byrjan til ein skilagóðan spurdóm undir fakliga arbeiðinum við persóninum og mytuni um Nólsoyar-Páll, men hetta sitatið verður bert endurgivið til seinast í bókini fyri at stuðla undir okkurt slag av niðurstøðu, uttan at ein tílíkur problematikkur nakrantíð er orðaður í innganginum ella viðgjørdur í bókini. Í veruleikanum haldi eg, at bókin átti at byrjað her, t.e. við einum líknandi spurdómi, og so kundi viðgerðin og bókin endað við, at lesarin í niðurstøðuni fekk eitt kvalifiserað boð upp á, um ella í hvønn mun samsvar er millum persónin Nólsoyar-Páll og ta modernaðu føroysku tjóðskaparmytuna um mannin. Tann spurningurin stendur hinvegin ósvaraður fyri tann lesara, sum hevur lisið hesa bók um Nólsoyar-Páll. Í veruleikanum fær lesarin ofta lítið annað enn ta klassisku myndina av Nólsoyar-Pálli hjá Jákupi Jakobsen, tó her krydrað við nøkrum illgitingum, sum høvundurin í flestum førum lítið og einki keldugrundarlag hevur fyri at seta fram. Tað er spell, tí talan er um eitt stórt og sera virðismikið arbeiði, sum kundi havt verið høvuðsverkið um Nólsoyar-Páll, um so var, at høvundurin í størri mun hevði latið ein greiðan spurdóm og keldurnar leitt granskingina.

Viðvíkjandi tekstinum kann sigast, at hann onkuntíð er fløkjasligur, í støðum tykist hann vera inkonsistentur. Í fleiri førum verða spurningar beinleiðis settir við niðurstøður í framsetingini (Guttesen 2019, s. 348), sum eru væl grundaðar í samtíðar skjølum og eisini

staðfestar av høvundinum - onkuntíð á somu síðu (Guttesen 2019, s. 343, 345, 346, 347 og 348). Skansaprotokollin tykist t.d. greið, tá ið hon 28. apríl 1808 staðfestir, at skansamanningin helt, at Clio var „et Fransk Skib," eins og dagbókin hjá Claus Lund 3. mai 1808 er greið, tá ið hon staðfestir, at „Af Capt. Nolsöe berettedes han at være Engelsk," men Guttesen fer aðrastaðni í bókini ímóti báðum keldunum (Guttesen 2019, s. 348), tá hann ivast í, hvør avdúkaði, at skipið var bretskt. Seinni tykist hann tó sannførdur um, at boðini komu til kommandantin frá Nólsoyar-Pálli (Guttesen 2019, s. 361).

Hetta eru viðurskifti, sum snúgva seg um skrivingarlag og samanhang í tekstinum, ikki um fakligu viðgerðina av sjálvum keldutilfarinum, ið er eitt høvuðsevni í hesi bók, men tey kunnu órógva meiningina í tekstinum. Søguligir tekstir kunnu ikki einans metast í mun til, hvussu sannførandi sambandið millum tekst og keldur er, men teir mugu eisini metast í mun til, hvussu samanhangandi og sannførandi teksturin er í sjálvum sær.

**Spurningar og søgufakligar meginreglur handan viðgerðina**

Tað kann helst tykjast ágangandi at nýta eina søgubók, sum ein sjálvlærdur søgufrøðingur gevur út á egnum forlagi, sum tilfar til alment søgufakligt kjak, men tá bókin hjá Guttesen er væl egnað til hetta, eru serliga fýra grundir til hetta. Í fyrsta lagi (1) er talan um eitt søguverk, sum umrøður eitt avmarkað søguligt evni (Nólsoyar-Páll og hansara gerðir - í minni mun hansara tíð), í øðrum lagi (2) eru talan um søguligt verk, sum endurgevur og vísir til ein hóp av keldutilfari um evnið, í triðja lagi (3) er talan um eitt sera viðkomandi evni (ein føroysk tjóðarhetja), sum verður viðgjørt í søguverkinum, og í fjórða lagi (4) eru nógv provokerandi uppáhald – tesur – í hesi bókini, sum eru serstakliga vælegnað til at byggja eitt søgufakligt kjak rundanum. Framsetingin fer at verða skipað rundan um nakrar av hesum provokerandi tesunum, sum harumframt eru søgufakliga umstríddar, men tað má ikki leiða okkum til at halda, at alt verkið hjá Guttesen er ivasamt og umstrítt. Talan er í nógvar mátar um eina frálíka og provokerandi bók, sum Guttesen hevur skrivað, men

júst tí eru partar av henni væl egnaðir til at byggja eitt kjak um søgugransking og søguskriving rundanum.

Í hesi bók fer ikki at verða sett fram nøkur viðgerð av innihaldinum í verkinum, sum hevði verið eitt jaligari sjónarmið upp á verkið, men heldur verður við dømum herðsla løgd á háttalagsligar søgufakligar spurningar. Útvaldar grundgevingar og niðurstøður í bókini, sum eisini eru viðkomandi fyri tað, sum frammanundan er granskað og skrivað um Nólsoyar-Páll, fara at verða viðgjørdar við støði í empiriska tilfarinum um Nólsoyar-Páll, men niðurstøðurnar í hesi bókini verða kortini ikki altíð tær somu, sum Guttesen kemur fram til í síni bók. Orsøkin er, at háttalagsliga tilgongdin, sum verður lýst niðanfyri, er øðrvísi enn í bókini hjá Guttesen.

Fyri at viðgera hetta nevnda arbeiðslagið hjá Guttesen skulu níggju illgrunar (her nevndar tesur) í verkinum umrøðast og roynast. Tesurnar, sum verða viðgjørdar undir hvør sínari yvirskrift, eru hesar: 1) Løbner var í oktober 1801 fyrstur at flyta frískt koppingarevni til Føroya og fyrstur at koppseta í Føroyum. 2) Nólsoyar-Páll framdi loynihandil í 1805-1808. 3) Nólsoyar-Páll breyt í oktober 1807 allar siglingarreglur, sáttmálan og kontraktina, tá ið hann legði korn upp í Suðuroy. 4) Nólsoyar-Páll rýmdi í juni 1808 frá neyðarrópinum hjá Løbner og hungrandi landsmonnum. 5) Nólsoyar-Páll fekk í mai 1808 Baugh kapteyn á bretska herskipinum Clio til at hertaka og oyðileggja skansan í Havn. 6) Nólsoyar-Páll upplýsti fyri Baugh kapteyni, at fíggindaskip lógu á Havnini. 7) Tað var rætt av Løbner at yvirgeva skansan til Baugh kapteyn. 8) Tað var Nólsoyar-Páll, ið fekk Hompesch kapteyn á Salamine at koma aftur á Havnina 6. juni 1808 fyri at ræna vørurnar í Kongaliga einahandilin. 9) Høvundurin ger í bókini upp við tjóðskaparligu mytuna um Nólsoyar-Páll, soleiðis sum tann føroyska tjóðakaparrørslan og serliga Jákup Jakobsen hevur skapt hana síðan 1890-árini. Meðan tær fyrstu átta tesurnar allar verða settar fram í bókini um ávís evni, so er tann seinasta meira ein yvirskipað tesa, sum eg seti fram fyri at svara spurninginum, um tað hevur eydnast at gera upp við tjóðskaparmytuna. Her mugu vit kortini taka tað fyrivarni, at vit ikki vita, hvussu hugsað verður

um tjóðskaparmytuna, men her fari eg at skilja mytuna sum tann persónin, sum Jákup Jakobsen setti fram í báðum sínum verkum um Nólsoyar-Páll.

Viðgerðin verður í hesi bók skipað við støði í hesum níggju háttalagsligu meginreglum/spurningum: 1) Hvat er endamálið við viðgerðini, og er endamálið nøktandi orðað? 2) Er viðgerðin og framsetingin konsistent, t.e. uttan mótstríð? 3) Verður tað viðgjørda evnið sett inn í tann rætta ella viðkomandi søguliga kontekstin? 4) Verða søguligar analogiir - t.e. samanberingar - brúktar á nøktandi hátt í viðgerðini? 5) Er kelduviðgerðin og sjálv framsetingin koherrent, hongur alt saman sum ein heild? 6) Eru týðandi upplýsingar, sum framsetingin er grundað á, evidensgrundaðar, t.e. grundaðar á holla viðgerð av viðkomandi keldum? 7) Eru frágreiðingar í framsetingini sannlíkar? 8) Er hædd tikin fyri, at eitt ávíst rúm altíð er fyri persónligum tulkingum í søgu? 9) Er tað møguligt innan søgugransking at flyta hana frá mýthos (subjektiviteti) nærri móti logos (rationaliteti)? Hesar háttalagsligu meginreglur liggja undir allari viðgerðini, men tær verða ikki heilt rullaðar út, fyrr enn í tí seinasta kapitlinum, sum snýr seg um háttalagsligar meginreglur, ið søgugransking eigur at vera grundað á.

Meðan teir fyrstu 8 fakligu spurningarnir eru orðaðir í mun til ítøkilig evni í granskingini, er tann seinasti ein meira almennur spurningur, sum spyr um søgugransking yvirhøvur førur til ella kann føra okkum nærri nøkrum, sum kann kallast „søguliga veruleikanum." Tí eitt er, at ítøkilig søguskriving ikki altíð gevur okkum betri innlit í søguligar spurningar, men ein annar spurningur er, um tað yvirhøvur er møguligt við empiriskari gransking at fáa eitt betri innlit í ein farnan søguligan veruleika, sum ikki longur er til sum annað enn minnir.

Áðrenn vit koma til tær níggju tesurnar, skulu nøkur almenn eyðkenni og dømi afturat úr bókini hjá Guttesen umrøðast. Eg hava einans nevnt níggju tesur (illgrunar), sum verða settar fram í bókini, men tað verða nógv fleiri tílíkir illgrunar settir fram í bókini, sum stutta umrøðan niðanfyri kann geva lesaranum ábendingar um.

**Níggju søgufakligar meginreglur**

*Endamál. Tá ein søguligur tekstur verður skrivaður, er neyðugt at seta nakrar greiðar fakligar spurningar, ið leiða arbeiðið við tekstinum, soleiðis at møguleikin fyri, at tilvildarlig viðurskifti stýra arbeiðinum minkar.*

*Konsistensur. Í einum teksti noyðist ein høvundur at tryggja sær, at mótstríð ikki er millum tann hátt keldur, persónar ella evni verða viðgjørd í tekstinum. Mótstríð er skilvíst prógv um, at okkurt er skeivt í tekstinum.*

*Kontekstur. Tað er neyðugt at tryggja sær, at keldur og hendingar verða settar inn í tann viðkomandi samtíðar kontekstin, t.e. samanhangin. Verða tær settar í skeivan ella ongan kontekst, so er vandi fyri misskiljingum.*

*Analogi. Tað er ofta skilagott at samanbera søguligar hendingar við onnur líknandi dømi úr søguni, men tað er eisini sera umráðandi at vera serstakliga tilvitað um teir munir, ið altíð eru millum ymisk søgulig fyribrigdi.*

*Koherrensur. Tað er umráðandi at tryggja sær, at gransking og framseting hanga saman sum ein heild, soleiðis at bæði teksturin sjálvur og viðgerðin av øllum keldunum, sum hann byggir á, hanga saman sum ein heild.*

*Evidensur. Tað er umráðandi, at týðandi upplýsingar í framsetingini, sum eru fingnar burtur úr keldunum, eru kannaðar við keldukritiskum amboðum, soleiðis at berandi súlur í tekstinum kunnu standa fyri eini roynd.*

*Sannlíkindi. Í einumhvørjum teksti eru samanhangir og frágreiðingar settir fram av høvundinum, sum ikki eru grundaðir á fakta. Tí er tað umráðandi, at høvundar royna at seta fram mest sannlíku frágreiðingarnar.*

*Samleiki. Uttan mun til, hvussu neyvt ein søgufrøðingur leggur seg eftir at fylgja fakligum meginreglum, er altíð rúm fyri tulkingum. Tí er tað umráðandi, at søgufrøðingar hugsa hetta sum ein part av arbeiðinum.*

*Frá mythos til logos. Ein uppgáva hjá søgufrøðingum er at avlíva søguligar mytur, men halda teir seg ikki til søgufakligar meginreglur, so kunnu teir í veruleikanum koma til at seta fram heilt nýggjar søguligar mytur.*

**Nøkur innleiðandi dømi um tesur, hall og arbeiðslag í nýggjastu granskingini**

Guttesen hevur lagt stóra orku í at fáa til vega nógv og dygdargott keldutilfar um Nólsoyar-Páll, men kortini velur hann ikki at leggja fram nakað ástøði ella háttalag, sum hann viðger alt tilfarið við støði í og – uppaftur meira undranarvert – ofta tykist hann blanda persónlig anti- og sympatiir upp í framsetingina. Í bókini eru nógvar illgitingar og retoriskir spurningar, sum - uttan keldugrundarlag - neyvan kunnu hava annað endamál enn at sáa iva um høvuðspersónin í bókini, meðan aðrir persónar, m.a. Løbner, verða viðgjørdir við støði í øðrum – fyri ikki at siga ongum – slíkum kritiskum spurningum. Fakliga er hetta ivasamt (inkonsistent), og tað gevur bókini eina subjektiva slagsíðu, sum ger, at hon tíðum eins nógv tykist endurspegla persónlig sjónarmið hjá høvundinum sum eina umboðandi, sakliga og háttalagsliga konsistenta viðgerð av tilfari, evni og persónum.

Tað er m.a. óneyðugt at lesa áhaldandi tilsipingar til, at lítið kom burtur úr fiskiskapinum hjá Nólsoyar-Pálli við Royndini Fríðu, sum var fyrsta havgangandi skip, ið føroyingar høvdu átt í øldir, ikki minst tá sannlíkt er, at Løbner hvørki stuðlaði føroyskari fiskivinnu við deksbátum ella fríhandlinum (Jespersen og Nolsøe 2009, s. 259 ff og Muhle 1835, s. 42). Hetta nevnir Guttesen tó einki um, hóast hann einaferð sipar til, at Løbner sýtti fyri at geva Nólsoyar-Pálli loyvi at fara at fiska, men hann tekur, sermerkt fyri hallið í bókini, ókritiskt umberingina hjá Løbner fyri áljóðandi (Guttesen 2019, s. 192). Guttesen kundi upplýst fyri sínum lesararum, hvussu nógv kom burturúr øðrum royndum í Føroyum at reka (vinnuligan) fiskiskap við deksbátum, eisini royndum undir seinni meira framburðssinnaðum amtmonnum í 1820'unum og 1830'unum, sum í mun til tann nakað konservativa Løbner beinleiðis stuðlaðu fríhandli og fiskivinnuroyndum – svarið hevði her mest sannlíkt verið lítið og einki. Carl Adolf Muhle (1786-1855), sum í nógv ár var høvuðsbókhaldari við Kongaliga einahandilin í Keypmannahavn, helt, at enntá tær seinnu føroysku royndirnar at reka (vinnuligan) fiskiskap við størri

deksførum í 1820-árunum miseydnaðust orsakað av Kongaliga einahandlinum (Muhle 1835, s. 10).

Tað eru eisini upplýsingar í samtíðarkeldum hjá Guttesen um, at Nólsoyar-Páll var til fiskiskap í fleiri dagar, t.d. í dagbókini hjá Claus Lund, upplýsingar, sum Guttesen nærum tileinkisger (Guttesen 2019, s. 132-133, 139, 192); men tað átti at sagt seg sjálvt, at dagbókin hjá Claus Lund, sum er skrivað í Havn, neyvan kann upplýsa okkum nakað avgerandi um, hvussu ofta Nólsoyar-Páll fór til fiskiskap við Royndini Fríðu úr Vági (Klaksvík) í Norðuroyggjum – einans, at Claus Lund onkuntíð hevði sæð Nólsoyar-Páll fara til fiskiskap við Royndini Fríðu úr Havn. Ein frágreiðing um, at tað kanska ikki kom so nógv burturúr, sum Guttesen kundi hugsað sær, kundi verið væntandi stuðul ella kanska mótstøða í Føroyum, eisini frá handilsmyndugleikunum. Hartil kemur, at Nólsoyar-Páll doyði í bestu árum á vandaferð í krígstíð úr London/Leith til Føroya við vøru til hungursraktar føroyingar, einans 42 ára gamal, og at hann, í eini tíð, har landbúnaðurin var tann avgerandi vinnan í Føroyum, valla nakrantíð hevði ímyndað sær, at Royndin Fríða einans skuldi gagnnýtast til at reka vinnuligan fiskiskap við. Tað tykist hinvegin týðiligt, at høvundurin heldur, at Nólsoyar-Páll ongantíð hevði ætlað sær at fiska, men bert bygdi Royndina Fríðu til smuglaravirksemi (Guttesen 2019, s. 432 f). Heldur ikki tykist hann viðurkenna, at Nólsoyar-Páll slóðaði fyri nøkrum broytingum í føroyska bóndasamfelagnum, tó at tað er heilt týðiligt, at í árunum aftan á 1809 var tað viðurkent, at mangul á deksførum var ein forðing fyri framburði, og nólsoyingar høvdu bæði í 1810, 1813 og 1817 deksbátar í gerð (t.d. Muhle 1835, s. 8, 22, 39-40, 63). Skonnartin Nødvendigheden varð bygd í 1810 í Hvalba, enntá saman við suðuroyingum, sum høvdu bygt Royndina Fríðu saman við Nólsoyar-Pálli og Jákupi í Toftum í Vági (sí Jespersen og Nolsøe 2009, s. 202).

Aðrastaðni tykist Guttesen so ókritiskur, at hann tykist seta fram nýggjar mytur um Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 420-422, 456-457). T.d. verður ein heilt týðiligur feilur í danskari søgubók frá 1852, sum ikki tykist hava fingið við, at Nólsoyar-Páll gekk burtur

á veg til Føroya seint út á árið 1808, saman við uppáhaldi í eini røðu hjá Hammershaimb frá 1887 um, at Nólsoyar-Páll „í krígsárunum skaffaði vørur úr Skotlandi," sagdar at vera „tvær keldur, óheftar av hvørjari aðrari, sum báðar siga, at Poul P. Nolsöe í minsta lagi einaferð kom vegin fram og legði korn upp í Føroyum." Omanfyri nevnda danska søgubók upplýsir heilt skeivt, at „Nolsø sejlede seent paa Efteraaret 1808 fra England med Skibet *North Star* til Færøerne, som dermed frelstes fra Nød Vinteren over." Síðan verða báðar ´keldurnar` gagnnýttar til at seta fram tann møguleikan, at Nólsoyar-Páll „hevur verið ein skjótan túr í Skotlandi í mars 1808." Nólsoyar-Páll *kom* einaferð vegin fram til Føroya við korni, men tað var í oktober 1807 við Royndini Fríðu, ikki í mars 1808 ella á heysti í 1808 við North Star, sum sambært ongum viðkomandi samtíðarkeldum nakrantíð kom vegin fram „fra England … til Færøerne." Í veruleikanum staðfesta samtíðarkeldur hjá Guttesen eisini, at „det første Skib i dette Aar," t.e. í 1808, sást ikki í Føroyum fyrr enn 28. apríl 1808 (Guttesen 2019, s. 346 og 336), tá ið vit eisini fáa upplýst, at Nólsoyar-Páll var í Føroyum (Guttesen 2019, s. 343). Heldur ikki er minsta ábending í frágreiðingunum hjá Løbner til rentukamarið um, at nakar var komin til Føroya við vørum á vári 1808. Tvørturímóti gramdi Løbner seg 4. juni 1808 um hóttandi hungursneyð, kornið hevði tá verið skamtað síðan januar og síðan mai 1808 hevði Løbner verið í sámráðingum við Nólsoyar-Páll um at fara til Danmarkar við boðum til myndugleikarnar um eina hóttandi hungursneyð í Føroyum (Nolsøe 1963, s. 137-139). Og tá heldur eingin onnur samtíðarkelda veit nakað at upplýsa um, at Nólsoyar-Páll í „mars 1808" kom við kornfarmi til Føroya „úr Skotlandi," so átti greiningin av keldunum at leitt søgugranskaran til ta nakað meira sannlíku niðurstøðu, at talan var um ´tveir ymiskar feilir`, sum ´óheft av hvørjum øðrum` vóru komnir inn í tvær seinni framsetingar. Guttesen leggur hinvegin upp til at seta báðar ´feilirnar`, sum heldur ikki upplýsa júst tað sama (Nólsoyar-Páll kom sambært aðrari søguni til Føroya úr Onglandi og hinari úr Skotlandi) saman til ´nýggja mytu` um Nólsoyar-Páll. Hevði høvundurin skilt millum ´primerar keldur` og ´seinni framsetingar`, sum hann ikki ger (alt tilfar

verður bara bólkað sum „keldur„), so hevði lesarin verið spardur fyri grundleys uppskot, ið eru í stríð við samtíðarkeldur.

Hevði høvundurin kannað søguna hjá Hammershaimb eitt sindur neyvari, áðrenn hann gitti, hevði hann funnið útav, hvaðani feilurin hjá Hammershaimb um skotlandstúrin hjá Nólsoyar-Pálli mest sannlíkt stavar frá. Nólsoyingar og suðuroyingar tóku longu í 1810 arvin upp eftir Nólsoyar-Páll og bygdu lítlu skonnartina Nødvendigheden í Suðuroy. Nødvendigheden gjørdi í 1810 túrar til Skotlands eftir neyðsynjarvørum (Olsen 2016, s. 28), so mest sannlíkt er bland komið í hjá Hammershaimb. Tað er hinvegin vert at leggja merki til, at North Star á lagnuferðini seint í 1808 úr Londan til Føroya legði inn í Leith í Skotlandi eftir korni at flyta til Føroya (sí Nolsøe 1963, s. 165 og Olsen 2016, s. 83-84). North Star kom sambært teimum viðkomandi samtíðarkeldunum tó ongantíð leiðina fram til Føroya, men søgur um seinni túrar í 1810 úr Skotlandi til Føroya við korni eru væl grundaðar, meðan sannlíkindini fyri, at Nólsoyar-Páll og Royndin Fríða í mars 1808 komu úr Skottlandi til Føroya við vøru, tykjast vera grundleys og stórt sæð útihýst av samtíðarkeldunum.

Fyri tann, ið kennir eitt sindur meira til keldutilfarið, er tað eisini týðiligt, at Guttesen er selektivur í mun til, hvat hann endurgevur. M.a. verður einki nevnt um, at Løbner sambært egnum samskifti við myndugleikar í Danmark týðiliga tóktist vera bangin fyri, at Nólsoyar-Páll kundi gerast leiðari fyri eini uppreistrarsinnaðari føroyskari almúgu (Nolsøe 1963, s. 117, 127, 129), og seinni bendir Løbner í veruleikanum á, at tað ikki kom honum so illa við, at Nólsoyar-Páll ikki kom aftur av seinasta túrinum úr London seint á árið í 1808. Týdning hevur Nólsoyar-Páll í øllum føri havt, tá Løbner skrivaði til rentukamarið 7. apríl 1809, tá eingin vón longur tóktist vera um, at Nólsoyar-Páll fór at koma aftur av lagnutúrinum, at veturin hevði verið friðarligur, og at hann ikki kundi sýta fyri, at „P. Nolsøes fraværelse“ møguliga var ein grund til hetta (Jakobsen 1892, s. 598).

Guttesen gagnnýtir hvørki eitt ástøði ella eitt fakligt háttalag, sum tryggjar, at keldur, stovnar og persónar verða viðgjørdar við støði í einum heildarsjónarmiði ella konsistentum søgufakligum mátistokki.

Heldur ikki fær lesarin gjøgnum lesturin nakra hóming av, at aftan fyri arbeiðið við verkinum liggja nakrar háttalagsligar fyritreytir, sum bara ikki beinleiðis eru orðaðar í innganginum. Tvørturímóti. Hann nevnir tó í innganginum nakað um ta mest sannlíku frágreiðingina, men tað ber ikki altíð til at síggja, um ella hvussu hann gagnnýtir hetta háttalagið í viðgerðini av tilfarinum og spurningunum, sum verða settir. Tesan um túrin hjá Nólsoyar-Pálli úr Skotlandi til Føroya í mars 1808 við korni tykist í øllum førum sera ósannlík. Onnur dømi, sum eg skal koma nærri inn á, tykjast eisini benda á, at hann onkuntíð setur fram eina ta mest ósannlíku frágreiðingina.

Nú er klárt at fara undir nærri viðgerð av teimum níggju tesunum, ið verða settar fram í bókini hjá Guttesen.

# Løbner var fyrstur at koppseta í Føroyum

Í 17. og 18. øld herjaði tann deyðiliga sóttin pokurnar í Evropa, har hon bara í 18. øld kravdi umleið 60 milliónir mannalív. Menniskjan var einasti vertur, sum pokurnar húsaðust í, og tær breiddust við smittu skjótt í tætt bygdum økjum. Deyðiligheitin var vanliga millum 20-30%, men millum børn, sum vórðu rakt av smittuni, var deyðiligheitin kortini nógv hægri, upp ímóti 80%. Sjúkan varð bólkað millum barnasjúkurnar, „børnekopper," men hon var avgjørt ikki fyri børn. Tey hepnu, sum fingu og yvirlivdu sjúkuna, gjørdust hinvegin mótstøðufør ímóti barnapokum restina av lívinum. Tey smittaðu fingu svullir við vesku í á stórar partar av likaminum, sum - um tey vóru heppin og yvirlivdu - arr sóust av restina av lívinum, og nógv av teimum mistu eisini sjónina fyri lívið. Mett verður, at umleið 30% av øllum teimum blindu í Evropa seinast í 1700-talinum høvdu mist sjónina orsakað av, at tey høvdu verið sjúk við pokum (Eberhardt 2016, s. 54).

Pokurnar gjørdu um seg í Føroyum í 1651, í 1709 og í 1725, tá ið tær herjaðu í Føroyum fyri seinastu ferð. Nógv doyðu av sjúkuni. Í 1709 doyðu 250 fólk í Havn, umleið 75 % av fólkinum. Í Danmark herjaðu pokurnar eins og í Evropa langt áðrenn tær komu til Føroya og tær vóru eisini javnari gestur í Evropa enn í Føroyum. Pokur gjørdu harumframt veruliga um seg í Danmark í 1801 og í 1808, tá tær ikki gjørdu um seg í Føroyum.

Síðan tíðliga í 18. øld høvdu ráðini, sum komu úr eysturlondum, verið at koppseta við at flyta vág av sárum á smittaðum fólki yvir á frísk fólk, men hetta var ikki heilt vandaleyst, tí tey fólk, sum blivu koppsett á hendan hátt, vóru í einum ávísum vanda fyri sjálv at gerast sjúk av barnapokum, og í ringasta føri kundu tey doyggja. Harumframt kundi tað vera byrjanin til nýggja smittu av pokum. Tí gjørdist hesin sjálvbodni koppingarháttur ongantíð serliga nógv útbreiddur, heldur ikki tá ein koppingarstovnur varð settur á stovn í Keypmannahavn í 1769. Eitt stórt vísindaligt frambrot hendi í 1798, tá ið enski læknin Edward Jenner prógvaði, at heldur enn at flyta vandamiklan vág frá smittaðum yvir á ósmittað fólk, bar væl til at brúka neytakoppar, ein veikari virus, neytapokur, sum neyt fingu. Neytakoppar vardu eisini fólk ímóti teimum vandamiklu barnapokunum. Neytakopparnir vóru harumframt at kalla meinaleysir fyri fólk (Jacobsen 2004, s. 190-193). Edward Jenner prógvaði eisini, at tá ið fólk fyrst vóru koppsett við neytakoppum, kundi koppingarevni (vágur) flytast millum fólk, frá koppsettum fólki til frísk fólk, sum við hesum vórðu koppsett ímóti teimum vandamiklaru barnapokunum. Fyrst í 1800, tá pokurnar herjaðu, breiddist hesin nýggji koppingarhátturin kring alt Evropa, eisini til Danmarkar, har tær fyrstu royndirnar vórðu gjørdar í 1801, og hagani kom hann víðari til Føroya.

Síðan danska blaðið Dagen 27. juni og 31. oktober 1806 skrivaði um Nólsoyar-Páll, hevur hevdvunna søgan verið, at Nólsoyar-Páll varð fyrstur at fáa frískt koppingarevni til Føroya við Royndini Fríðu 2. september í 1805. Tað verður tó eisini upplýst í blaðnum, at onnur „forhen," t.e. undan Nólsoyar-Pálli, høvdu roynt á annan hátt, men tær royndirnar miseydnaðust (Dagen 27. juni og 31 oktober 1806). Tað vóru kend fólk, 1) Lund løgmaður, 2) Løbner kommandantur, 3) Jóhan Hendrik Egholm, bóndi í Hvalvík, sum kanska ikki er so kendur (sí Jacobsen 2004, s. 53-55) og 4) seinast hevði Mørch handilsforvaltari „sidste foraar," t.e. helst á vári í 1806, tikið koppingarevni við sær úr Danmark til Føroya í 14 væl forsegladum gløsum. Tann seinasta royndin tykist sostatt vera gjørd aftan á Nólsoyar-Páll, hóast Dagen 31. oktober 1806 eisini orðar seg sum at tann royndin skuldi havt

verið áðrenn – „forhen.“ Eisini hevur søgufrøðingurin Elin Súsanna Jacobsen í 2004 peikað á, at kanska var fyrsta koppsetingin í Føroyum longu í 1802, men hon tykist tó hella til, at royndin hjá Nólsoyar-Pálli varð tann fyrsta royndin, sum eydnaðist (Jacobsen 2004, s. 195-196). Sum nevnt høvdu tey fýra/trý, sum sambært Dagen frammanundan Nólsoyar-Pálli høvdu roynt at flutt koppingarevni til Føroya, brúkt gløs at flyta koppingarevnið í. Hetta verður eisini váttað í frágreiðingum frá donsku koppingarnevndini (Callisen 1809, s. 78, 102, 109). Tað var sambært Elini Súsonnu Jacobsen eisini soleiðis, at koppingarevni frá danska Vaccinations Anstalten varð flutt til Føroya, men ferðin var so long, at koppingarevnið ofta var spilt, áðrenn tað kom fram. Hetta var ein stór avbjóðing, sum koppingarmyndugleikarnir stríddust við tey fyrstu árini (Callisen 1809, s. 93-95). Hartil kom, at eydnaðist tað at fáa óspilt koppingarevni til Føroya á henda hátt, so kundi tað ikki goymast, tá ið glasið varð ásett, men mátti haldast livandi við at verða flutt yvir á eina lítla skeinu, sum varð skorin í armin á honum/henni, ið skuldi koppsetast, haðani frískt koppingarevni nakrar dagar seinni so kundi takast úr skeinini á tí koppsetta og á sama hátt flytast yvir á annan persón, sum skuldi koppsetast. Nólsoyar-Páll skuldi sambært Dagen eisini ávegis til Føroya við Royndini Fríðu havt varðveitt koppingarevnið frískt við fyrst at koppseta ein av manningini, so tann næsta og so tann triðja o.s.fr., soleiðis at koppingarevnið varð varðveitt frískt og klárt at brúka í tí seinasta manninum, tá ið komið var til Føroya. Eingin hevði sambært Dagen frammanundan roynt at flyta frískt koppingarevnið til Føroya á henda hátt.

Tað er sostatt ikki nakað kollveltandi nýtt, tá ið Guttesen vil vera við, at Nólsoyar-Páll ikki var fyrstur at flyta koppingarevni og at koppseta í Føroyum (Guttesen 2019, s. 169), men tað er nýtt, at onkur longu í 1801 skal hava flutt koppingarevnið til Føroya – kanska á sama hátt sum Nólsoyar-Páll í 1805 (Guttesen 2018, s. 14 og 2019, s. 162), tí tað hevur eingin fyrr hildið uppá. Guttesen tykist hinvegin viðurkenna, at Nólsoyar-Páll kom við frískum koppingarevni til Føroya í 1805, og at hann og seinni konan gjørdi stórt arbeiði við at koppseta, tí hetta er skjalfest í kirkjubókunum. Nólsoyar-Páll fekk

eisini viðurkenning fyri tað stóra arbeiðið, sum hann hevði gjørt í hesum sambandi (Guttesen 2019, s. 168). Guttesen skjalprógvar harafturímóti ikki, at royndir áðrenn 1805 at flyta koppingarevni til Føroya, sum eru væl kendar (sí Jakobsen 1912, s. 74), ella royndir at koppseta í Føroyum áðrenn 1805, sum hóast tær eru nevndar av Elini Súsonnu Jacobsen óivað ikki eru eins kendar, eydnaðust, soleiðis skilt, at nýggja koppingarevnið varð breitt út millum føroyingar og „fólk av fólki" varðveitt frískt í fólkinum. Tað tykist meira sannlíkt, at hesar royndir miseydnaðust, sum Dagen upplýsti, tá Nólsoyar-Páll í september 1805 gjørdi nýggja roynd, sum vit skulu síggja eydnaðist. Heldur ikki skjalprógvar Guttesen, at nakar frammanundan Nólsoyar-Pálli í 1805 flutti frískt koppingarevni „fólk av fólki" til Føroya.

Tað framgongur beinleiðis av „Vaccinations - Commissionens 5te Indberetning til hans Majestæt Kongen for 1806 af 13de April 1807," sum má roknast at vera álítandi samtíðarkelda, har myndugleikarnir taka soleiðis til: „Til Færøerne er flere Gange her fra Institutet opsendt Vaccine-Materie, men uden at dens Anvendelse er bleven virksom. I Aaret 1805 fattede derimod Skibs Capitain Paul Poulsen Nolsøe det Forsæt, om mueligt at bringe Vaccinen herfra til sit Fædreneland paa samme Maade, som den spanske Regiering har ladet den bringe til Sydamerika, nemlig paa levende Mennesker." Hetta seinasta sipar til, at spaniólar í 1500-talinum, uttan at vita tað, tóku pokurnar við sær til Suðuramerika, har upprunafólk, ið ikki høvdu ment mótstøðuføri ímóti „evropeiskum" sjúkum, blivu smittað og kanska doyðu upp til 95%, fyrst og fremst av evropeiskum sjúkum (Diamond 2002, s. 235), meðan tey 5%, sum yvirlivdu, mentu mótstøðuføri móti pokum og øðrum sjúkum. Síðan heldur koppingarnevndin fram í síni frágreiðing: „Han lod sig til den Ende her i Staden lære at vaccinere, lod Vaccinen anbringe paa een af sine Skibsfolk, der alle vare hans Landsmænd, forsynede sig desuden med Materie, i Tilfælde at den paa Veien skulde uddøe, forplantede den friske Materie undervejs paa det øvrige Skibs-Mandskab, og bragte derved Vaccinen til benævnte hans Fædreneland, hvor han i forrige Aar deels selv og deels ved Bistand af sin Broder, Handels-Betient Jacob Nolsøe, i Thorshavn har

udbredt Vaccinationen saaledes, at den nu kan ventes der vedligeholdt" (Callisen 1809, s. 113).[2] Hesi orðini, „Han … forsynede sig desuden med Materie, i Tilfælde at den paa Veien skulde uddøe," benda týðiliga á, at Nólsoyar-Páll eisini hevði gløs við á ferðini, meðan aðrar royndir bert høvdu verið gjørdar við at brúka gløs.

Tá Guttesen heldur upp á, at einki „nýtt ella serliga snilt" var í háttinum, ið Nólsoyar-Páll flutti koppingarevni úr Danmark til Føroya uppá, við at vísa á, at tað ikki var nakað nýtt at koppseta „mann av manni" (Guttesen 2019, s. 157), so er neyðugt at gera vart við, 1) at koppingarevnið, sum Nólsoyar-Páll fekk frískt til Føroya í 1805, var nýggj bretsk uppfinning hjá Edward Jenner frá 1798, sum fyrstu ferð varð roynd í Danmark í 1801, og 2) at Guttesen her grundgevur við støði í eini einfaldari misskiljing. Tá koppingarevnið hjá Edward Jenner fyri fyrstu ferð kom úr London til Keypmannahavnar í 1801, so varð tað sent til Keypmannahavnar í gløsum, enntá fleiri ferðir, áðrenn tað eydnaðist læknanum Frederik Christian Winsløw at koppseta tað fyrsta barnið í Keypmannahavn (Callisen 1809, s. 60). Síðan koppsettu danskir læknar í Keypmannahavn sum í Onglandi „mann av manni," men koppingarevni varð eisini goymt í gløsum, tí tá ið hetta nýggja koppingarevnið eisini skuldi sendast úr kongsins Keypmannahavn til teir donsku og norsku landslutirnar ella kopingarøkini, m.a. til Bornholm, Slesvig, Langeland, Íslands, Grønlands ella Føroya, varð tað, eins og tá tað var komið úr Onglandi til Keypmannahavnar sent í gløsum (Callisen 1809, s. 57, 67, 71, 78, 89, 93-94, 102, 109, 115, 118, 124). Kom koppingarevni í gløsunum fram hagar í góðum standi, varð eisini í landslutum koppsett „mann av manni." Nólsoyar-Páll gjørdi hinvegin tað, at hann *flutti* koppingarevni „mann av manni" millum lond ella koppingarøki. Tá Guttesen samanber tað, ið gjørt varð í Keypmannahavn í 1801, tá koppsett varð „mann av manni," við tað at flyta koppingarevni millum lond ella koppingarøki, so blandar hann tvey ymisk fyribrigdi saman, t.e. at *koppsett* varð „mann

2 Her og seinni er teksturin endurgivin eftir Heinrich Callisen (1809), men frágreiðingarnar eru skrivaður í gerðabókina hjá koppingarnevndini. Gerðabókin er varðveitt á ríkisskjalasaninum, - Den Kgl. Vaccinationskommission Forhandlings- og korrespondanceprotokol 1801-1805 - men einans fyri árini 1801-1805 meðan Heinrich Callisen endurgevur til 1808.

av manni,“ ið var sjálvur kopsetingarhátturin, og at koppingarevni varð vanliga *flutt* millum lond, landslutir ella koppingarøki í *gløsum*. Hóast Guttesen leggur upp til tað, so hevur Jákup Jakobsen ongastaðni skrivað, at Nólsoyar-Páll „fann upp á“ at koppseta „mann av manni“ (Guttesen 2019, s. 157), men Nólsoyar-Páll fekk viðurkenning fyri at hava *flutt* frískt koppingarevni til Føroya við at koppseta „mann av manni,“ nakað, sum heldur ikki almenna danska koppingarnevndin hevði roynt at gera.

Upplýsingar hjá Jákupi Jakobsen, sum hann hevði frá danska blaðnum Dagen, at Nólsoyar-Páll á henda hátt, t.e. fólk av fólki, flutti koppingarevni „til Føroya á tann natúrliga og einfalda, men snilda hátt, sum eingin hevði hugsað um firr av teimum, sum roynt høvdu“ (Guttesen 2019, s. 157), sum Guttesen heldur seg gera upp við, standa v.ø.o. óskalaðar av hesum misskiljingum. Í veruleikanum standa upplýsingingarnar hjá Jákupi Jakobsen uppaftur sterkari av, at koppingarnevndin í árligu frágreiðingum sínum til kong, t.e. í keldutilfari frá samtíðini, sum hvørki Jakobsen ella Guttesen seinni hava gagnnýtt, váttar tað, ið Dagen skrivaði í 1806.

Dagen upplýsti, at koppingarevnið, ið Nólsoyar-Páll fekk frískt til Føroya í september 1805, varð alt fyri eitt brúkt til koppseting í Tórshavn og Nólsoy. Blaðið upplýsti eisini, at tað hevði eydnast Jákupi Nolsøe, bróður Nólsoyar-Páll, at varðveita koppingrevnið frískt, soleiðis at tað „[nu] forplantes“ (Dagen 31. oktober 1806), t.e. í oktober 1806, bæði í Suðuroynni og í Vágoynni. Hetta arbeiðið hjá Jákupi Nolsøe vátta m.a. Suðuroyar og Suðurstreymoyar kirkjubók eisini í ríkiligt mát. Kirkjubøkur vátta eisini, at fyrstu koppsetingarnar í flestu prestagjøldunum vóru í 1805. Sambært Elini Súsonnu Jacobsen vóru tey fyrstu koppsett í Suðuroy í 1805, men í 1820 upplýsti Johan Hendrik Schrøter, prestur í Suðuroy, at síðan 1813, tá aftur varð kopsett, hevði einki brúkiligt koppingarevni verið í Suðuroy (Jacobsen 2004, s. 196-197). Eisini er skjalfest í kirkjubókini fyri Norðoyggjar, at har kopsettu Nólsoyar-Páll og Marin Malena Nolsøe, kona hansara, longu í desember 1805 (Guttesen 2019, s. 168 – men Marin Malena var ikki bara við seinni, sum Guttesen vil

vera við, hon luttók í 1805), tá ið tær fyrstu koppsetingarnar vóru har, og Marin Malena tók síðan við og koppsetti tey flestu har til umleið 1815 (sí m.a. Jakobsen 2004, s. 198). Í Eysturoyar kirkjubók sæst eisini, at har var Marin Malena ein høvuðskoppsetari í oynni í nógv ár. Elin Súsanna Jakobsen ger eisini vart við, at í Sandoyar kirkjubók er ein viðmerking, sum skjalprógvar, at í Sandoynni var í 1813 enn koppsett við „den saakaldte Poul Nolsøes kopper" (Jacobsen 2004, s. 196). Tað kann útleggjast soleiðis, at koppingarevnið, sum Nólsoyar-Páll fekk til Føroya í 1805, hevði verið varðveitt frískt í Føroyum í øllum førum til 1813, t.e., at tað við einans fáum døgum ímillum er tikið úr koppsetingarsárinum hjá einum koppsettum og síðan brúkt til at koppseta ein annan persón við, og soleiðis hevði støðugt verið flutt „mann av manni" frá 1805 til 1813. Orðingin „den saakaldte" bendir eisini týðiliga á, at koppsetingarevnið hjá Nólsoyar-Pálli hevur verið væl kent í Føroyum. Tað tykist sostatt væl skjalfest, 1) at koppingarevnið hjá Nólsoyar-Pálli var tað fyrsta, sum varð brúkt í fleiri prestagjøldum, 2) at tað varð nógv brúkt kring allar Føroyar í árunum aftan á 1805, 3) at tað í øllum førum summastaðni í Føroyum, enntá sunnanfyri, framvegis varð brúkt til at koppseta við í 1813. Longu í 1806 vóru 500 føroyingar koppsettir og í árunum undan 1814 vórðu 1000 koppsett, so stórt arbeiði varð gjørt í 1805-1813 við koppseting, men tað merkir ikki, at eingi vórðu koppsett áðrenn 1805. Guttesen upplýsir, at Nólsoyar-Páll koppsetti í 1805, men ger minni við at vísa á, hvussu stórt arbeiði tey trý, Nólsoyar-Páll, Marin Malena og Jákup Nólsøe gjørdu fyri at breiða koppsetingina út í Føroyum. Hetta er annars væl skjalprógvað í samtíðarkeldunum, frágreiðingum frá koppingarnevndini og sambært seinni skrásetingum í kirkjubókunum.

Guttesen hevur tí onga grund til at sáa iva um, at Nólsoyar-Páll kom til Føroya við koppingarevni í 1805, men tað tykist hann gera (í øllum førum kann tað skiljast so), tá ið hann skrivar, at Nólsoyar-Páll „møguliga hevði vaccinu við tá" (Guttesen 2019, s. 169). Uppaftur verri verður, tá Guttesen við hesum setur gerðina hjá Nólsoyar-Pálli í sama ivasama bólk sum tær hjá Egholm, Hammershaimb, Leerbech

og Løbner, um hvørji fýra hann eisini heldur, at tað er „møguligt,“ at tey „hava ført koppavaccinu til Føroya.“ Keldukritiskt sæð er tað, at Nólsoyar-Páll kom til Føroya við frískum koppingarevni væl skjalprógvað í samtíðarkeldunum, meðan tað, at hini fýra skulu hava gjørt tað sama, ikki er skjalfest nakrastaðni. Hetta er bert ein tesa hjá Guttesen - uttan keldugrundarlag. Tað er ósakligt at bólka hypotetiskar og skjalprógvaðar gerðir í sama ivasama bólk.

Guttesen er tí eisini á rættiliga ivasamari grund, tá hann uttan nakra keldu leggur upp til, at best „møguliga tíðarlinjan kann vera,“ at Löbner var millum tey fyrstu, sum helst longu seint í 1801 fóru undir at koppseta í Føroyum (Guttesen 2019, s. 164). Einasta keldugrundarlag hansara er, at Løbner og Jomfru Hammershaimb 4. oktober 1801 komu við sama skipi úr Keypmannahavn á Havnina, og at Jomfru Hammershaimb sambært skansaprotokollini var „syg af kopper“ (Guttesen 2019, s. 162). Guttesen heldur kortini ikki, - og tað er m.a. her, at hann er á sera ivasamari grund - at Hammershaimb endiliga var „syg af kopper,“ men setur her fram møguligan, at hon einans var tann seinasta í eini røð av fólki umborð a skipinum, sum vóru koppsett fyri at halda koppingarevnið frískt á veg til Føroya. Og at tað „kann hugsast,“ at Løbner „skipaði fyri hesi flyting av koppavaccinu“ (Guttesen 2018, s. 14). Við øðrum orðum var Nólsoyar-Páll sambært Guttesen møguliga ikki tann fyrsti at flyta tað nýggja koppingarevnið til Føroya „mann av manni.“ Trupulleikin við hesum er einans, at keldugrundarlagið fyri at seta fram hesa alternativu tíðarlinjuna – hypotesuna - rætt og slætt ikki er til.

Í fyrsta lagi áttu fleiri umborð at verið „syg af kopper,“ um Jomfru Hammershaimb bert var seinast í eini røð av koppsettum á ferðini til Føroya. Meira viðkomandi er, at hóast onkur av teimum, sum vórðu koppsett við neytakoppum, kundu kenna seg sjúk og einkult fingu fepur (Callisen 1809, s. 73, 80, 106), so hevði tað verið eitt sindur misvísandi at upplýst um ein persón, sum var koppsettur við neytakoppum, at hesin var „syg af kopper“ - ikki minst, tá ið hugsað verður um, at neytakoppar var nýggjur koppingarháttur, sum átti at fingið serliga umrøðu. Heldur ikki kundi koppingarevni sambært nýggja kopp-

ingarháttinum fáast úr fólki, ið vóru vorðin „syg af kopper," men koppingarevni kundi einar 8-10 dagar eftir, at ein persónur varð vorðin koppsettur við neytakoppum, takast úr sárinum frá koppsetingini á arminum. Harafturat kemur sum nevnt, at danska blaðið Dagen upplýsti í 1806, og tað verður stuðlað av donsku koppingarnevndini, at Lund, Løbner og Egholm nakað áðrenn Nólsoyar-Páll uttan hepni høvdu roynt at flutt koppingarevni til Føroya í gløsum, men tað verður ongastaðni upplýst nakað um, at nakar skuldi havt roynt á líknandi hátt sum Nólsoyar-Páll gjørdi í 1805. Tvørturímóti. Tað er tó, sum Guttesen ger vart við, møguligt, at Dagen hevði fingið onkrar av upplýsingunum frá Nólsoyar-Pálli (Guttesen 2019, s. 164-167), men keldukritiskt sæð eiga granskarar altíð at brúka upplýsingar, serliga í dagbløðunum, við einum ávísum fyrivarni. Tað kann tí ikki einans við støði í hesum upplýsingum í Dagen útihúsast, at koppingarevni varð fingið av frk. Hammershaimb, sum var „syg af kopper," og at onkur kann hava koppsett við tí, men um so var hevur tað verið við støði í tí eldra vandamikla koppingarháttinum, har vágur varð fluttur frá smittaðum/sjúkum yvir á frísk, og sum kundi gera koppsett „syg af kopper." Høvundurin leggur tó onga ábending í nakrari keldu fram um, at Løbner koppsetti nakran. Meira avgerandi er, at upplýsingar í Dagen, at koppingarevni undan 1805 bert varð flutt í gløsum, samsvara við meira álítandi upplýsingar í samtíðarfrágreiðingunum frá almennu donsku koppingarmyndugleikunum, t.e. at eingin áðrenn Nólsoyar-Páll í 1805 flutti koppingarevni til Føroya við at koppseta „mann av manni."

Í øðrum lagi er eingin saklig grund til at halda nakað annað enn, at skansamanningin í Havn 4. oktober 1801 helt, at Jomfru Hammershaimb veruliga var „syg af kopper." Og hví skuldi skansavaktin havt skrásett nakað annað enn tað, sum hon meinti? Harumframt má tað hava fyrikomið teimum rættiliga sannlíkt, at Jomfru Hammershaimb varð smittað av pokunum í Danmark, tí í Keypmannahavn herjaðu pokurnar í 1801, og tær kravdu bara í Keypmannahavn 486 mannalív, sum var størsta deyðstalið av pokum í Keypmannahavn síðan almennur koppingarstovnur varð settur á stovn í Keypmannahavn í 1769 (Wendt

1836, s. 3-4). Tí tykist tað eisini rættiliga sannlíkt, at manningin á skipinum, skansamanningin og myndugleikarnir fylgdu væl við og viðmerktu í skansaprotokollina, at Jomfru Hammershaimb var „syg af kopper," soleiðis at øll neyðug fyrilit kundu takast í Føroyum. Í øllum førum hevði tað í hesum vandamikla samanhangi verið rættiliga misvísandi at skrivað í skansaprotokollina, at Jomfru Hammershaimb var „syg af kopper," um hon einans var koppsett.

Í triðja lagi verður hetta beinleiðis avsannað av ongum minni enn sjálvum Løbner, sum 4. november 1801 skrivaði til rentukamarið um somu ferðina úr Keypmannahavn til Havnar, hagar skipið kom 4. oktober 1801. Løbner tók soleiðis til í nevnda skrivinum til rentukamarið: „Et ubehageligt Tilfælde mødte paa rejsen, som med mindre Forsigtighed kunde have havt betydelige følger; en Datter af forrige forvalter Hammershaimb var med som Passager paa Skibet og en 14 Dage efter vi vare kommen i Søen fik hun Børnekopper. Den rædsomme Ødelæggelse denne Sygdom før har viist her i Landet give Inddbyggerne en billig Frygt for alt som kunde have Tanke[3] til Smitte, de fleeste som havde været paa Skibet, maatte derfor næsten en 14 dage undvære all Omgang med Indvaanerne, hun blev bragt til Arge Hospital, og med gode Foranstaltninger haaber man de farlige følger er hævede, da endnu efter 4 Ugers Forløb ingen Spor til Smitte har yttrett Sig." (Rentekammeret). Sambært upplýsingunum í brævinum hjá Løbner ber til at staðfesta, at nevnda Jomfru Hammershaimb má hava verið 22 ára gamla dóttir Samuel Hammershaimb og Anne Sophie Lund, Elisabeth Mariane Hammershaimb (Nielsen 1876, s. 14-15). Tað avgerandi í hesum høpi er hinvegin, at hetta skrivið hjá Løbner afturvísir hypotesuna hjá Guttesen: Jomfru Hammershaimb varð blivin smittað - ikki koppsett við neytakoppum - av „Børnekopper," t.e. teimum vandamiklu pokunum, í Keypmannahavn í 1801 og bleiv sjúk av pokunum á ferðini heim til Føroya. Hetta hevði einki at gera við nakra ætlan hjá Løbner ella nøkrum øðrum um at flyta frískt koppingarevni „mann av manni" til Føroya, og heldur ikki tykist Løbner yvirhøvur hava hugsað um koppseting, heldur ikki

3 Hetta orðið er trupult at lesa.

um í støðuni at brúka gamla koppingarháttin. Løbner nevnir einki í brævinum til rentukamarið um koppseting, einans at á ferðini heim hevði verið talan um eitt „ubehageligt Tilfælde“ av „Børnekopper,“ sum um skeivt varð atborið við hesum kundi havt við sær „betydelige Følger.“ Niðurstøðan má vera, at hvørki Løbner ella nøkur onnur á hesum túrinum í 1801 flutti frískt koppingarevnið til Føroya „mann av manni“ við at koppseta Jomfru Hammershaimb og onnur ferðandi umborð á skipinum.

Tað var heldur ikki fyrr enn 6. juli 1801, at tað eftir fleiri miseydnaðar danskar royndir at fáa koppingarevni úr Onglandi í glasi fyri fyrstu ferð eydnaðist donskum læknum, fyrst Frederik Christian Winsløw, at koppseta donsk børn við tí nýggja og slóðbrótandi koppingarháttinum hjá tí enska læknanum Edvard Jenner frá 1798 (Callisen 1809, s. 60), so tað hevði eisini verið undranarvert, um Løbner ella onnur longu sama árið høvdu megnað at fingið nýggja koppingarevnið til Føroya og fóru undir at koppseta við nýggju koppingartøknini. Hartil kemur, at meðan fyrstu royndirnar í Danmark vórðu gjørdar á privatum grundarlagi, varð almenna koppsetingin í Danmark ikki sett í verk fyrr enn 2. februar 1802, tá tann árið fyri stovnaða almenna danska koppingarnevndin hevði gjørt neyðugar fyrireikingar og vegleiðingar. Trupulleikarnir úti um landið við at koppseta á rættan hátt vóru kortini framvegis so mikið stórir, at nevndin 10. apríl 1802 gjørdi eina nýggja vegleiðing, sum varð prentað og send út um landið (Callisen 1809, s. 70). Meira avgerandi er, at almenna danska koppingarnevndin, sum varð sett á stovn 14. oktober 1801, og m.a. varð mannað við fólki, ið høvdu luttikið í teimum fyrstu royndunum at koppseta í Keypmannahavn,[4] í fyrstu frágreiðing síni til kong - fyrsta frágreiðingin um tær privatu royndirnar í 1801 varð tó send til dansk kanselli longu 5. desember í 1801 - fyri alt árið 1802 upplýsti, at tað nýggja koppingarevnið varð sent (í gløsum) til stórt sæð allar partar av dansk-norska ríkinum, „Færøerne, allene undtagen, hvorhen Materien ogsaa skal blive sendt, saasnart Farten

4 Ein av teimum var sjálvur Frederik Christian Winsløw, ið stóð fyri teimum fyrstu koppsetingunum í Keypmannahavn.

til Foraaret begynder“ (Callisen 1809, s. 72 – eisini 77). T.v.s. at einki koppingarevni varð sent úr Danmark til Føroya fyrr enn í 1803, meðan koppingarnevndin í frágreiðingini til kong fyri árið 1806 upplýsti, at tað ikki eydnaðist at gera tað nýggja koppsetingarevnið „virksom“ í Føroyum fyrr enn við Nólsoyar-Pálli í 1805. Um nakar varð koppsettur í Føroyum áðrenn 1803, so má tað sambært hesum antin 1) hava verið við støði í gamla koppingarháttinum, sum ongantíð fekk serliga stóra útbreiðslu, tá hann var vandamikil og kundi hava sjúku, ja enntá deyða, við sær (Callisen 1809, s. 56), tí nýggja koppingarevnið varð ikki sent úr Danmark til Føroya fyrr enn í 1803, ella eisini 2) hevði onkur onkursvegna fingið hendur á nýggja koppingarevninum og fingið tað til Føroya, áðrenn koppingarnevndin fór til verka 14. oktober 1801, uttan at koppingarnevndin í sínum rannsóknum av fyrstu koppsetingunum fekk nakran kunnleika til tað. Tann fyrri møguleikin er kanska ikki heilt ósanlíkur, tá ein miseydnað roynd at flyta gamla koppingarevnið, sum heldur ikki varð forboðið at brúka beinanvegin, tá ið tann nýggja og vandaleysa koppsetingin gjørdist eitt alment tilboð í Danmark,[5] til Íslands í glasi varð gjørd so seint sum í 1798 (Callisen 1809, s. 57). Tann seinni møguleikin er ósannlíkur, tí 1) privatu royndirnar í 1801 høvdu ongan institutionellan stuðul, 2) koppingarnevndin – í øllum førum summir limir, m.a. formaðurin Heinrich Callisen - var í byrjanini ivasom móti tí nýggju koppsetingini, 3) Løbner hevði valla koppingarevni við til Føroya 4. oktober 1801, soleiðis sum Guttesen leggur upp til, 4) hóast nevndin hevði samlað tilfar um allar koppsetingar síðan 6. juli 1801, upplýsti nevndin, at einki koppingarevni varð sent til Føroya fyrr enn í 1803 og 5) nevndin upplýsti, at hesar royndir hepnaðust ikki fyrr enn seint í 1805.

Sæð í føroyskum høpi er Løbner-hypotesan enn ivasamari, tí kelduprógvini fyri, at Nólsoyar-Páll og onnur koppsettu, eru eisini at finna í kirkjubókunum, har prestarnir nógv ár seinni eftir vísta koppsetingarváttan frá teimum, sum skuldu konfirmerast ella ynsktu at giftast, skuldu vátta, at tey vóru koppsett. Um Løbner o.o. koppsettu longu í 1801, so átti váttan við øðrum orðum at verið fyri hesum í

5 Gamla vandamikla koppsetingin, inoculatión, varð forboðin í kongaríkinum í 1810. Nørskov-Lauritsen 2007, s. 266.

føroysku kirkjubókunum, men hóast Guttesen hevur leitað í føroyskum kirkjubókum, har hann í Norðurstreymoy og Eysturoy hevur funnið fýra dømi um koppsetingar í 1802-1805, hevur hann ikki funnið dømir um, at Løbner koppsetti í 1802-1805 (Guttesen 2019, s. 160-162). Í Eysturoyar kirkjubók hevur hann harafturímóti funnið dømi um, at Egholm, sum Dagen nevnir millum tey, sum undan Nólsoyar-Pálli høvdu staðið fyri miseydnaðum royndum at flyta koppingarevni til Føroya, hevði koppsett eitt barn úr Hvalvík 11. mai 1805 (Guttesen 2019, s. 161). Hetta er kortini ikki haldgott prógv fyri, at tað eydnaðist Egholm at varðveita koppingarevnið frískt í longri tíð. Dagen upplýsti í øllum førum umleið hálvt annað ár seinni, t.e. 31. oktober 1806, at m.a. hansara roynd miseydnaðist. Tað sama kann lesast úr frágreiðingini frá donskum koppingarmyndugleikum fyri 1806 frá 13. apríl 1807. Her skal viðmerkjast, at í Eysturoyar kirkjubók er Egholm eisini skrásettur at hava koppsett ein persón 28. apríl 1806, men so sæst hann ikki hava koppsett aftur í Eysturoynni, so tað er heldur ikki í stríð við upplýsingar í Dagen frá 31. oktober 1806. Guttesen upplýsir annars, at Egholm fór til Danmarkar 15. mai 1805 og kom ikki aftur til Føroya fyrr enn 9. august 1805 (Guttesen 2019, s. 160), so tað kann illa hava verið á tí túrinum, at hann hevði tað koppingarevnið við til Føroya, sum hann kopsetti við 11. mai 1805. Heldur ikki kann hann hava brúkt koppingarevni, sum Mørch forvaltari kom við, tí sambært Guttesen kom Mørch ikki til Føroya fyrr enn 22. juni 1805 (Guttesen 2019, s. 160). Tað hongur tí ikki rættiliga saman, tá Guttesen brúkar hesar upplýsingar sum grundgeving fyri, at Egholm sjálvur hevði flutt tað koppingarevnið til Føroya, sum hann kopsetti við 11. mai 1805 (Guttesen 2019, s. 169).[6] Í 1805 vórðu hinvegin sambært frágreiðingini frá koppingarnevndini einans 4 gløs við koppingarevni send til Føroya, - nøkur av hesum gløsunum, um ikki øll, má Nólsoyar-Páll sambært koppingarnevndini hava havt við sær til Føroya - meðan 16 gløs vórðu send í 1806 (Callisen 1809, s. 102 og

6 Guttesen nevnir í hesum sambandi eisini Hans Leerbech, sum kom til Føroya 25. august 1800 (Guttesen 2019, s. 161), men tann dagfestingin er ov tíðliga til at vera viðkomandi í sambandi við at hava flutt nýggja koppingarevnið til Føroya.

109), sum er tað árið, sum Dagen upplýsti, at Mørch kom til Føroya við 14 gløsum av koppingarevni. Eingi gløs við koppingarevni vórðu sambært koppingarnevndini send til Føroya í 1804 (Callisen 1809, s. 89), so Egholm má um so er hava brúkt koppingarevni, sum kom til Føroya í 1803, tá 12 gløs vórðu send til Føroya (Callisen 1809, s. 78). Sambært hesum bendir nógv á, at koppingarevni fyri fyrstu ferð kom til Føroya í 1803, tá 12 gløs komu, og so kom einki aftur fyrr enn við Nólsoyar-Pálli í 1805. Men tað er eisini møguligt, at Mørch 22. juni 1805 hevur havt nøkur av teimum 4 gløsunum, sum komu til Føroya í 1805, við, meðan Nólsoyar-Páll hevur havt ein part av teimum við til Føroya 2. september 1805.

Tað kann ikki útihýsast, at feilir kunnu vera komnir í kirkjubókina, tá ið prestarnir fleiri ár seinni hava sett upplýsingarnar inn í sambandi við, at børnini skuldu konfirmerast. Í hesum sambandi er vert at leggja merki til, at tær árligu frágreiðingarnar frá donsku koppingarnevndini goyma eldri upplýsingar enn kirkjubøkurnar, sum í hesum sambandi heldur ikki eru fyrstahondskeldur – tær fyrstu koppsetingarnar í 1802-1805 eru ikki skrásettar í kirkjubókum fyrr enn í fyrsta lagi í 1816. Til samanberingar høvdu koppsetarar - eisini í Føroyum - síðan 1802 havt skyldu at senda koppingarnevndini listar við øllum teimum, sum teir høvdu koppset, og upplýsa nevndina um øll úrslit teirra av royndum við at koppseta (Guttesen 2019, s. 163), meðan prestarnir ikki fingu álagt at seta upplýsingar um koppseting í kirkjubókina fyrr enn 19. november 1811, tá tað gjørdist treyt fyri konfirmatión. Frá tá av skuldu eingi, sum ikki vóru koppsett, konfirmerast (Ulsøe 1994, s. 225), og tær fyrstu skrásetingarnar í kirkjubókunum eru sum nevnt í 1816. P.L. Panum helt, at henda skipan saman við lokalum eftirliti í Føroyum, har ótti og mótstøða eisini var ímóti koppsetingini (Jakobsen 2004, s. 204-205), hevði við sær, at lokal eftirlitsfólk „for at tjene sin nabo eller landsmand, undertiden er i stand til at sige en lille usandhed, eftersom indbyggerne meget ofte er bange for at lade deres børn vaccinere, da de frygte indpodning af fremmede sygdomme o.desl., så indses det let, hvad man kan vente sig af en sådan kontrol …."
(eftir Jacobsen 2004, s. 201). Harumframt ivaðist koppingarnevndin

eisini í, hvussu eftirfarandi tær fyrstu skrásetingarnar av koppsetingunum vóru. Í 1805 tók kongur undir við einum tilmæli frá 1804 frá nevndini um, at embætisfólk 8-10 dagar eftir koppseting skuldu kanna og vátta, at hon var í lagi (Callisen 1809, s. 98, 101). Orsøkin var, at hóast tað ikki bar til at síggja, um ein koppseting var væleydnað fyrr enn 8-10 dagar eftir koppsetingina, hevði tað frammanundan ikki verið nøkur mannagongd, sum staðfesti, at ein skrásett koppseting var væleydnað. Í einum av fýra dømum í kirkjubókunum um koppsetingar í 1802-1805, sum Guttesen hevur funnið, er heldur eingin onnur dagfesting enn „1805," so tað ber ikki til at vita, um sipað verður til koppseting, áðrenn Nólsoyar-Páll 2. september í 1805 kom til Føroya við koppingarevni at koppseta við. Triðja dømi er frá Sjógv í 1804, meðan fjórða dømi um koppseting áðrenn 2. september 1805, sum Guttesen hevur funnið í kirkjubókum, rættiliga illa fæst at samsvara við upplýsingar frá almennu koppingarnevndini, tí hendan kopsetingin av einum nýføðingi av Skælingi er skrásett at vera gjørd í 1802. Her kann leggjast afturat, at danin Hans Erichsen Leerbech, sum sambært skrásetingini í Norðstreymoyar kirkjubók frá 1817 skuldi havt koppsett nevnda skælingsbarnið longu í 1802, var prestur í Norðstreymoy í 1800-1807 (Guttesen 2019, s. 161), tá hann fór aftur til Danmarkar (Nielsen 1879, s. 27-30), so hann hevur valla sjálvur sett skrásetingina inn í kirkjubókina. Tað hevur óivað verið Niels Lassen Holm, sum var prestur í Norðstreymoy í 1807-1839 (Nielsen 1879, s. 27-30), sum hevur skrásett koppsetingina í kirkjubókina í 1817. Tað er v.ø.o. í ávísum førum ósamsvar millum samtíðarupplýsingar hjá almennu donsku koppingarnevndini og seinni føroyskar skrásetingar í kirkjubókunum, men tað er trupult at taka dagar ímillum upplýsingarrnar. Her skal viðmerkjast, at koppingarnevndin í sambandi við umrøðuna av Nólsoyar-Pálli og Jákupi Nolsøe við Leerbech sum keldu í 1806 eisini nevndi, „at nogle Bønder i Nordstrømøe Præstegjeld have udøvet Vaccinationen med Held" (Callisen 1809, s. 113). Einki verður nevnt um, at Leerbech sjálvur skuldi havt koppsett ella nær nevndu bøndur skuldu havt koppsett, men tað kann sambært koppingarnevndini í fyrsta lagi hava verið í 1803, sambært kontekstinum helst ikki fyrr enn í 1805. Hvørki Olsen

(sorenskrivari), Begtrup (varapróstur, Havn) ella Haaber (sóknarprestur í Vágunum), sum eisini skrivaðu til nevndina, nevna tó nakað um, at onnur enn Nólsoyar-Páll og Jákup Nolsøe høvdu kopsett.

Um Niels Lassen Holm onga almenna koppingarváttan hevur fingið frá viðkomandi í 1817, sum heldur ikki er møguligt so tíðliga í koppingartíðini, er hinvegin ikki vist, at alt, t.d. árið, eftir so nógv ár – 15 – er skrásett rætt. Almennu koppingarváttanirnar, sum ikki vórðu latnar fyrr enn góðkendur myndugleiki 8-10 dagar eftir koppsetingina kundi staðfesta, at hon var í lagi, komu ikki fyrr enn aftaná 1804 (Callisen 1809, s. 98 og 101).

Tað er eingin ítøkilig ábending í nøkrum keldum um, at skrásetingarnar í kirkjubókunum ikki eru eftirfarandi ella rættar, men hinvegin er tað ein sannroynd, 1) at ávís mótstøða var í Føroyum eins og aðrastaðni ímóti koppsetingini, 2) at sambært kirkjubókunum vóru tað onkuntíð ólærd, sum stóðu fyri koppsetingunum, 3) at almenna danska koppingarnevndin í frágreiðingini til kong fyri 1804 ikki helt, at fakliga eftirlitið við teimum fyrstu koppsetingunum var nøktandi, 4) at spurningar seinni vóru settar við gegnið hjá lokalum bóndum at hava eftirlit við koppsetingunum í Føroyum, 5) at onkur av teimum fyrstu koppsetingunum í Føroyum, sum eru skrásettar í kirkjubókunum, ikki fáast at samsvara við upplýsingar í árligu frágreiðingunum í 1801-1808 frá koppinagarnevndini, og 6) at koppsetingar í Føroyum ikki eru skrásettar í kirkjubókunum fyrr enn í 1816.

Samanumtikið hevur Guttesen funnið skrásetingar í kirkjubókunum frá 1816 av trimum[7] koppsetingum í Føroyum áðrenn 2. september 1805, tá Nólsoyar-Páll kom við frískum koppingarevni, men sambært nógv eldri samtíðarupplýsingum hjá donsku koppingarnevndini frá 1806 kann tó eingin hava gjørt koppingarevnið „virksom." Hetta verður eisini staðfest av koppingarnevndini, tá hon í sambandi við, at Nólsoyar-Páll kom við frískum koppingarevni í

7 Síggja vit burtur frá koppsetingini í 1805, sum ikki er dagfest, hevur Guttesen bert funnið trý dømi í kirkjubókunum um koppsetingar í Føroyum, áðrenn Nólsoyar-Páll kom til Føroya við frískum koppingarevni í september í 1805, men hann sipar eisini til koppseting hjá Pól á Látrinum 25. mars 1805. Hesa upplýsing hevur Guttesen úr bandupptøku av fyrilestri hjá John Davidsen í 1984, men hann hevur ikki funnið upplýsingina í kirkjubókini (Guttesen 2019, s. 161-162).

september 1805, leggur afturat, „saaledes, at den nu kan ventes der vedligeholdt“ – „nu.“ Tað sigur seg eisini sjálvt, um tær einans vóru nakrar heilt fáar í tali. Heldur ikki er Løbner í hesum høpinum nevndur í nøkrum viðkomandi samtíðarkeldum. Og kanska áttu vit eisini at kunnað gingið út frá, at ein embætismaður í hansara flokki hevði tílíkar skrásetingar í lagi – eins og t.d. hin føroyski bóndin Egholm hevði sambært Eysturoyar kirkjubók. Ikki minst tá ið samtíðarkeldurnar upplýsa, at embætisfólk í Føroyum eins og aðrastaðni í ríkinum í brævi dagfest longu 16. januar 1802 vórðu biðin um at „anbefale“ koppseting og „pålægge alle Lægerne“ (koppsetarar) at „tilstille ommeldte Commission“ - koppingarnevndini - „saavel Lister over de af dem Vaccinerede, som resultatet af deres Erfaringer i denne Henseende“ (Guttesen 2019, s. 163-164).[8] Kortini var tað einasta, sum almenna danska koppingarnevndin í sínum árligu frágreiðingum til kong hevði at upplýsa úr Føroyum, at gløs við koppingarevni fleiri ferðir síðan 1803 vórðu send til Føroya, meðan sjálv koppsetingin í Føroyum kortini ikki gjørdist „virksom“ fyrr enn við m.a. Nólsoyar-Pálli í 1805. Útlitini fyri, at nakrar heilt fáar koppsetingar í Eysturoy og Norðstreymoy í tíðarskeiðinum 1802-1805 kunnu hava varðveitt koppingarevnið frískt tykjast heldur ikki serliga sannlík, og eiheldur

8 Guttesen setur her fram tað git, at grundin til, at hesi boðini vórðu send til Føroya var, at myndugleikarnir í Danmark longu í november 1801 vóru kunnaðir um eina væleydnaða koppseting í Føroyum, men tað er einki grundarlag fyri hesum í sjálvum sær rættiliga ósannlíka giti. Tvørturímóti sæst týðiliga av frágreiðingini hjá donsku koppingarnevndini til kong frá 5. desember 1801, at grundin var eitt alment tilmæli frá koppingarnevndini til kong, sum skuldi galda fyri alt kongaríkið, um, at „[a]lle Læger her i Staden som i Provindserne, der have foretaget eller iværksætte Vaccinationen, maatte paalægges hver 3die Maaned at tilstille Commissionen saavel Lister over de Vaccinerede, som Resultatet af deres Erfaringer i denne Henseende.“ (Callisen 1809, s. 67). Samanfall í tíð og orðingum letur lítlan iva vera um, at hetta man vera upprunin til nevndu boð frá 16. januar 1802 til m.a. teir føroysku myndugleikarnar. Hetta hevði einki at gera við nakra koppseting í Føroyum longu í 1801, sum gitið hjá Guttesen leggur upp til, men talan var um boð til allar partar av danska ríkinum í sambandi við, at tann nýggja koppsetingin eisini skuldi viðmælast allastaðni í kongaríkinum. Koppingarnevndin visti sum nevnt heldur einki um, at nakað koppingarevni varð sent til Føroya fyrr enn í 1803, og tí kundi nevndin sjálvandi heldur ikki havt virkað við støði í kunning úr Føroyum um eina væleydnaða koppseting har longu í 1801. Heldur ikki hevur nakar funnið koppseting í Føroyum frá 1801 skrásetta í kirkjubókunum. Hetta er eitt frítt íspunnið git, ið Guttesen setur fram. Hypotesan hevur einki grundarlag í nøkrum keldum og er eins og uppskotið, „[b]est møguliga tíðarlijnan“ í sambandi við fyrstu føroysku koppsetingarnar, (Guttesen 2019, s. 164) falsifiserað.

vita vit, um talan í øllum trimum førum hevur verið um koppseting við teimum „nýggju“ neytakoppunum. Eiheldur tykist nakar í samtíðini hava lagt merki til ella viðurkent nakað slóðbrótandi pionerarbeiði, sum Løbner sambært Guttesen - uttan at hann tykist umhugsað, at Lund løgmaður helst er eitt fult so gott ella kanska uppaftur betri git enn Løbner - mest sannlíkt kann hava útint í hesum sambandi, meðan Nólsoyar-Páll - saman við bróður sínum Jákupi Nolsøe - við støði í tilmæli hjá koppingarnevndini frá 13. apríl í 1807, ið bygdi á upplýsingar frá sorenskrivaranum um 5-600 koppsetingar í 1806 (Callisen 1809, s. 114), við kongaligari fyriskipan 24. juli 1807 fekk „en Belønning af 100 Rdl for sin udviste Iver i at udbrede Vaccinationen paa Færøerne“ (her eftir Guttesen 2019, s. 157).

Ein grund til, at Løbner ikki fekk sama heiður sum Nólsoyar-Páll kann vera, at embætisfólk sum m.a. Løbner høvdu skyldu til at fremja almenn samfelagsmál í Føroyum, meðan Nólsoyar-Páll, sum uttan nakra skyldu og við sínum egna skipi og manning átók sær at fremja heilsuviðurskifti hjá føroyingum, áttu rós uppiborið frá myndugleikunum fyri sjálvboðið arbeiði – enntá gjørt „paa egen Bekostning,“ sum koppingarnevndin tók til. Tað er tó ikki nóg mikið til at greiða frá, at Løbner als ikki er nevndur í viðkomandi keldutilfari. Óheppið er tað, at Guttesen sær burtur frá hesum samanhanginum, t.e. tí, sum embætisfólk høvdu skyldu til at taka sær av, og tí, sum privatfólk gjørdu av samfelagssinni, tá ið hann leggur upp til, at embætismaðurin Løbner átti æruna av at hava verið fyrstur við koppingarevninum til Føroya og eisini millum tey fyrstu at koppseta. Ein embætismaður, sum í hesum sambandi ongantíð er nevndur í nøkrum viðkomandi keldum, heldur ikki av donsku koppingarnevndini, sum tíðum rósti navngivnum fólki. Harumframt yvirsær Guttesen, ja, hann tykist beinleiðis niðurgera tað stóra arbeiðið, sum Jákup Nolsøe framdi í hesum sambandi (Guttesen 2019, s. 166).

Tað er ósakligt, tí uttan mun til, hvør var fyrstur við koppsetingini, er tað greitt, at Nólsoyar-Páll, Marin Malena og Jákup Nolsøe gjørdu stórt arbeiði fyri at fáa koppsetingina til Føroya og síðan fyri at fáa hana breidda út í Føroyum. Í teimum árligu frágreið-

ingunum hjá koppingarnevndini frá 1801 til 1808 eru tað bert Esbensen, ein keypmaður í Keypmannahavn, sum hevði fingið nýggju koppsetingina til Eysturfinnmørkina, Nólsoyar-Páll og Jákup Nolsøe, sum fáa tann heiður, at kongur verður biðin um at geva teimum eina serliga viðurkenning. Neyvan man arbeiðið hjá teimum trimum standa aftan fyri tað arbeiðið, sum Løbner gjørdi hesum viðvíkjandi, tvørturímóti - í øllum førum um vit halda okkum til tær viðkomandi samtíðarkeldurnar - og tað hoyrir eisini við til hesa søguna, at Nólsoyar-Páll og Marin Malena gjørdu tað av samfelagssinni. Tað mundi vera ein grund til, at tey fingu viðurkenning fyri tað stóra og fyri føroyingar so avgerðandi arbeiðið. Koppingarnevndin vísti í hesum sambandi á, at pokurnar ikki høvdu gingið í Føroyum síðan 1725, og at tær tí kundu gjørt ómetaliga stóran skaða, um so var, at tær raktu Føroyar, uttan at føroyingar vóru koppsettir.

Niðurstøðan er, at sambært keldunum fekk Nólsoyar-Páll frískt koppingarevni til Føroya og útinti saman við Marini Malenu og Jákupi Nolsøe stórt verk fyri at fáa tað breitt út í Føroyum í árunum eftir 1805. Í fleiri av prestadømunum var fyrsta koppsetingin eftir øllum at døma gjørd við koppingarevninum, sum Nólsoyar-Páll fekk frískt til Føroya í 1805, og tað varð í øllum førum summastaðni framvegis brúkt í 1813. Onnur høvdu helst, eins og Dagen, sum skrivaði um væleydnaðu royndirnar hjá Nólsoyar-Pálli og Jákupi Nolsøe, upplýsti í 1806, roynt nøkur fá ár frammanundan at fingið koppingarevni frá Vaccinations Anstalten flutt til Føroya í gløsum, og eitt barn var sambært seinni skráseting í Norðstreymoyar kirkjubók í 1817 koppsett í 1802, men tað er ivasamt, hvussu koppsett varð, ella hvussu hesar royndir hilnaðust. Einans trý-fýra skrásett dømi um koppsetingar í Føroyum eru funnin í kirkjubókunum áðrenn september 1805, tá ið Nólsoyar-Páll fyrstur kom til Føroya við frískum koppingarevni, t.e. livandi í fólki, meðan einki í keldutilfarinum bendir á, at Løbner skuldi havt koppsett nakran í Føroyum áðrenn Nólsoyar-Páll kom til Føroya við koppingarevninum. Eg havi leitað í kirkjubókunum og funnið einstøk dømi um, at Løbner hevur kopsett, men tey eru fleiri ár eftir 1805.

Tað tykist eisini rættiliga ósannlíkt, 1) at koppingarnevndin hvørki *visti* ella hevði *frætt* nakað um, at Løbner longu í 1801 hevði flutt frískt koppingarevni til Føroya á sama hátt sum Nólsoyar-Páll í 1805, og var farin at koppseta, ella 2) at koppingarnevndin, um hon visti ella hevði frætt um tað, sum Løbner skuldi havt gjørt í 1801, *einki* skrivaði um hansara gerðir í sínum frágreiðingum, ikki minst tá ið vit vita, hvussu serstakan hon í frágreiðing síni fyri 1806 helt tann háttin vera, sum Nólsoyar-Páll flutti frískt koppingarevni til Føroya uppá í 1805. Hóast hesar ´hypotetisku` gerðir hjá Løbner áttu at havt sett spor eftir sær í onkrum sera viðkomandi samtíðarkeldum, serliga í frágreiðingunum frá almennu donsku koppingarnevndini og í kirkjubókunum, so er einasta grundarlagið hjá Guttesen fyri tesuni, at Jomfru Hammershaimb, ið ferðaðist úr Keypmannahavn, har pokurnar herjaðu, til Havnar við sama skipi sum Løbner, sambært viðmerking á ferðafólkayvirlitinum í skansaprotokollini 4. oktober 1801 var „syg af kopper." Keldugrundarlagið er við øðrum orðum ikki til, og orsøkin til, at Jomfru Hammershaimb var „syg af kopper," var sambært keldum og konteksti heilt náturligar barnapokur. Tað er altíð gott at gera upp við søguligar mytur, men tað er minni gott at seta nýggjar í staðin.

Í Norðoyggjum, Vágunum, Suðurstreymi, Sandoynni og Suðuroynni eru eingi dømi funnin í kirkjubókunum um koppsetingar, áðrenn Nólsoyar-Páll kom til Føroya við koppingarevni, meðan tvey dømi eru úr Eysturoy og eitt úr í Norðstreymoy, dømi um koppsetingar, sum eru skrásettar at hava verið gjørdar í 1802, 1804 og í 1805, men sambært donsku koppingarnevndini eydnaðust royndirnar ikki fyrr enn við Nólsoyar-Pálli í 1805.

At Nólsoyar-Páll, Marin Malena og Jákup Nolsøe, ið er nevndur í kongaligu fyriskipanini og fekk 50 ríkisdálar fyri sín part í arbeiðinum, fyrst og fremst hava fingið viðurkenning fyri sítt ídni at breiða út koppsetingina í Føroyum, er skjalfest í viðurkenningini, og tað samsvarar eisini við tað, sum varð upplýst í Dagen í 1806. Tað sama verður váttað í teimum viðkomandi keldunum, m.a. í kirkjubókunum, men enn meira avgerandi eisini í samtíðarfrágreiðingum frá koppingarnevndini, sum hava eldri upplýsingar enn kirkjubøkurnar.

Hesar keldur skjalprógva eisini, at arbeiðið, sum Nólsoyar-Páll og manningin á Royndini Fríðu løgdu lunnar undir í 1805, tá ið teir í september komu til Føroya við fráskum koppingarevni, varð ført víðari av øðrum fólki og fekk stóran týdning fyri útbreiðsluna av koppsetingini millum føroyingar kring oyggjarnar. Við tilsiping til tað týðandi og slóðbrótandi arbeiðið hjá Nólsoyar-Pálli metti danska koppingarnevndin í frágreiðingini fyri 1806, við støði í tølum frá sorenskrivaranum frá 29. september 1806, at 5-600 føroyingar vóru koppsettir. Um Nólsoyar-Páll var fyrstur við koppingarevni ella fyrstur at fáa evnið „virksom" í Føroyum broytir lítið upp á avrik hansara.

Tann hevdvunna frásøgnin um, at Nólsoyar-Páll varð fyrstur at fáa fráskt kopingarevni til Føroya, stendur - í øllum førum um vit skilja „friskt" sum „virksom" - enn stórt sæð órørd, meðan týdningurin av tí, sum serliga Nólsoyar-Páll gjørdi fyri koppseting í Føroyum, er vorðin uppaftur størri av tí, sum kopingarnevndin upplýsti í frágreiðingum sínum til kong. Hesar frágreiðingar eru ikki brúktar av Jakobsen og heldur ikki av Guttesen.

Sakligt kann tað hinvegin ikki sigast vera at geva Løbner heiðurin fyri nakað, sum hann sambært viðkomandi samtíðarkeldum ongan heiður eigur í, men hetta er tíverri nakað, sum saman við (ógrundaðum) illgitingum um, at Nólsoyar-Páll hevði ábyrgdina av ymiskum óhepnum hendingum, skemmir hesa bók óneyðuga nógv.

Her verður gingið út frá, at talan er um eina røð av tesum, sum verða settar fram í bókini, men rættari er í veruleikanum at tosa um 1) royndir at verja Løbner og 2) royndir at seta fram illgitingar móti Nólsoyar-Pálli, tí talan er um so konsekvent hall - eisini í orðavali - handan vegin í bókini, at talan kann illa vera um tilvild.

# Nólsoyar-Páll framdi loynihandil

Í árunum 1805-1808 gjørdi Nólsoyar-Páll fimm túrar við Royndini Fríðu til Danmarkar ella Noregs við og eftir vørum. Á tí fyrsta túrinum í 1805 flutti hann nýggju koppsetingina „mann av manni" heimaftur til Føroya, men hann hevði eisini vørur við á túrunum og varð av embætismonnunum lagdur undir at handla ólógliga.

Tað er tó merkisvert, at Guttesen ongantíð tykist seta søgufakligar atfinningar fram móti verkum hjá Jákupi Jakobsen, høvuðsverkunum handan tjóðskaparmytuna um Nólsoyar-Páll, ið bæði hevur ta fantastisku og ta minni góðu smuglarasøguna um Nólsoyar-Páll við. Tvørturímóti byggir Guttesen ofta á nógv seinni frásagnir, sum Jákup Jakobsen hevur fingið fortaldar í 1885. Einaferð hevur Guttesen - at síggja til í stríð við samtíðar keldur - t.d. gagnnýtt munnliga frásøgn, sum Jákup Jakobsen hevur hildið vera so alternativa og ivasama, at hann hevur sett hana í eina viðmerking, fyri at finnast at virksemi hjá Nólsoyar-Pálli (Guttesen 2019, s. 184-185). Í hesum føri snýr tað seg um at finna prógv fyri, at Nólsoyar-Páll í juli 1806 hevði lagt smuglaravørur upp suðuri í Vági, sum rætturin tó ikki fann prógv fyri, tá fólk vórðu send til Suðuroyar fyri at gera kanningar í málinum. Í øllum førum ger hann nógv burtur úr at staðfesta tað sama sum Jákup Jakobsen, at tá Nólsoyar-Páll ikki varð dømdur fyri smugling, so var grundin, at hann als ikki varð skuldsettur fyri smugling (Guttesen 2019, s. 242, 245, 262). Tað ber eisini illa til at fáa tað at samsvara við hvørt annað, at 1) sýslumaðurin fyrst setti sínar vaktir við úthús

og hjallar hjá bóndanum í Vági, meðan bíðað var eftir, at hann skuldi koma aftur av útróðri, sum samtíðarkeldurnar hjá Guttesen upplýsa, 2) samstundis sum bóndin, meðan sýslumaðurin og hansara menn bíðaðu inni í húsinum hjá honum saman við konuni,[9] heimafturkomin sendi síni fólk út fyri at tøma úthús og hjallar fyri tað mesta av smuglaravørunum, soleiðis sum alternativa og seinni frásøgnin hjá Jákupi Jakobsen upplýsir. Báðar hesar frásagnirnar kunnu illa vera sannar, og um sýslumaðurin bara var ein toluliga skilagóður maður, so kann tann seinna frásøgnin valla vera sonn; men Guttesen velur uttan nakran sunnan keldukritikk at gagnnýta hesa seinni og munnliga varðveittu frásøgnina í bókini hjá Jákupi Jakobsen.

Bóndin í Vági í Suðuroy, sum sipað verður til í hesum sambandi, er Jákup í Toftum, sum var ein av teimum, sum Nólsoyar-Páll hevði bygt og átti Royndina Fríðu saman við. Royndin Fríða varð bygd suðuri í Vági í 1804.

Hvørjar keldukritiskar grundir eru til, at Guttesen gagnnýtir hesa ivasomu søguna, fæst ikki at vita, men tað er greitt, at hann einans kann seta illgitingina fram við at gagnnýta hesa seinnu frásøgnina úr Suðuroy hjá Jákupi Jakobsen, sum Guttesen heldur uppá hevur skapt tjóðskaparligu mytuna um hetjuna Nólsoyar-Páll.

Tað er nú einki nýtt, at Nólsoyar-Páll skuldi havt smuglað ella varð dømdur fyri brot á ymiskar reglur, sum Guttesen við undirstrikingum tykist vilja geva lesaranum fatan av (Guttesen 2019, s. 258), tí hetta er at kalla almenn vitan, sum fá - um nøkur - hava sett spurnartekin við. Eisini Jákup Jakobsen hevur sakliga sagt frá hesum, og hann telist millum keldurnar hjá Guttesen (Guttesen 2019, s. 262). Tað ber hinvegin til at spyrja hvussu avgerandi hetta nú varð mett at vera, tá Nólsoyar-Páll ongantíð varð skuldsettur fyri at hava smuglað.

Hetta er ikki einastu ferð, at Guttesen er heftur at seinni niðurskrivaðum søgum og ivasomum upplýsingum hjá m.a. Venceslaus Ulricus Hammershaimb og Jákupi Jakobsen, ið hann annars leggur

9 Soleiðis sigur Guttesen í øllum førum frá hesi søgnini, sum Jakobsen (1912, s. 80) endurgevur úr Vági í Suðuroy, men sambært Jákup Jakobsen var tað ikki konan, men maðurin, sum, eftir at hann var komin heim, bjóðaði teimum innum.

undir at hava skapt tjóðskaparmytuna um Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 437 ff), fyri at siga sína egnu søgu um Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 214-215, 420), og seinni skal annað dømi viðgerast. Men í eini bók, har høvundurin sigur seg fara at gera upp við ta tjóðskaparligu mytuna um Nólsoyar-Páll, sum skal vera skapt av Jákupi Jakobsen, kundi ein lesari havt roknað við, at hann í meginregluni var eitt sindur minni heftur at verkunum hjá Jákupi Jakobsen og í verki eisini eitt sindur atfinningarsamur móti ivasomum upplýsingum í hesum sama verkinum. Í øllum førum er tað undranarvert, at Guttesen her og - sum vit skulu síggja - aðrastaðni byggir frágreiðing sína á ókritiska endurgeving av ivasomum frásagnum, ið Jákup Jakobsen hevur fingið fortaldar 80 ár seinni.

Royndirnar at leggja herðslu á, at Nólsoyar-Páll *varð* dømdur fyri ávís lógarbrot, sum í fyrra lagi ikki er - og ongantíð hevur verið - umstrítt í granskingini um Nólsoyar-Páll, fella kortini eitt sindur til jarðar, tá Guttesen endar alla viðgerðina við at upplýsa fyri sínum lesarum, at Nólsoyar-Páll møguliga stevndi dómarnar inn fyri Hægsta Rætt, uttan at hann velur at kanna hetta rættiliga áhugaverda mál nærri (Guttesen 2019, s. 264). Tí ein avgerð í Hægsta Rætti kundi í veruleikanum vent fullkomiliga upp og niður upp á hansara egnu rættiliga avgjørdu (undirstrikaðu) niðurstøðu. Guttesen kemur ikki við nýggjari vitan um sakarmálini, sum Nólsoyar-Páll gjørdust partur av, men her hevði veruliga verið ein møguleiki fyri at fingið til vega nýggja vitan og nýggj sjónarhorn upp á virksemið hjá Nólsoyar-Pálli. Møguleikin verður ikki troyttur í hesi nýggju bók hjá Guttesen.

Frásøgnin hjá Jákupi Jakobsen verður stórt sæð standandi, enntá lutvíst við støði í tilfari hjá Jákup Jakobsen.

Hóast Nólsoyar-Páll ongantíð varð dømdur fyri smugling, hevði hann onkuntíð umborð vørur, sum hann einki loyvi hevði fingið til. Onkuntíð hevði hann tó fingið loyvi til at hava vørur við, sum næsta dømið vísir.

# Nólsoyar-Páll breyt allar siglingarreglur og sáttmálar

Í oktober 1807 og í juni 1808 komu skip á Hvalba og løgdu eftir eini inniligari umbøn frá Schrøter presti og Evensen sýslumanni korn upp har. Bæði skipini vóru komin úr Danmark til Føroya fyri Kongaliga handilin við korni í lastini. Fyrra skipið var privat skip hjá Nólsoyar-Pálli, Royndin Fríða, sum eftir avtalu við handilin í Keypmannahavn kom til Føroya við 250 korntunnum (Guttesen 2019, s. 207), sum í oktober 1807 vórðu lagdar upp í Hvalba, meðan tað seinna skipið, Wilhelmine Frederikke hjá einahandlinum (Guttesen 2019, s. 299), ið kom til Føroya í juni 1808 við 500 tunnum av korni, legði 55/80 tunnur av korni upp í Hvalba. Hetta vóru samstundis tey einastu skipini, sum komu til Føroya við vøru í tíðarskeiðinum millum oktober 1807 og juni 1808. Í seinna førinum fáa Schrøter og Evensen, sum var Suðuroyar sýslumaður, ábyrgdina frá Guttesen fyri at „noyða" skiparan, Svarrer, til at leggja kornfarmin upp í Hvalba (Guttesen 2019, s. 219, 298), meðan Svarrer sleppur undan at fáa nakra viðmerking – tað verður beinleiðis sagt um Schrøter og Evensen, at teir „ræna korntunnur til sín" (Guttesen 2019, s. 480). Í fyrra førinum verður Nólsoyar-Páll, skiparin á Royndini Fríðu, aftur og aftur skuldsettur fyri at bróta siglingarreglur, flutningssáttmála og kontrakt við at hava lagt korn upp í Suðuroy (Guttesen 2019, s.

94, 210, 211, 213, 214, 296, 319, 431, 451), men tað verður í hesum høpi ikki víst til keldur sum grundarlag fyri, at Nólsoyar-Páll skuldi havt brotið allar hesar reglur (Guttesen 2019, s. 207). Heldur ikki verður upplýst, hvørjar ásetingar Nólsoyar-Páll skuldi havt brotið við at leggja korn upp í Hvalba, sum Svarrer ikki breyt við at gera tað sama. Eiheldur verður tað upplýst, hvørjir viðkomandi myndugleikar funnust at Nólsoyar-Pálli fyri at hava lagt kornfarmin upp í Hvalba. Hinvegin verður Nólsoyar-Páll - uttan nakað skjalprógv - nærum karaktermyrdur fyri á sama hátt sum Svarrer at hava aktað boð frá Suðuroyar sýslumanni og presti. Soleiðis skrivar Guttesen um tað, sum Schrøter, Evensen og annar skiparin, Nólsoyar-Páll - ikki Svarrer - gjørdu í Hvalba: „Okkurt bendir á, at Evensen sýslumaður og Schrøter prestur møguliga spæla onkran hulduleik saman og hvør sær. Hesin mistankin verður álvarsligari, tá ið vit koma til 1808, tá ið teir aftur, uttan loyvi til tað, tvinga skiparan Svarrer til at leggja ein stóran part av kornfarminum, sum skuldi til Havnar, upp í Hvalba. - Um Poul P. Nolsöe kann man siga, at tað man vera ein lítið umhugsin skipari, sum leggur lastina upp á skeivum stað til skeivan móttakara, tí tveir framligir menn kæra seg um støðuna í sýsluni. Hetta mistak hevur helst ikki bøtt um tað vantandi álit, sum Löbner og aðrir høvdu á honum“ (Guttesen 2019, s. 213-214) - sí eisini meira av tí sama aðrastaðni, har illgrunavekjandi retoriskir spurningar einans verða settir til virksemið hjá Nólsoyar-Pálli, Evensen og Schrøter í sambandi við kornið í Hvalba, og ikke til Svarrer (Guttesen 2019, s. 213). At høvundurin ikki tykist leggja merki til, at hann á somu síðu skrivar so inkonsistent um hesar skiparararnar, sum komu við korni fyri einahandilin, er undranarvert.

Heldur ikki var einans talan um „tveir framligir menn,“ men talan var um hægstu embætisfólkini í Suðuroy.

Her ber til at spyrja, hví høvundurin metir tað vera neyðugt at geva Nólsoyar-Pálli hesar ábreiðslur fyri at akta boð frá sýslumanninum, tá hann fyri eina líknandi gerð hjá Svarrer einans gevur Schrøter og Evensen ábyrgdina. Tað er enntá tann munur millum dømini, at viðvíkjandi seinna skipinum hevur Guttesen skjøl at halda seg til,

sum við analogi ikki geva honum grund til at finnast at Nólsoyar-Pálli, m.a. brøv frá Løbner til Schrøter, har tann fyrri gevur boð um, at øll lastin skuldi leggjast upp í Havn, fyri síðan at geva Schrøter og Evensen, ikki Svarrer, ábyrgdina fyri, at 55/80 tunnur av korni vórðu lagdar upp í Hvalba (Guttesen 2019, s. 316-317). Men í tí fyrra førinum leggur Guttesen eftir Nólsoyar-Pálli, uttan at sipa til keldur - hann leggur eingi tílík boð fram, sum Nólsoyar-Páll á sama hátt sum Svarrer skuldi havt fingið um, at kornlastin skuldi leggjast upp í Havn, men heldur hinvegin upp á, at tað einans var „av vælvild“ (Guttesen 2019, s. 214) frá handlinum í Keypmannahavn, at Nólsoyar-Páll yvirhøvur slapp at hava vøru við. Hendan nærum umberandi meting gevur ikki einum lesara ábendingar um, at Nólsoyar-Páll fekk álagdar eins strangar treytir, sum skip hjá einahandlinum. Orðingin „helst ikki,“ sum verður brúkt í omanfyri nevnda sitati bendir nú heldur ikki á, at nakað skjalprógv er fyri, at Nólsoyar-Páll hevði fingið líknandi boð sum Svarrer um, at farmurin skuldi til Havnar; men hóast Guttesen skuldi havt líknandi skjøl og boð at hildið seg til í samband við hesa ferðina hjá Nólsoyar-Pálli, átti Guttesen - um hendingarnar í aðrar mátar eru samanberiligar - framvegis ikki at viðgjørt gerðirnar hjá Nólsoyar-Pálli í Hvalba øðrvísi enn tær hjá Svarrer. Hví hesi bæði at síggja til líknandi málini fáa so ymiska viðgerð av høvundinum, fær lesarin heldur onga frágreiðing um. Tað er trupult at finna nakað í bókini, ið kann rættvísgera eina so inkonsistenta viðgerð (har er eingin grundgeving), og eg dugi illa at síggja nakra grund til at festa á blað so ósakligar viðmerkingar um gerðirnar hjá Nólsoyar-Pálli, sum eins og Svarrer bert aktaði boðini frá prestinum og sýslumanninum í Suðuroy um at leggja kornfarmin upp suðuri í Hvalba.

Og so koma teir illgitandi, retorisku spurningarnir, sum tíverri eyðkenna nógv í hesi bókini, ið nú eisini verða vendar móti sjálvum sýslumanninum fyri óreglusemi eftir uppskipanina av kornfarminum: „Bleiv tað selt til tann nýggja, lægra prísin? Ella til tann gamla prísin? Ella okkurt heilt annað, nú ´neyðin` var so stór í oynni?“ (Guttesen 2019, s. 213) – enntá at síggja til í stríð við keldu, sum Guttesen hevur lisið, har tað í øllum førum verður váttað, at tey

peningaligu viðurskiftini við kongaliga einahandilin vóru í lagi. Áðurnevndi Carl Adolf Muhle, í nógv ár høvuðsbókhaldari við hin kongaliga einahandilin í Keypmannahavn, sum - eftir boðum frá krúnprinsinum - gav Nólsoyar-Pálli loyvi at føra korn til Føroya í 1807, og persónliga segði seg hava hitt hann í rentukamarinum í Keypmannahavn í 1808, skrivaði í 1844 soleiðis um korntunnurnar, sum Nólsoyar-Páll ´noyddist` at leggja upp suðuri í Hvalba: „Denne Ladning udlossede han til Præsten Schrøter og Sysselmand Evensen, hvor man, efter Sigende, tvang ham dertil, formedelst Trangen paa Øen, da han landede der - og dens beløb er rigtig bleven Handelen godtgjort - hvorpaa Nolsøe stak igien ballastet i Søen." (Muhle 1844, s. 13). Hví sipar Guttesen ikki til hesar viðkomandi upplýsingar, men velur bert at seta illgitandi spurningar til virksemið hjá sýslumanni, presti og Nólsoyar-Pálli, ið sjálvur hevði fingið krúnprinsin at lækka kornprísin og fekk uppgávuna at bera tey góðu boðini til Føroya? Tað er trupult at skilja, hví hetta verður viðgjørt soleiðis.

Í hesum sambandi kundi Guttesen um ikki annað eisini havt nevnt *veruligar* kærur frá føroysku almúguni móti embætismonnum fyri at selja kornið í handlinum fyri yvirprís (Nolsøe 1963, s. 117-118, 161), í staðin fyri bert at finna upp á sínar egnu *óheimilaðu* illgrunar móti ávísum føroyingum fyri at selja fyri skeivan prís.

Men tað eru nakrir munir millum hesar báðar í aðra mátar samanberiligu hendingar í Hvalba, sum neyðugir eru at hava í huganum, tá ið tær verða samanbornar. 1) Ein munur var, at Nólsoyar-Páll noyddist at leggja allan kornfarmin upp í Hvalba, meðan Svarrer bert noyddist at leggja upp tann kornfarmin, sum í lutfalli til fólkatalið átti at falla til Suðuroynna. Hetta kann tykjast tala fyri, at mistakið – um tað yvirhøvur kann sigast at vera eitt mistak hjá einum skipara at akta harraboð frá hægstu embætisfólkunum í oynni - hjá Svarrer var minni enn tað hjá Nólsoyar-Pálli, men hóast Nólsoyar-Páll skuldi havt fingið somu boðini sum Svarrer, – tað verður ikki skjalprógvað – so var sjálvt mistakið tað sama: at leggja korn, sum skuldi til Havnar, upp í Hvalba. Løbner gjørdi eisini mótvegis rentukamarinum seinni greitt, at suðuroyingar ongan rætt høvdu til *nakað* av kornfarminum,

sum Svarrer førdi til Føroya við Wilhelmine Frederikke (Nolsøe 1963, s. 159). Men lívskorini í Føroyum vóru rættiliga nógv broytt til tað verra, frá tí at Nólsoyar-Páll kom til Føroya við korni 1. oktober 1807 og til Svarrer kom 26. juni 1808. 2) Ein annar munur var sostatt, at sambært Guttesen hevði ongantíð verið lagt so nógv korn upp í Havn, - har nógv korn var á goymslu - sum í 1807, tá ið Nólsoyar-Páll legði korn upp í Hvalba (Guttesen 2019, s. 207, 213, 305), meðan Svarrer kom til Føroya meðan hungursneyð hótti, serliga í Havn (Guttesen 2019, s. 220, 306, 311, 316 – Nolsøe 1963, s. 138). Einki skip varð komið til Føroya síðan Nólsoyar-Páll legði kornfarm upp í Hvalba, og kornið í einahandlinum í Havn hevði verið skamtað síðan januar 1808. Hendan samanberingin tykist vera til fyrimunar fyri Nólsoyar-Páll, tí nógv korn var á goymslu í Havn í 1807, meðan stórur tørvur sambært sýslumanninum var á korni í Suðuroy. 3) Ein triði munur var, at Svarrer var skipari á skipi hjá einahandlinum, meðan Nólsoyar-Páll var skipari á egnum skipi, sum - sambært Guttesen - „av vælvild“ fekk loyvi til at hava korn við heimaftur til Føroya. Tað er møguligt, at ein skipari á einum privatum skipi, sum einans „av vælvild“ slapp at hava kornfarm við úr Danmark til Føroya, fekk álagt somu treytir, sum skip hjá einahandlinum, ið sambært Guttesen høvdu skyldu til at sigla og leggja farm upp í Havn, men eingi skjalprógv verða løgd fram sum grundgeving fyri hesum. Guttesen sær yvirhøvur onga grund til at samanbera hesi líknandi mál. Hann viðger heldur ongan av hesum munum, men lýsir gerðir hjá Nólsoyar-Pálli í Hvalba uttan fyri stóra samanhangin - at síggja til eisini við støði í persónligum antipatium.

Heldur ikki spyr Guttesen, um tað altíð var neyðugt ella rímiligt av handilsmyndugleikunum at krevja av m.a. suðuroyingum, at teir skuldu rógva um Suðuroyarfjørð til Havnar við opnum báti fyri at keypa t.d. korn, tá ið farmaskipini kundu og ofta eisini løgdu inn á Hvalba, har tað var møguligt at avrokna og leggja kornið upp.

At enda skal nevnast, at vit í veruleikanum hava eina frágreiðing frá Løbner til rentukamarið, dagfest 16. juli 1808, har hann mótvegis rentukamarinum finst at Evensen og Schrøter fyri í juni 1808 at hava

noytt Svarrer at leggja 80 korntunnur upp í Hvalba, „som slet ikke kunde giøre nogen Fordring paa noget af denne Last," og brúkar m.a. ta grundgeving, at Nólsoyar-Páll í oktober 1807 hevði lagt „248 tønder extra" upp í Hvalba. Sambært Løbner tykist tað v.ø.o. vera *herðandi* umstøður í juni 1808, tá Wilhelmine Frederikke legði korn upp í Hvalba, tí Suðuroyggin hevði frammanundan, í oktober 1807, tá nóg mikið av korni var á goymslu í Havn, fingið nakað av korni „extra" við Royndini Fríðu, meðan hungursneyð hótti í juni 1808, serliga í Havn. Áhugavert er eisini, at Løbner í hesum sambandi einki nevnir um, at *Nólsoyar-Páll* skuldi havt gjørt nakað skeivt, tá hann eftir boðum frá Evensen og Schrøter legði kornfarmin upp í Hvalba. (Nolsøe 1963, s. 159). Tað hevði eisini verið løgið, um Løbner hevði gjørt tað, tá ið hann ikki gjørdi tað mótvegis Svarrer. Heldur ikki hetta skjalið, sum er einasta skjal eg havi sæð, har Løbner sipar til hendingina í Hvalba í oktober 1807, endurgevur Guttesen, sum í hesum føri skuldsetur Nólsoyar-Páll uttan fyri samanhang og keldugrundarlag.

Søgan um ´tann lítla kornfarmin` sum Nólsoyar-Páll í oktober 1807 orsakað av trýsti frá presti og sýslumanni kendi seg noyddan til at leggja upp í Hvalba í Suðuroy, - har tað orsakað av fjarstøðu og veðri, serliga ávísar árstíðir, í langa tíð kundi vera avbjóðandi at fáa vørur úr einahandlinum í Havn, har nógv korn var á goymslu í 1807 (Guttesen 2019, s. 213), og sum Guttesen heldur ikki metir hevði nógv at siga fyri ta stóru myndina (Guttesen 2019, s. 296-297, 304) - verður kortini mett at vera so tyngjandi fyri Nólsoyar-Páll, at hon verður tikin framaftur í niðurstøðuni og nevnd „tað ræðandi mistakið" (Guttesen 2019, s. 431), sum hann gjørdi.

Tað er møguligt, at Guttesen hevur skjalprógv fyri tí, sum hann skrivar um „ræðandi mistakið" hjá Nólsoyar-Pálli, tá ið hann í oktober 1807 legði korn upp í Suðuroy, har korn sambært sýslumanninum manglaði, men ein lesari stendur spyrjandi, ikki minst, tá ið hann fær at vita, 1) at allur kornfarmurin varð avroknaður rætt við Kongaliga einahandilin (men tað fær ein lesari bara ikki at vita frá høvundinum í hesum høpinum), 2) at nógv korn var á goymslu hjá einahandlinum í

Havn, 3) at korn ikki var skamtað í oktober 1807, eins og tá ið Svarrer í juni 1808 kom á Hvalba, 4) at Løbner sjálvur einans tykist hava tikið gerðirnar í juni 1808 í álvara, og 5) at Løbner í hesum førinum í juni 1808 ikki tykist hava funnist at skiparanum, einans sýslumanni og presti. Undranarvert tykist tað eisini, at eingin samanbering verður gjørd millum Nólsoyar-Páll og Svarrer í Hvalba.

Kanska hevði Nólsoyar-Páll havt uppiborið, at søgan varð sett inn í eitt størri søgu- og samfelagsligt høpi, tí søguliga er tað óviðkomandi bert at fáa at vita, hvat Guttesen persónliga heldur um gerðirnar hjá Nólsoyar-Pálli. Tað verður nevnt so ofta í bókini, at lesarin fær ta fatan, at tað, at Nólsoyar-Páll legði korn upp í Hvalba í 1807 var eitt veruligt álvarsmál, men tað er einans røddin hjá Guttesen, sum aftur og aftur hoyrist í bókini, meðan hvørki keldur ella samanhangur benda á, at talan var um nakað „ræðandi" mistak hjá Nólsoyar-Pálli.

Upp undir hóttandi hungursneyðini í 1808, tá ið Svarrer at enda í juni kom við korni til føroyingar, noyddist Løbner at leita sær hjálp frá Nólsoyar-Pálli. Næsta dømið snýr seg um hetta kollsiglda samstarvið millum teir báðar, og illgitingar hjá Guttesen ímóti Nólsoyar-Pálli um at rýma frá sínum egnu hungrandi landsmonnum.

# Nólsoyar-Páll rýmdi frá neyðarrópi og hungrandi landsmonnum

Hetta dømið finna vit á síðunum 307 ff. Har verður umrødd ein roynd hjá Løbner frá mai 1808 at gera avtalu við Nólsoyar-Páll um at leiga Royndina Fríðu til at gera ein skjótan túr til Danmarkar við skjølum, sum skuldu kunna myndugleikarnar um, at í Føroyum var hungursneyð fyri framman, um skip ikki skjótt komu við korni. Ynski tykist upprunaliga vera komið frá havnarfólki, sum høvdu verið á fundi við Løbner, men tað sæst ikki í tekstinum, akkurát hvat havnarfólk hava ynskt, at Nólsoyar-Páll skuldi biðjast um at gera. Keldukritiskt sæð tykist tað ikki órógva høvundin, at hann bert hevur brøv frá Løbner at stiðja seg til í m.a. hesum sambandi, t.e. at keldutilfarið ikki er heilt umboðandi fyri tað mál, sum hann roynir at greina. Heldur ikki tykist hann hava umhugsað at spyrja, hví Løbner mundi sýta fyri, at Nólsoyar-Páll kundi hava nakrar vørur við á ferðini - retoriskir (t.e. illgitandi) spurningar eru annars nóg mikið av í bókini, tá ið tað snýr seg um at sáa illgruna um motivini hjá Nólsoyar-Pálli, men í hesum førinum, tá ið tað snýr seg um at meta um gerðir hjá Løbner, eru eingi líknandi háttalagslig konsistenskrøv at síggja. Tað verður í hesum førinum uttan nakað fyrivarni ella grundgeving – ella nakran illgruna yvirhøvur - gingið út frá, at Løbner bert hugsaði um eina hungursneyð í Føroyum,

sum hótti orsakað av, at farmaskip hjá einahandlinum blivu tikin av bretskum herskipum á vegi úr Keypmannahavn til Føroya við vøru. Tað var undir hesum hóttandi og vandamiklu umstøðum í Føroyum og í Norðuratlantshavinum, at Løbner sýtti Nólsoyar-Pálli at hava vøru úr og til Føroya á vandamiklu ferð síni til Danmarkar. Guttesen endar viðgerðina við eini lítið fakligari viðmerking til Páll J. Nolsøe, sum setur fram eina at síggja til sakliga meting av motivunum hjá Nólsoyar-Pálli til ikki at taka av tilboðnum frá Løbner: „At flyta nøkur skjøl ímillum - uttan loyvi til at ferma skipið - hevur hann sæð lítla og onga nyttu í.“ Og seinasta viðmerkingin hjá Guttesen, sum kemur beint aftan á sitatið, er hendan: „Eg leggi til merkis, at neyðarrópið til myndugleikarnar um at fáa meira korn sum skjótast, er blivið til „nøkur skjøl„[10] (Guttesen 2019, s. 315-316) - uttan at hann setur og tíansheldur hvørki umrøður ella tekur støðu til spurningin, hvør orsøkin mundi vera til, at Løbner setti sum treyt fyri avtaluni við Nólsoyar-Páll, at hann skuldi sigla báðar vegir við tómum skipi.

Tað er eitt sindur løgið, at Guttesen ikki tykist síggja nakað undranarvert í at senda skip til Danmarkar við boðum um at fáa kornfarm til Føroya sum skjótast, við tí grundgeving, at annars verður hungursneyð, og samstundis seta forboð fyri at sama skipið kann fáa loyvi til at taka vøru við heimaftur til Føroya. Átti hetta ikki at verið ein avgerð hjá Løbner, sum fekk ein nøkulunda óheftan søgugranskara at seta onkran spurning? Og átti Guttesen ikki háttalagsliga at mett gerðir hjá Løbner eftir sama leisti, sum gerðir hjá Nólsoyar-Pálli?

Hevði Guttesen verið eins atfinningarsamur móti Løbner, sum hann er móti Nólsoyar-Pálli, átti hann so ikki at sett t.d. hesar spurningar: 1) Hví vildi Løbner ikki geva Nólsoyar-Pálli loyvi

10 Í veruleikanum vendir hetta øvugt, tí málsliga er tað ikki Páll J. Nolsøe, sum týðir „neyðarrópið“ frá Løbner til „nøkur skjøl,“ sum Guttesen vil vera við, men tað er Guttesen, sum týðir „doucomenter“ (Guttesen 2019, s. 308), sum Løbner brúkar, til „neyðarrópið.“ Málsliga eigur orðingin hjá Nolsøe, „skjøl,“ sum er neyv týðing av „doucomenter,“ sjálvandi ikki at metast við støði einum skeivt týddum orði, ið Guttesen brúkar, men skeivt týdda orðið hjá Guttesen skal metast við støði í tí rætta orðinum, sum eru at finna í keldunum. Hetta er eitt dømi um hvønn týdning málið hevur í tekstum, men samanhangurin hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvørji orð ein høvundur kann nýta til at tulka t.d. hesa støðuna. Páll J. Nólsøe hevur allan tann rætta samanhangin við í lýsingini og hann brúkar eisini neyvari orðingar enn Guttesen.

til at hava vøru við heimaftur til Føroya, har stór hungursneyð hótti? 2) Hevði tað ikki verið eitt upplagt høvi, at Nólsoyar-Páll tók korn við heimaftur til Føroya, har hungursneyð hótti? 3) Er tað óskilligt, at Nólsoyar-Páll sýtti fyri at gera avtalu við Løbner undir tílíkum treytum)? 4) Er tað púra óhugsandi, at Løbner, sum sambært Guttesen hevði sett seg í samband við Nólsoyar-Páll orsakað av áðurnevndu áheitan frá borgarum í Havn, í veruleikanum ikki sjálvur ynskti eina avtalu við Nólsoyar-Páll? 5) Er nøkur saklig grund til, at Nólsoyar-Páll ikki fekk loyvi at hava nakra vøru við heimaftur til Føroya við Royndini Fríðu?[11] 6) Um ikki, er tað so heilt óhugsandi, at ein møgulig grund kundi verið, at Løbner heldur hevði latið føroyingar liðið hungur og neyð enn at givið Nólsoyar-Pálli nakran møguleika fyri aftur at fáa heiðurin fyri at vera komin til (hungursraktar) føroyingar við kornfarmi? - Seinasti kornfarmurin kom eisini við Royndini Fríðu (Guttesen 2019, s. 297-298). Tað er møguligt, at tað í tí seinasta spurninginum liggur

11 Páll J. Nolsøe tykist verja avgerðina hjá Løbner við at sipa til, at „øll handilssigling … var forbjóðað Nólsoyar-Pálli“ (Nolsøe 1963, s. 142). Í hesum sambandi sipar hann til, at handilsnevndin og rentukamarið í juni-juli 1806 høvdu givið Nólsoyar-Pálli boð um, at „han for Eftertiden har at afholde sig fra al Handelsfart fra og til Færøe under Adfærd efter Lovene“ (Guttesen 2019, s. 174, Nolsøe 1963, s. 62-64, 126-127). Tað eru fleiri viðurskifti, sum gera, at hendan grundgevingin ikki heldur, 1) at „Lovene,“ har undantøk vóru, kunnu og vórðu tulkað, 2) at Nólsoyar-Páll, áðrenn boðini vórðu givin, fekk loyvi frá handilsnevndini til at flyta vøru til Føroya (Guttesen 2019, s. 174), 3) at loyvi varð givið Nólsoyar-Pálli at hava kornfarm við til Føroya í oktober 1807 (sí undanfarna kapittul um túrin hjá Nólsoyar-Pálli úr Keypmannahavn til Føroya við kornfarmi), 4) at heilt serligar umstøður gjørdu seg galdandi undir Napoleonskríggjunum (1807-1814), tá hungursneyð hótti, 5) at Løbner í mai 1808 í sambandi við nevndu treyt í ætlaðu avtaluna við Nólsoyar-Páll ikki sipaði til nakað handilsforboð sum grundgeving fyri, at Nólsoyar-Páll ikki kundi fáa loyvi til at hava farm við úr og aftur til Føroya (Nolsøe 1963, s. 142-143), 6) at heldur ikki Guttesen sipar til nakað handilsforboð í sambandi við viðgerð av treytunum í ætlaðu avtaluni millum teir báðar (Guttesen 2019, s. 307-312) og 7) í sjálvum sær avgerðandi, at tá Løbner ætlaði at leiga bæði skip og manning, so hevði Royndin Fríða farið til Danmarkar í almennari tænastu eins og onnur skip. Boðini hjá rentukamarinum og handilsnevndini frá juni 1806 sipaðu sjálvandi bert til privatar handilsferðir hjá Nólsoyar-Pálli, meðan einki forboð var fyri, at hann kundi flyta vøru til Føroya vegna almennu donsku einahandilsmyndugleikarnar. Harafturat má samanhangurin, at kríggj og hóttandi hungursneyð í 1808 var orsøkin til ferðina, takast við í metingina. Um tað so var við ella uttan myndugleikans loyvi, hevði valla nakar funnist at Nólsoyar-Pálli fyri at komið til Føroya við korni á heysti í 1808, tá ið hungursneyð hótti. Tvørturímóti tykist tað rættiliga sannlíkt, at hann hevði verið fagnaður av flest øllum føroyingum fyri eina tílíka gerð.

ein líknandi illgiting, sum Guttesen við retoriskum spurningum setur til nógv virksemi hjá Nólsoyar-Pálli, men tað løgna er, at hann ikki tykist seta *nakrar* atfinningarsamar spurningar til virksemið hjá Løbner. Hann kemur einans við eini speiskari viðmerking til metingina hjá Páll J. Nolsøe, sum tykist bæði saklig, rímilig og sannlík. Hartil kemur, at sakligir søgufrøðingar eiga at seta atfinningarsamar og umboðandi spurningar til tilfar, evni og persónar, sum verða viðgjørdir, men meira umráðandi er, at teir eisini royna at *svara* teimum spurningunum, sum teir seta, og ikki einans seta illgrunavekjandi retoriskar spurningar. Í tí samanhanginum er tann seinasti spurningurin ikki illgrunavekjandi, men avklárandi, tó treytað av, hvat svar keldurnar leiða granskaran til at koma við í sambandi við undanfarnu spurningarnar. Havandi í huga truplu viðurskiftini millum Løbner og Nólsoyar-Páll, sum týðiliga koma til sjóndar í samtíðarkeldunum, er hesin spurningurin harumframt sera viðkomandi at seta. Samtíðarkeldurnar leggja jú beinleiðis upp til, at Løbner bar ótta fyri, at Nólsoyar-Páll kundi gerast leiðari fyri føroysku almúguni, og at Løbner ikki saknaði Nólsoyar-Páll, tá hann í 1808 var sjólátin, tvørturímóti. Hendan partin av samtíðarkeldunum, sum Guttesen eigur at kenna, sipar hann ikki til, men hann tekur í staðin ókritiskt samkensluorðingar hjá Løbner i frágreiðingum til rentukamarið fyri góða vøru. Tað er sín søk, at granskarar kanska mangla ella ikki kenna alt keldutilfar, men beinleiðis søgufakliga ósakligt verður tað, um tað verður sæð burtur frá viðkomandi og kendum keldutilfari.

Harafturat kemur, at heldur einki í sjálvum samanhanginum tykist bara benda á, at Nólsoyar-Páll „slapp sær av stað uttan brøv og skjøl frá Löbner“ (Guttesen 2019, s. 315). Heldur ikki sipar Guttesen til nakrar keldur, sum benda á, at Nólsoyar-Páll „slapp sær av stað uttan brøv og skjøl frá Löbner,“ mest sannlíkt tí at Løbner ongantíð gav Nólsoyar-Pálli nøkur skjøl at hava við til Danmarkar. Tvørturímóti tykist høvundurin beinleiðis síggja burtur frá kendum samtíðarkeldum, ið ikki fáast at samsvara við hansara egnu ógrundaðu illgitingar.

Helst er hetta málið so einfalt sum tað, at Løbner og Nólsoyar Pall leingi høvdu verið ósamdir um treytirnar í avtaluni, serliga um

Nólsoyar-Páll skuldi sigla við tómum skipi báðar vegir. Men tá ið Svarrer 26. juni 1808 kom til Føroya við Wilhelmine Frederikke, - fyrsta skipið, sum kom til Føroya síðan oktober 1807, tá Royndin Fríða „av vælvild“ slapp at hava korn við til Føroya - sum hevði 500 tunnur av korni til føroyingar í lastini, datt grundarlagið hjá Løbner fyri at gera eina avtalu við Nólsoyar-Páll burtur: Eitt farmaskip hjá Kongaliga einahandlinum var nú komið til Føroya, sum Løbner kundi senda síni skjøl til Danmarkar við, samstundis sum tær 500 tunnurnar av korni lættu eitt sindur um bráðfeingis tørvin á korni í Føroyum. Nólsoyar-Páll kundi tí 29. juni 1808 fara til Danmarkar uttan nakrar treytir ella sáttmála við Løbner, sum einans av neyð hevði vent sær til Nólsoyar-Páll fyri at fáa sáttmála í lag um brævaflutning og ongantíð hevði verið serliga hugaður fyri at lata Nólsoyar-Pálli nøkur skjøl (Nolsøe 1963, s. 129). Í staðin útsetti Løbner, eins og hann fyrr hevði gjørt í líknandi støðu, tá ið hann kundi havt fingið skjøl skjótari til Danmark við Nólsoyar-Pálli (Nolsøe 1963, s. 129), at senda skjølini og valdi ta tryggaru loysnina, sum var at lata skjølini til Svarrer, sum 21. juli 1808 fór til Danmarkar við einum skipi hjá einahandlinum, Wilhelmine Frederikke. Hóast samanhangurin tykist heilt greiður og Guttesen hevur allar upplýsingarnar (Guttesen 2019, s. 298, 314, 316), so sær hann ikki hendan samanhangin, men leggur í staðin Nólsoyar-Páll undir at rýma frá neyðarrópinum hjá Løbner.

Hetta gerst uppaftur týðiligari av einum brævi, sum Løbner sendi til Danmarkar við Wilhelmine Frederikke nakað eftir, at Nólsoyar-Páll var farin til Danmarkar. Í hesum brævinum, sum m.a. snýr seg um fráferðina hjá Nólsoyar-Pálli úr Havn til Danmarkar 29. juni 1808, skrivar Løbner, at „Vi kunde paa denne Tour ei betroe ham“ - t.e. Nólsoyar-Pálli - „breve eller andet.“ (Nolsøe 1949, s. 178). Í sjálvum sær ber kanska ikki til at siga nakað við vissu um, hvat Løbner legði í orðini „Vi kunde … ei,“ men tá ið hesi orðini verða knýtt saman við orðið „betroe,“ so gerst tað enn týðiligari, at tað var *Løbner*, sum ikki vildi lata Nólsoyar-Pálli, sum hann ikki hevði álit á, brøvini. Tað var v.ø.o. valla Nólsoyar-Páll, sum avgjørdi at fara „uttan brøvini“ hjá Løbner, men Løbner valdi at lata brøvini fara við

øðrum tryggari skipi hjá einahandlinum, tá ið hesin møguleikin kom 26. juni 1808. Eisini Guttesen endurgevur - uttan kelduávísing - úr hesum brævinum (Guttesen 2019, s. 314),[12] sum eisini er endurgivið av Páll J. Nolsøe, men Guttesen endurgevur av onkrari grund ikki omanfyri nevnda setningin, sum brotið hjá Páll J. Nolsøe endar við. Og hetta er tann einasti parturin av sitatinum hjá Páll J. Nolsøe, sum Guttesen ikki endurgevur. Tað er møguligt, at Guttesen kann hava gloymt at upplýsa, hvaðan hann hevur skjalið, men tað er truplari á ímynda sær, at hann hevur gloymt tann í hesum høpinum týðandi partin av sitatinum. Eiheldur verður skjalprógvað, at Nólsoyar-Páll sýtti fyri at taka brøv hjá Løbneri við, men tekstur, ið sáar iva um skuldsetingarnar hjá Guttesen móti Nólsoyar-Pálli, verður hinvegin lagdur burturúr.

Beinleiðis avdúkandi er tað, at nógv seinni í bókini, í einum øðrum samanhangi, um akkurát somu tíð í juni 1808, verður staðfest, at „Löbner hevur so lítið álit á Páll P. Nolsöe, at hann ikki vil geva honum brøv at flyta aftan á fleiri álvarsligar hendingar“ (Guttesen 2019, s. 399). Har setur Guttesen somu upplýsing í brævinum hjá Løbner til rentukamarið – tað mugu vit ganga út frá, men heldur ikki her er nøkur tilvísing – inn í annan samanhang, har hann vil gera sínar lesarar varugar við, hvussu lítið álit Løbner hevði á Nólsoyar-Pálli, meðan sama upplýsingin verður gloymd – tilvitað løgd burturúr – í sambandi við kollsigldu avtaluna, tá ið hon hevði afturvíst grovu og grundleysu illgitingum høvundsins móti Nólsoyar-Pálli um at rýma frá neyðarrópinum hjá Løbner og hungrandi landsmonnum.[13] Eitt er, at Nólsoyar-Páll sjálvandi ikki kundi rýma frá nøkrum skjølum, sum Løbner „ikki vil geva honum,“ men soleiðis kann ein høvundur heilt einfalt ikki loyva sær at skriva søgu.

---

12 Akkurát sama brot úr brævinum hjá Løbner til rentukamarið verður í øðrum høpi endurgivið aftur seinni í bókini (Guttesen 2019, s. 398), men tá verður víst til amtskopibókina, sum er í varðveitslu á Tjóðskjalasavninum í Havn.

13 Í einum ummæli av síni bók (Sølvará 2020) er Guttesen gjørdur varugur við hesi søgufakliga sæð rættiliga tyngjandi brek, í veruleikanum søgureingjan, men sambært viðmerking til ummælið tykist hann ikki leggja stórvegis í, at hann við sitatfrávali setur fram illgiting móti Nólsoyar-Pálli um at rýma frá neyðarrópi og hungrandi landsmonnum (Guttesen 2020). Guttesen viðurkennir, at hann hevur lagt brotið burturúr Løbner sitatinum, men heldur tað hava lítið uppá seg.

Eisini her verða settar fram illgrunavekjandi og retoriskir spurningar: „Hví fór Poul P. Nolsöe uttan at taka neyðarkallini hjá Löbner við, og - hvat ætlaði hann annars? Hugsaði hann meira um egnan vinning enn um sínar hungrandi landsmenn?“ (Guttesen 2019, s. 314). Tað fyrra er sum sæst beinleiðis skeivt, søgureingjan. Nólsoyar-Páll „fór“ *ikki* „uttan at taka neyðarkallini hjá Löbner við“ - tað kundi hann av góðum grundum illa gera, tí Løbner vildi ikki geva honum neyðarkallini. Harumframt er illgitingin móti Nólsoyar-Pálli um at rýma frá sínum hungrandi landsmonnum burturvið. Tvørturímóti fór Nólsoyar-Páll av Havnini 29. juni 1808 eftir korni til hungursraktar landsmenn. Hesin konteksturin: at Nólsoyar-Páll og manning, við siglingarloyvi og heilsuváttan frá Løbner, sum ikki longur hevði fyri neyðini at senda skjøl við Nólsoyar-Pálli, í ringastu krígs- og ófriðartíð, við lívinum í váða, løgdu leiðina yvir krígsherjaða Atlantshavið til Danmarkar við einum deksfari, ið føroyskir handilsmyndugleikar mettu vera so lítið, veikt og ússaligt, at tað var óegnað til flutning millum lond (Guttesen 2019, s. 140-141), eftir korni til sínar hungrandi landsmenn, verður fjaldur í retorikki. Løbner, sum ongantíð hevði verið áhugaður í at senda skjøl til rentukamarið í Keypmannahavn við Nólsoyar-Pálli, ið hann ikki helt vera trygt (Nolsøe 1963, s. 129), valdi tí at senda skjølini við Svarrer, tá hesin møguleikin kom nakrar dagar áðrenn Nólsoyar-Páll fór av stað við Royndini Fríðu eftir farmi, meðan Nólsoyar-Páll og manningin seint í 1808 gingu burtur á veg heim til Føroya við kornfarmi til hungursraktar føroyingar.

Tað, sum órógvaði Løbner, tá Nólsoyar-Páll 29. juni 1808 var farin til Danmarkar eftir korni, tóktist nú heldur ikki bert vera hungur og hall í Føroyum. Sambært brævi til rentukamarið, dagfest 16. juli 1808, órógvaði tað eisini Løbner, at Nólsoyar-Páll kundi vera „nedrig nok til“ at koma aftur til Føroya fyri at selja kornfarmin til føroyingar fyri minni enn tað, sum hann hevði keypt hann fyri, við tí einasta endamáli at styrkja føroyingar í teirra „forudfattede Meening,“ at kornprísurin í handlinum var ov høgur, soleiðis at handilin fekk enn størri avbjóðingar við misnøgdum føroyingum (Nolsøe 1963, s. 158). Hesin óttin hjá Løbner kundi verið ein grund til, at Løbner ikki vildi

loyva, at Nólsoyar-Páll kundi hava kornfarm við sær aftur til Føroya. Tað tykist eisini sannlíkt, at Løbner við hesum skuldsetingunum móti Nólsoyar-Pálli í brævinum til rentukamarið, dagfest 16. juli 1808, vónaði, at heldur ikki einahandilsmyndugleikarnir í Keypmannahavn fóru at loyva Nólsoyar-Pálli at hava vørur við heimaftur, nú eingin sáttmáli varð gjørdur millum teir báðar, áðrenn Nólsoyar-Páll fór av stað við Royndini Fríðu. Heldur ikki hesa sera viðkomandi frágreiðingina hjá Løbner til rentukamarið endurgevur Guttesen - ella at Løbner í einum skrivi til rentukamarið 7. apríl 1809 metti, at veturin hevði verið friðarligur, tí Nólsoyar-Páll, sum gekk burtur við North Star á veg heim til Føroya við kornfarmi, ikki var heima veturin 1808-1809 (Jakobsen 1892, s. 598). Kortini eru hesar keldur sera viðkomandi fyri at meta um motivini hjá Løbner til í samband við kollsigldu avtaluna við Nólsoyar-Páll at sýta honum at hava korn við heimaftur til Føroya.

Í niðurstøðuni verður tað tikið uppaftur sum „ivasom gerð“ (Guttesen 2019, s. 432), at Nólsoyar-Páll fór til Danmarkar við Royndini Fríðu uttan brøvini frá Løbner, uttan at tað verður nevnt, 1) at hevði Nólsoyar-Páll góðtikið treytirnar hjá Løbner, hevði hann ikki kunnað tikið korn við aftur til Føroya, har hungursneyð hótti, 2) at Løbner óttaðist fyri, at Nólsoyar-Páll fór at selja kornið í Føroyum bíligari enn einahandilin, 3) at Løbner helt tað vera ótrygt at senda skjøl til Danmarkar við Nólsoyar-Pálli, sum hann ikki hevði álit á, og tí heldur vildi útseta at senda brøvini, um ein møguleiki kom við einum skipi hjá einahandlinum, 4) at Løbner 27. juni, tá ið samráðingarnar við Nólsoyar-Páll endaðu (Guttesen 2019, s. 314 og 397), var kunnugur við, at Wilhelmine Frederikke hjá Kongaliga einahandlinum var komin til Føroya við 500 tunnum av kornfarmi, 5) at Løbner tá avgjørdi ikki at senda skjølini við Nólsoyar-Pálli, og 6) at Nólsoyar-Páll ikki fór til Danmarkar eftir korni fyrr enn 29. juni, tá Løbner visti, at Svarrer var komin til Føroya við skipi hjá einahandlinum við korni.

Eg veit ikki, um høvundurin hevur skjalprógv og grundgevingar fyri tí, sum hann skrivar, men eg finni hvørki skjalprógv, ávísing til

nøkur skjalprógv ella grundgevingar í bókini, og tað er ikki gott akademiskt handverk.

Í øllum førum setur Guttesen ikki málið um ta kollsigldu avtaluna millum Løbner og Nólsoyar-Páll inn í tann rætta samanhangin, sum bendir á, at Nólsoyar-Páll hvørki rýmdi frá sínum hungrandi landsmonnum ella frá neyðarrópinum hjá Løbner. Tvørturímóti fór hann eftir korni til sínar hungrandi landsmenn, eftir at Løbner hevði fingið annan og tryggari flutning til síni skjøl. At Nólsoyar-Páll rýmdi frá neyðarrópum og hungrandi landsmonnum tykist vera ein av fleiri nýggjum mytum um Nólsoyar-Páll, sum Guttesen hevur funnið uppá.

Eitt er, at tað verður gjørt uttan keldur, men verri er, at tað verður gjørt við at síggja burtur frá viðkomandi kendum keldum og við at leggja heilt avgerandi brot burtur úr samtíðarkeldum, sum verða brúktar í bókini. Hetta er í veruleikanum at seta fram illgiting um landasvik móti søguligum persóni uttan keldugrundarlag.

Í sama tíðarskeiði, hálvan annan mánað áðrenn Nólsoyar-Páll 29. juni 1808 fór seinasta túrin av Havnini, varð skansin tikin av bretska herskipinum Clio. Eisini her heldur Guttesen, at Nólsoyar-Páll hevði ábyrgdina.

# Nólsoyar-Páll fekk Baugh til at hertaka skansan

Eitt annað dømi er, at Guttesen - fyri at undirbyggja illgiting um, at Nólsoyar-Páll skuldi havt verið orsøkin til, at Baugh kapteynur á bretska herskipinum Clio hertók skansan í Havn 16. mai 1808 - staðfestir, at ein nógv seinni frásøgn, sum bert er at finna hjá Jákupi Jakobsen (Guttesen 2019, s. 340), er faktum – „vit vita … " (Guttesen 2019, s. 349). Sambært keldum frá rættarmáli í London í 1811, sum Guttesen sipar til (Guttesen 2019, s. 340-341), hevði Baugh kapteynur ikki fingið ítøkilig boð úr London um at taka skansan í Havn, men tá hann í Føroyum „received intelligence" um, at skansin var rættiliga sterkur, og at nøkur fíggindaskip lógu í havnini í Tórshavn, helt Baugh tað vera sína skyldu, „if possible," at hertaka og oyðileggja skansan, soleiðis at skansin ikki kundi verða brúktur sum skjól hjá (donskum) fíggindaskipum (Guttesen 2019, s. 341). Hetta upplýsti Baugh í øllum førum í London í 1811 í ákæruriti í einum rættarmáli/trætu um sítt hertøkuvirksemi í Føroyum. Tað er tó vert at leggja merki til, at Baugh í rættinum í 1811 hevði tørv á at verja sína avgerð um at hertaka skansan, og at tað tí er ivasamt, hvussu hetta skal skiljast. Tað verður komið aftur til hetta seinni.

Høvundurin leggur nú fram tann illgruna, at tað var Nólsoyar-Páll, sum gav Baugh hesar upplýsingarnar um skansan og fíggindaskip í Havn, og hetta gjørdi, at Baugh helt seg hava skyldu at taka skansan. Um so er, at Nólsoyar-Páll skuldi havt sagt við Baugh, at skansin var brynjaður til verju við „300 soldátum" og nógvum „ræðuliga stórum

kanónum,“ sum áðurnevnda frásøgn hjá Jákupi Jakobsen vil vera við, fyri at halda Baugh frá at leypa á skansan, so er tað í veruleikanum skeivt at kalla tílík taktisk snildi fyri „lygn“ (Guttesen 2019, s. 342), men lat tað fara. Her er umráðandi at kanna, um hald er í tí, sum Guttesen roynir at grundgeva fyri.

Nú vita vit ikki fyri vist, um Nólsoyar-Páll, sum var umborð á Clio - hóast Guttesen heldur seg „vita“ - skuldi havt fortalt Baugh hasa taktisku søguna um tann væl varda skansan í Havn, og enn minni vita vit nakað um, at søgan so fekk ta óhepnu ótilætlaðu avleiðing, sum hann bendir á. Men sambært Guttesen „brynjaði“ Løbner 5. mai 1808 skansan til eina veruliga „orrustu,“ t.e. at skansin heilar 11 dagar undan hertøkuni var fyrireikaður til at verja Havnina móti Clio (Guttesen 2019, s. 361). Tað tykist í hesum høpinum undranarvert, at Løbner 4. juni, aftan á at hann 16. mai yvirgav skansan, skrivaði til rentukamarið, at „blev man her, uden at formode sig noget fjendtligt, pludselig angrebet af en engelsk overlegen Magt“ (Guttesen 2019, s. 359). Serliga tá tað tykist vera rættiliga víst, at Løbner longu 3. mai hevði fingið at vita frá Nólsoyar-Pálli, at Clio var bretskt herskip (Guttesen 2019, s. 343 og 360-361), t.e. fíggindaskip - mundi tað ikki vera tí, at Løbner „brynjaði“ skansan til „orrustu„? Tað var v.ø.o. - júst sum Jákup Jakobsen sigur frá - Nólsoyar-Páll, sum sendi boðini um bretska fíggindaskipið til Havnar, ið fingu Løbner til at brynja skansan til veruliga orrustu við Clio. Undranarvert tykist tað eisini í hesum sambandi, at Løbner, tá Clio 15. mai kom á redina í Havn, sendi meira enn ein triðing (12) av skansamanningini út á Clio, har allir vórðu tiknir til fanga, soleiðis at einans 21 mans vóru eftir á skansanum. Tað varð enntá sendur ein bátur afturat út á Clio við fólki, sum vórðu tikin til fanga av Baugh. Longu í samtíðini undraðust fólk á hesar gerðir hjá Løbner og avgerð hansara at yvirgeva skansan.

Týski ferðamaðurin úr Kiel, Carl Julian Graba, sum ferðaðist í Føroyum í 1828 og hevði fingið frásøgnina um yvirgevingina av skansanum frá føroyingum, kallar í dagbók frá ferðini frásøgnina, sum Guttesen ikki tykist kenna, „merkwürdig“ (Graba 1830, s. 27)

og bendir á, at yvirgevingin var so eyðmýkjandi, at ikki varð tosað um hana. Í enskari bók frá 1841, sum Guttesen heldur ikki her sipar til, verður frásøgnin søgd at vera heldur „apocryphal“ (Nicol 1841, s. 334). Báðir halda, at søgan er so løgin, at teir ivast í, um hon er sonn, men báðir tykjast greiða neyvt frá hendingini, og nevna t.d. bátarnar, sum Løbner sendi út á skipið, har manningarnar vórðu tiknar til fanga, og at Løbner yvirgav skansan, uttan at nakað kanónskot varð latið av. Møguliga hevur Nicol frásøgnina frá Graba, sum hann hevur á bókmentalistanum, men hendan frásøgn er í øllum førum so mikið gomul, at føroysk tjóðskaparfólk ikki kunnu havað skapt hana í seinnu helvt av 1800-talinum - søgan hevur livað millum fólk síðan 1808 og er eisini fortald fyri útlendskum ferðamonnum, sum vitjaðu Føroyar.

Her eru fleiri atfinningarsamir spurningar at seta, men Guttesen er so áhugaður í at finna feilir, sum onnur, ið hava skrivað um skansatøkuna, hava gjørt, og at rættvísgera avgerðina hjá Løbner at yvirgeva skansan, at hann tykist gloyma at seta atfinningarsamar spurningar til gerðirnar hjá Løbner. Tað kunnu vit so gera her: Var tað so klókt at senda tveir bátar við fólki út á Clio, soleiðis at skansin var illa mannaður, tá Løbner visti, at Clio var fíggindaskip? Er tað haldbar frágreiðing, sum Løbner eftir skansatøkuna sendi til rentukamarið, tá hann segði álopið kom óvæntað og brádliga, tá hann 11 dagar frammanundan hevði gjørt skansan til reiðar til „orrustu“ við tað bretska fíggindaskipið? Og hvussu ber tað til, at Guttesen einki ger burtur úr, at Løbner sambært somu frágreiðing upplýsti fyri rentukamarinum, at Clio hevði eina manning upp á umleið 200 og 18 32 punds kanónir (Nolsøe 1963, s. 136), tá tølini sambært Guttesen eru 115 og 16? (Guttesen 2019, s. 349). Kunnu vit so hava álit á Løbner, tá hann upplýsti fyri rentukamarinum, at 100 mans umframt gíslarnir komu í land av Clio fyri at hertaka skansan – Guttesen og aðrar bókmentir hava neyvari, lægri og - í mun til samlaðu manningina á Clio sambært Guttesen – nógv sannlíkari tøl, t.d. 44 mans (Guttesen 2019, s. 366 og 454 - eisini Ræder 1852, s. 91 og West 1969, s. 140)? Hvør man tað nú vera, sum yvirmetir

ella undirmetir styrkina á Clio, og hví kan tað vera? Og hvørja keldukritiska grundgeving hevur Guttesen til at hava so stórt álit á søguni hjá Jákupi Jakobsen, at hann metir seg kunna brúka hana til at undirbyggja illgiting sína um, at tað var Nólsoyar-Páll, sum fekk Baugh til at taka skansan? Og um so er, at søgan er sonn, hevur Guttesen grundarlag til at halda, at tað var Nólsoyar-Páll, sum fekk Baugh til at taka avgerðina um at taka skansan?

Nei, tað hevur hann ikki, heldur tvørturímóti, skal grundgevast fyri her.

Í fyrsta umfari ber til at spyrja, um Baugh við sínum 115 monnum og 16 kanónum, 8 í hvørjum borði, hevði sett sær fyri at tikið skansan, um hann visti, at hann varð vardur av 300 monnum og minst 21 kanónum. Her skulu vit leggja merki til, at Baugh sambært frágreiðingini í sambandi við rættarmálið í London í 1811 einans helt tað vera sína skyldu at taka skansan „if possible" (Guttesen 2019, s. 341). Talan var v.ø.o. sambært hesi frásøgnini hjá Baugh ikki um treytaleysa avgerð. Tí er tað ivasamt, um Baugh yvirhøvur hevði sett sær fyri at taka skansan, um hann metti seg fara at fáa ella fekk harða mótstøðu. Eitt sindur avdúkandi er tað í hesum sambandi, at Guttesen heldur, at tey, ið hava skrivað um Nólsoyar-Páll, m.a. Jákup Jakobsen, geva honum „ein serligan autoritet" (Guttesen 2019, s. 352), tá hann sjálvur vil vera við, at ein skipari á einum bretskum herskipi skuldi havt tikið avgerð um at taka ein væl vardan skansa í Havn einans við støði í upplýsingum frá Nólsoyar-Pálli, einum tilvildarligum bónda í Norðoyggjum, sum hann møtti við árabáti norðanfyri. Her er tað Guttesen, sum mótvegis Baugh gevur Nólsoyar-Pálli ein serligan myndugleika, sum í sjálvum sær er rættiliga ósannlíkur. Harumframt benda keldur á, 1) at Baugh ikki metti skansan vera so sterkan, sum Nólsoyar-Páll sambært Jákupi Jakobsen hevði fortalt honum, og 2) at hann tók skansan, tá tað vísti seg at vera „possible."

Guttesen hevur í veruleikanum sjálvur funnið og gagnnýtt fyrstahonds frásøgn frá einum av teimum sivilu havnarmonnunum, sum fóru umborð á Clio, ið stríðir ímóti hansara egnu illgiting, men tað sær Guttesen ikki. Mótvegis Baugh, skiparanum á Clio, upplýsti

havnarmaðurin, at støddin á manningini, sum vardi skansan, var nakað væl størri, enn hon í veruleikanum var - t.e. 100 hermenn heldur enn rættara talið 33 (Guttesen 2019, s. 360, 364). Eftir spurningunum at døma bendir heldur einki á, at Baugh frammanundan hevði fingið aðra vitan um skansan, í øllum førum ikki vitan um, at 300 hermenn vardu skansan, sum Jákup Jakobsen upplýsir í frásøgnini um Nólsoyar-Páll, tí eftir at havnarmaðurin hevði svarað 100 mans, svaraði Baugh 80 (Guttesen 2019, s. 340 og 364). Viðvíkjandi talinum á kanónum á skansanum, sum Nólsoyar-Páll sambært frásøgnini hjá Jákupi Jakobsen ikki hevði upplýst nakað ítøkiligt um, svaraði hesin havnarmaðurin upp á fyrispurning frá Baugh, at 12 kanónir vóru í tí niðaru røðini, meðan hann ikki visti, hvussu nógvar vóru í tí ovaru røðini. Hetta má skiljast soleiðis, at dagin fyri, at skansin varð tikin, fekk Baugh á Havnarvág upplýsingar um, at 100 mans vardu skansan, meðan hansara egna meting var, at talið á monnum mundi vera nakað væl lægri (ella kanska skal hetta skiljast soleiðis, at hann metti talið vera 80, eftir at hann hevði tikið 20 mans til gíslar). Viðvíkjandi talinum á kanónum á skansanum tykist Baugh hava fingið á leið tað rætta talið, 21 kanónir. Upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli um, at manningin á Havnarskansa var 300, kunnu tí - um søgan yvirhøvur er sonn - illa hava fingið Baugh til at taka avgerð um at hertaka skansan, tá hansara meting stutt undan hertøkuni var, at væl niðanfyri 100 mans mannaðu skansan. Tíðarbilið millum 3. mai, tá Løbner fekk boðini frá Nólsoyar-Pálli um tað bretska fíggindaskipið, sum Nólsoyar-Páll fáar dagar frammanundan hevði verið umborð á og avdúkað at vera bretskt, og 15. mai, tá Clio kom á Havnina, ger tað harumframt í sjálvum sær rættiliga ósannlíkt, at nakað er í illgrunanum hjá Guttesen um, at Nólsoyar-Páll var orsøkin til, at Baugh avgjørdi at taka skansan. Harafturímóti tykist tað greitt, at tey fólk, sum - møguliga við boðum frá Løbner - vórðu send út á Clio, tá ið hon 15. mai kom á Havnina, góvu Baugh skeiv - t.e. yvirmett - tøl á monnum, sum vardu skansan. Illgrunin hjá Guttesen um óhepna leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í sambandi við tøkuna av skansanum hevur sostatt einki grundarlag í nøkrum keldum. Tvørturímóti er

hansara illgruni enntá í stríð við hansara egnu keldur. Hetta er ikki sambæriligt við eitt háttalag, sum miðar eftir at seta fram mest sannlíku frágreiðingina. Hetta eru rætt og slætt illgitingar. Keldurnar upplýsa einki um, hvaðani Baugh fekk tær upplýsingar, sum gjørdu, at hann avgjørdi at taka skansan. Fyrstahonds keldur upplýsa hinvegin, at menn, sum Løbner sendi út á Clio 15. mai, mótvegis Baugh eisini gjørdi manningina á skansanum nakað størri, enn hon var, meðan lítið grundarlag er fyri at halda upp á, at Baugh fekk hesar upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli. Hann átti bert heiðurin av, at Løbner 11 dagar frammanundan fekk upplýsingar, ið gjørdu, at hann kundi fyrireika skansan upp á at verja Havnina.

Tað eru fleiri aðrar grundir til, at illgrunin hjá Guttesen um ein óhepnan leiklut hjá Nólsoyar-Pálli er rættiliga ósannlíkur. 28./30. apríl,[14] helst stutt fyri, at Nólsoyar-Páll fyrst í mai var umborð á Clio, var - sum Guttesen eisini upplýsir - manningin á einum loðsbáti umborð á Clio, og 15. mai vóru tveir - kanska tríggir - bátar hjá Clio. Harumframt kunnu aðrir bátar, sum vit einki vita um, hava verið hjá Clio í tíðarskeiðinum. 1) Guttesen tykist í hesum sambandi ganga út frá, at Baugh fekk upplýsingarnar um styrkina á skansanum frá *antin* Nólsoyar-Pálli *ella* loðsbátinum (Guttesen 2019, s. 342, 349) og velur at kasta sín illgruna á Nólsoyar-Páll orsakað av nevndu frásøgn hjá Jákupi Jakobsen (Guttesen 2019, s. 346, 348, 349); men tað er meira sannlíkt, at Baugh, sum í øllum førum longu 28. apríl - t.e. *áðrenn* Nólsoyar-Páll var umborð - sjálvur hevði lagt merki til tann varda skansan í Havn (Guttesen 2019, s. 346), hevði fregnast um styrkina á skansanum hjá øllum, sum hann var komin í samband við, soleiðis sum tað eisini er skjalfest í samtíðarkeldum hjá Guttesen (Guttesen 2019, s. 347 og 364). 2) Guttesen sigur, at „vit einki vita um," hvat manningin á loðsbátinum, sum 28. og/ella 30. apríl varð umborð á Clio í so rúma tíð, at hon bæði fekk stundir til at eta og drekka umborð (Guttesen 2019, s. 348), „hava sagt" umborð

---

14 Skansaprotokollin upplýsir 28. apríl, at skansamanningin fór út til Clio 28. apríl fyri at loðsa skipið yvir á Skálafjørðin. Tann 1. mai verður aftur sipað til hendingina í sambandi við, at skansamanningin hevði verið umborð, men tá verður víst til 30. apríl. Tað er møguligt, at Clio kom aftur 30. apríl, men tað kann vera, at skeiv dagfesting er skrásett 1. mai.

(Guttesen 2019, s. 349). Hansara egnu samtíðarkeldur, sum hann í hesum høpi ikki ger nýtslu av, upplýsa hinvegin, at Baugh beinleiðis hevði spurt skansamanningina um „Castellets Styrke og Mandskab“ (Guttesen 2019, s. 347).[15] Vit mugu tí ganga út frá, at spurningurin um styrkina á skansanum hevur verið umrøddur umborð – og at tað var Baugh, sum hevði tikið hendan spurningin upp. Tá manningin á loðsbátinum helt, at Clio, sum hevði franskt flagg, var franskt (Guttesen 2019, s. 345-346), t.e. sameint við Danmark,[16] hava teir kanska eisini verið sinnaðir til at givið Baugh upplýsingar um skansan, kanska enntá rættar upplýsingar um skansan. 3.) Í hesum sambandi er tað áhugavert, at vit heldur einki vita frá nøkrum keldum um, at orsøkin til, at Baugh gjørdi av at hertaka skansan í Havn var, at hann hevði fingið yvirmettar upplýsingar um styrkina á skansanum í Havn, soleiðis sum Guttesen bara tykist ganga út frá. Tað kunnu eins væl vera upplýsingar, sum lógu tætt at veruligu styrkini, sum fingu hann at taka avgerð um at taka skansan í Havn. Tann *treytaða* ætlanin hjá Baugh - t.e. „if possible“ - um at taka og oyða skansan, bendir eisini greitt á tað borðið. Samtíðarkeldur hjá Guttesen benda eisini á, at Baugh 15. mai 1808 hevði eina meira realistiska vitan um styrkina á skansanum. 4) At enda kann nevnast, at vit heldur ikki vita nakað frá keldunum um, nær Baugh tók avgerð um at taka skansan. Guttesen tykist her halda, at einans upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli *ella* loðsbátinum kunnu koma upp á tal, men tað eisini er tann møguleiki, at Baugh ikki tók ta endaligu avgerðina fyrr enn 15. mai 1808, tá ið hann, - eftir enn einaferð at hava spurt havnarfólk, sum vóru umborð á Clio, um styrkina á skansanum - orsakað av gerðum hjá Løbner, kundi taka ein triðing av skansamanningini til gíslar, fyri síðan at nýta gíslarnar sum skotverju, tá hann 16. mai fór í land fyri at fáa Løbner til at yvirgeva skansan.

Løbner hevði tá spælt sær øll kort av hondum til Baugh, ið mátti halda tað vera „possible“ at taka skansan, men nógv bendir á, at

---

15 Guttesen vísir her til dagbókina hjá Claus Lund, men tað er ikki rætt. Tann rætta tilvísingin er til Færøes Revolution.

16 Hesin spurningurin verður viðgjørdur seinni. Tað er ikki vist, at teir vistu, at Frakland og Danmark vóru í samgongu.

Baugh longu 28./30. apríl, tá hann spurdi skansamanningina á loðsbátinum, sum var komin umborð á Clio at eta, um styrki og manning á skansanum, hevði ætlanir um at hertaka skansan. Eisini Jákup Jakobsen helt, at undir hesum treytum var best at yvirgeva skansan til Baugh (Jakobsen 1912, s. 137).

Tað tykist í øllum førum greitt, at tað ikki var við støði í upplýsingum frá Nólsoyar-Pálli um, at skansin varð vardur av „300 soldátum," at Baugh 16. mai 1808 fór undir at taka tann til orrustu brynjaða skansan í Havn. Men heldur enn at gagnnýta sínar samtíðarkeldur, setur Guttesen fram, í stríð við samtíðarkeldur, eina heilt nýggja frásøgn - í veruleikanum eina heilt nýggja mytu - um ein sera óhepnan leiklut hjá Nólsoyar-Pálli í samband við hertøkuna av skansanum í mai 1808, einans við støði í seinni upplýsingum í verki frá 1912[17] hjá Jákupi Jakobsen, sum Guttesen annars leggur undir at hava skapt tjóðskaparligu mytuna um Nólsoyar-Páll. Heilt margháttligt verður tað, tá Guttesen í einum øðrum høpi fortelur sínum lesarum, at frásøgnin hjá Poul Johannesen, sum Jákup Jakobsen hevur upplýsingarnar um samrøðuna millum Baugh og Nólsoyar-Páll um styrkina á skansanum frá, er so óálítandi, at hon „má forkastast sum kelda" (Guttesen 2019, s. 340, 343).[18]

---

17 Guttesen (Guttesen 2019, s. 340) vísir til aðru óbroyttu útgávu av bókini hjá Jákup Jakobsens um Nólsoyar-Páll frá 1966, men sama frásøgnin er í 1912 útgávuni (Jakobsen 1912, s. 134) og í ritgerðini frá 1892 (Jakobsen 1892, s. 589).

18 Guttesen vísir til frásøgn hjá Poul Johannesen, bróðursoni Nólsoyar-Pálls, sum var uppskrivað av Sannu Jacobsen og prentað í Varðanum í 1936, men vit mugu ganga út frá, at hann meinar við frásøgnina, sum Poul Johannesen fortaldi Jákupi Jakobsen í Nólsoy í 1885. Spurningurin er so, um nakað er hent við frásøgnini millum 1885, tá ið Sanna Jacobsen skrivaði hana niður á donskum og sendi til Jákup Jakobsen, og 1936, tá ið Sanna Jacobsen læt eina nýskrivaða føroyska uppskrift av samrøðuni við Poul Johannesen prenta í 16. bindi av Varðanum. Tað tykist her mest sannlíkt, at møguligar broytingar í frásøgnini eru hendar áðrenn hon fyrstu ferð varð niðurskrivað, sum Guttesen eisini tykist halda (Guttesen 2019, s. 25-26). Tað sæst eisini av, at frásøgnin um samrøðuna millum Nólsoyar-Páll og Baugh verður fartald á sama hátt av Jakobsen í 1892 (s. 589) og í 1912 (s. 134) og av Johannesen í 1936 (s. 115). Eisini søgan, sum Guttesen brúkar sum ítøkiliga grundgeving fyri, at Johannesen (1936, s. 115) „má forkastast sum kelda" (at Nólsoyar-Páll sá herskipið Clio úr heimi sínum á Borðoynni, men hetta ber sambært Guttesen ikki til, tí Nólsoyar-Páll búði í 1808 á Biskupsstøð, har ikki ber til at síggja út á havið), verður fortald á sama hátt av Jákupi Jakobsen í 1892 (Jakobsen 1892, s. 588). Hesar frásagnirnar tykjast v.ø.o. vera tær somu, uttan mun til um sipað verður til ta donsku útgávuna frá 1885, sum Jákup Jakobsen hevur havt at stuðla seg á í sínum verkum frá 1892 og 1912, ella sipað verður til føroysku útgávuna frá 1936.

Keldugrundarlag hevur Guttesen einki fyri at seta fram hendan illgrunan, men eins og við kornfarminum í Hvalba, so hoyra vit aftur og aftur illgitandi røddina hjá Guttesen (sí t.d. 336, 342, 346, 348, 349, 453-454).

Tað ber eisini til at spyrja, hvør onnur frágreiðing enn, at Baugh ætlaði at taka skansan, kann vera upp á, at hann sigldi millum oyggjarnar við einum bretskum herskipi, sum gav seg út fyri at vera franskt, meðan hann fregnaðist eftir styrkini á skansanum? Bara hetta høpið átti at verið ein greið ábending um, at Baugh síðan hann 28./30. apríl 1808 fyri fyrstu ferð legði merki til skansan í Havn, hevði havt ætlanir um at taka skansan.

Kortini skrivar Guttesen ivaleysur í samandráttinum: „Poul P. Nolsöe went onboard and tried to scare the skipper of the ship, Captain Baugh, by exaggerating the defences of the Fort Skansin. However, this made the English commander believe that it was his bound by duty to eliminate Fort Skansin“ (Guttesen 2019, s. 453-454). Keldukritiskt er hetta ein høpisleys niðurstøða, sum einki grundarlag hevur í nakrari søgufakligari viðgerð av keldum, og hetta er tann einasta frágreiðingin, sum ein ensktmæltur lesari fær um hetta í bókini. Soleiðis kann eingin søgufrøðingur arbeiða við sínum keldutilfari og – haldi eg - villeiða ensktmæltar lesarar. Guttesen umhugsar enntá tann møguleikan, at Nólsoyar-Páll „ikki hevur verið umborð,“ - á Clio - „men bara sæð skipið burturfrá“ (Guttesen 2019, s. 351), sum beinleiðis er í stríð við ta avgjørdu ensku niðurstøðuna.

Nakað annað er, at skal frásøgnin hjá Poul Johannesen takast í álvara, sum Guttesen her ger, so kann hon í sjálvum sær heldur ikki brúkast til tað, sum Guttesen brúkar hana til. Eitt er, at Guttesen ikki hevur megnað at knýtt upplýsingarnar, sum Nólsoyar-Páll sambært frásøgnini frá 1885 skuldi havt givið Baugh, at avgerðini hjá Baugh at taka skansan, men nakað annað er, at Guttesen heldur ikki bara kann taka upplýsingar burtur úr samrøðuni millum Nólsoyar-Páll og Baugh, og so síggja burtur frá samanhanginum, sum Poul Johannesen setti samrøðuna í. Poul Johannesen innleiðir samrøðuna við at upplýsa, at „Hann“ – Nólsoyar-Páll – „fataði straks, at teir

ætlaðu at taka skansan“ (Johannesen 1936, s. 115) og síðan gav hann Baugh upplýsingar um 300 hermenn og nógvar ræðuligar kanónir, sum vardu skansan. Ein samanhangur, sum afturvísir illgitingini hjá Guttesen um óhepna leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli, tí Baugh sambært frásøgnini – uttan mun til um hon er álítandi ella ikki – áðrenn hann tosaði við Nólsoyar-Páll, 1) kendi til skansan í Havn og 2) hevði ætlanir um at taka skansan. Soleiðis brúkar Jákup Jakobsen eisini hesa frágreiðingina hjá Poul Johannesen í báðum sínum ritum (Jakobsen 1892, s. 589 og 1912, s. 134). Skansaprotokollirnar skjalprógva harumframt, at tann fyrra upplýsingin hjá Poul Johannesen (frá 1885) er ein álítandi samtíðarupplýsing, meðan havnarmaðurin, sum í 1808 skrivaði Færøes Revolution, har tað verður upplýst, at Baugh longu tá hann hitti Nólsoyar-Páll „havde noget i sinde“ (Færøes Revolution), týðiliga tykist stuðla undir ta seinnu upplýsingina. Hesin havnarmaðurin staðfestur í veruleikanum eisini fyrru upplýsingina, tá hann upplýsir, at Baugh „spurte ham“ – Nólsoyar-Páll – „om garnisonens stÿrke etc.“ Men óheft av, um upplýsingar í einum teksti verða mettir at vera søguliga álítandi ella ikki, er tað ein uppgáva hjá einum søgufrøðingi at skilja tekstin, meðan tað søgufakliga er ósakligt bara at velja ávísar upplýsingar burtur úr samanhanginum í tekstinum og so gagnnýta tær í øðrum høpi til eitt annað endamál. Ein søgufrøðingur eigur sjálvandi ikki at byggja sína frágreiðing á upplýsingar, sum ikki eru keldukritiskt kannaðar, men søgufrøðingar noyðist eisini at skilja samanhangin í tekstinum, sum upplýsingarnar eru partur av, tí samanhangurin er avgerandi fyri, hvussu upplýsingar kunnu brúkast. Guttesen ger hvørki. Hann byggir sína frágreiðing um ein sera óhepnan leiklut hjá Nólsoyar-Pálli í sambandi við hertøkuna av skansanum á 1) upplýsingar í eini nógv seinni frásøgn, sum hann í hesum høpi ongantíð viðger keldukritiskt, men í einum øðrum høpi annars staðfestir má vrakast sum kelda, og 2) hann tekur nevndu upplýsingar úr einum teksthøpi, sum heilt týðiliga stríðir ímóti hansara egnu nýtslu av upplýsingini. Og tað ger hann uttan nakrantíð at umrøða ella viðgera teksthøpið, sum nevndu upplýsingar eru partar av. Samtíðarkeldur stuðla hinvegin Poul Johannesen, sum setur

samrøðuna millum Nólsoyar-Páll og Baugh í tað høpið, at Baugh - áðrenn hann tosaði við Nólsoyar-Páll - kendi til skansan og longu tá ætlaði at taka skansan.

Tað er eitt sindur trupult at skilja tað keldukritiska skilvísið í hesum hátti at viðgera søguligar keldur uppá, og uttan mun til trúvirðið á frásøgnini, hevur Guttesen einki keldugrundarlag yvirhøvur fyri niðurstøðuni.

Tað eru nógvar mytur um Nólsoyar-Páll, men havi eg skilt hetta rætt, so er tað, at Nólsoyar-Páll skuldi havt fingið Baugh til at hertaka skansan, enn ein heilt nýggj myta um Nólsoyar-Páll, sum Guttesen hevur skapt.

Tað verður ikki nógv betri, tá Guttesen roynir at verja avgerð hjá Løbner um at yvirgeva skansan til Baugh, men fyrst skulu vit hyggja at eini frásøgn um nøkur donsk skip, sum skuldu havt ligið á Havnini í apríl-mai í 1808, og skuldi havt verið ein grund til, at Baugh kapteynur avgjørdi at taka og oyðileggja skansan í Havn.

# Nólsoyar-Páll gav Baugh upplýsingar um fíggindaskip á Havnini

Sum nevnt varð eisini upplýst í rættinum í London í 1811, at Baugh, meðan hann í apríl-mai 1808 sigldi við Clio millum oyggjarnar í Føroyum, skuldi havt „received intelligence“ um, at „some enemy´s vessels“ lógu á Havnini, og at hesir upplýsingar vóru grundin til, at Baugh sambært vitnisfrágreiðing í London helt tað vera sína skyldu at taka og oyða skansan (Guttesen 2019, s. 341). Guttesen illgitir nú, at Nólsoyar-Páll kundi verið keldan, sum gav Baugh upplýsingar um skansan og skipini, ið fingu hann at taka avgerð um at taka skansan, men hann leggur hvørki fram eina álítandi samtíðarkeldu ella skjalprógvar hvørji fíggindaskipini í Havn vóru. Illgitingina um, at Nólsoyar-Páll eisini skuldi havt upplýst fyri Baugh „that some enemy´s vessels were lying in Tórshavn“ hevur Guttesen heldur ikki úr seinni frásøgn hjá Poul Johannesen, sum hann í øðrum sambandi heldur „má forkastast sum kelda“ – her sæst eingin heimild yvirhøvur, men talan er einans um eina illgiting.

Hetta tykist uppaftur løgnari, tá Løbner í frágreiðing til rentukamarið, sum er dagfest 4. juni 1808, upplýsti, at einki skip var komið til Føroya úr Danmark síðan fyrst í oktober 1807, tá ið Royndin Fríða kom til Føroya við korni (Guttesen 2019, s. 336), og at tað næsta skipið úr Danmark ikki kom á Havnina fyrr enn 5. juli 1808 (Guttesen

2019, s. 298), t.e. nakað væl eftir, at Baugh 16. mai 1808 hertók og oyðilegði skansan. Tað lá valla heldur nakað skip í Havn, meðan Clio sigldi millum oyggjarnar, tí 20. mai 1808 var Løbner so trýstur av fleiri havnarfólkum og hungursneyðini, sum hótti í Føroyum orsakað av, at einki skip var komið úr Danmark síðan fyrst í oktober 1807, at hann kendi seg noyddan ella trýstan til at seta seg í samband við Nólsoyar-Páll fyri at fáa sent boð til Danmarkar um neyðstøðuna í Føroyum (Guttesen 2019, s. 307). Løbner hevði ongan annan møguleika, tí einki annað skip enn Royndin Fríða var í Føroyum, sum hann kundi senda boðini til Danmarkar við (Nolsøe 1963, s. 138). Tað vóru v.ø.o. eingi skip komin úr Danmark til Føroya síðan fyrst í oktober 1807, og heldur eingi (donsk) skip lógu á Havnini, meðan herskipið Clio sigldi millum oyggjarnar í apríl-mai 1808.

Hetta visti Baugh óivað eisini, tí hann hevði tríggjar ferðir, 28. apríl, 3. og 15. mai 1808 siglt so tætt fram við Havnini, tær seinnu ferðirnar heilt tætt at skansanum, at hann má hava sæð, at eingi skip lógu í Havn. Eisini hevði Baugh 28. apríl tosað við manning á loðsbátinum, sum í rúma tíð hevði verið umborð á Clio og etið og drukkið.[19] Hetta sæst eisini av, at keldurnar einki upplýsa um, at Baugh skuldi havt rænt, kannað ella bara fregnast eftir nøkrum (donskum) skipum, ið skuldu havt ligið í Havn 16. mai 1808. Hvørki í frágreiðingum hjá kommandantinum til rentukamarið (Nolsøe 1963, s. 135-141) ella í øðrum samtíðarkeldum verður eitt orð nevnt um hesi fíggindaskipini. Tvørturímóti tykjast samtíðarkeldur skjalprógva, at eingi skip lógu á Havnini í viðkomandi tíðarskeiði. Tey nevndu fíggindaskipini, sum skuldu havt ligið á Havnini í apríl-mai 1808, kunnu illa hava havt nakran leiklut í avgerðini hjá Baugh at taka skansan, tí hann visti, at eingi skip lógu á Havnini.

Heldur ikki skansaprotokollirnar vita um nakað annað skip enn herskipið Clio, sum var á Havnini í apríl-mai 1808, og sambært dagbókini hjá Claus Lund, vóru øll skip, sum vóru komin á Havnina í tíðarskeiðinum frá mai 1807 til juni 1808, farin av Havnini longu

19 Samtíðarkeldurnar eru sum nevnt ikki heilt samdar um dagarnar, men tað hevur ongan týdning í hesum sambandi.

5. september 1807. Einasta undantakið var Royndin Fríða, sum kom til Føroya fyrst í oktober 1807 og fór av aftur Havnini 29. juni 1808, men tað vit vita, var hon ikki í Havn í apríl-mai (Guttesen 2019, s. 297-299).[20] Heldur ikki dagbókin hjá Claus Lund, sum hevur neyvar upplýsingar um skip, sum komu á Havnina í hesum tíðarskeiðinum – eisini um Royndina Fríðu – upplýsir eitt orð um, at Royndin Fríða skuldi verið komin á Havnina í tíðarskeiðinum. Fyrstu ferð Nólsoyar-Páll sambært dagbókini kom á Havnina summarið 1808 var 4. juni. Skuldi Royndin Fríða kortini havt ligið í Havn onkran dagin í apríl-mai 1808, so var ikki talan um „vessels," og valla man Nólsoyar-Páll hava verið tann, sum um so var skuldi havt upplýst fyri Baugh, at „fíggindaskip" lá á Havnini. Yvirhøvur tykist tað ósannlíkt, ella rættari, mótstríðandi, at ein, sum royndi at forða fyri, at Baugh tók skansan (t.d. Guttesen 2019, s. 348), samstundis skuldi havt givið Baugh upplýsingar um, at fíggindaskip lógu í Havn. Upplýsingar um, at donsk handilsskip lógu á Havnini, sum bretsk herskip og kaparar – privat skip, sum høvdu loyvi frá ríkinum til at taka skansar og skip hjá fíggindum (Guttesen 2019, s. 401) - høvdu rætt til at taka, kundu bert økja um møguleikan fyri, at skansin varð álopin.

Hetta hongur tí ikki rættiliga saman, uttan so at talan skuldi havt verið um ein part av somu taktisku ætlan - bluffi - hjá Nólsoyar-Pálli at royna at ræða Baugh frá at taka skansan við følskum upplýsingum um, at donsk og/ella fronsk *herskip* við hermonnum og kanónum lógu á Havnini og vardu tann frammanundan so sterka skansan í Havn. Men hetta er bara heimildarleys giting, sum heldur ikki tykist vera stuðlað av Baugh, tá hann í rættinum í London í 1811 einans brúkti tað vanligu orðingina „skip," „some enemy's *vessels*" – t.e. neyvan herskip. Samanhangurin, at Baugh var í økinum kring Føroyar fyri

20 Okkurt bendir kortini á, at Nólsoyar-Páll var í Havn áðrenn og/ella beint eftir, at Baugh 16. mai 1808 hertók skansan, men mest sannlíkt var hann ikki komin til Havnar við Royndini Fríðu – bert eitt átta- og tíggjumannafar verða nevnd í hesum og í øðrum sambandi 1. juni 1808, tá ið Nólsoyar-Páll eisini var í Havn (Jakobsen 1912, s. 133-134, Johannesen 1936, s. 115 og Nolsøe 1963, s. 141). Einki verður nevnt í dagbókini hjá Claus Lund, sum vanliga nevnir skip á Havnini, um, at Royndin Fríða í 1808 kom á Havnina fyrr enn 4. juni, tá ið sipað verður til tað, og Guttesen bendir á, at Royndin Fríða lá á vetrarlegu norðuri í Vági, tá handilsskipini komu (Guttesen 2019, s. 299), og okkurt bendir tí á, at tað er rætt.

at taka donsk handilsskip, sum komu við vørum úr Eysturindia, tykist eisini benda á, at hann í rættinum í London sipaði til donsk handilsskip. Heldur ikki Guttesen ella onnur, sum hava viðgjørt hesar keldur, tykjast vera komin til ta niðurstøðu, at Baugh kann hava sipað til donsk herskip, tí tey brúka bert heilt vanligar orðingar sum „Skibe i Havnen," „donsk skip" og „danske Fartøjer" (Guttesen 2019, s. 342, 374), sum illa kunnu sipa til danskar kaparar ella donsk herskip.

Hendan tulkingin vildi harumframt 1) gjørt tað taktiska „bluffið" hjá Nólsoyar-Pálli uppaftur ósannlíkari og heimildarleyst og 2) gjørt tað enn ósannlíkari, at Baugh, um hetta vóru upplýsingarnar, sum hann hevði fingið um hernaðarligu styrkina á skansanum, avgjørdi at royna at taka skansan. Aftur at hesum kemur, at Baugh sambært samtíðarkeldum, áðrenn hann fór undir at taka skansan, hevði aðrar og meira realistiskar upplýsingar um styrkina á skansanum og mátti vita, at eingi (donsk) skip yvirhøvur lógu í Havn. Eisini tykist tað ivasamt, hvussu tann óvirkna orðingin hjá Baugh, „received intelligence" (*fingið* vitan um), skal skiljast, tí hon verður eisini knýtt saman við „that the said island being a place of considerable strength as well as of advantage of the enemy." Tað er ikki óhugsandi, at onkur føroyingur kundi havt roynt at *ræða* Baugh frá at taka skansan við at yvirmeta styrkina á honum, men tað ber illa til at ímynda sær, at sami/nakar føroyingur eisini skuldi havt upplýst fyri Baugh, at skansin var ein *fyrimunur* hjá bretska fíggindanum – hjá dønum og fraklendingum. Tað hevur heldur ikki verið neyðugt at tosa við nakran fyri at koma til hesa niðurstøðuna. Harumframt vita vit, at Baugh eisini sjálvur sigldi fram við skansanum og fregnaðist eftir upplýsingum – t.e. ikki bert óvirkin fekk, „received," upplýsingar - um skansan frá øðrum. Samanumtikið tykist tað ósannlíkt, at nakar føroyingur skuldi havt givið Baugh upplýsingar um, at skip hjá bretska fíggindanum lógu á Havnini, og heldur ikki eru nakrar kendar keldur, sum geva nakrar ábendingar um, at Nólsoyar-Páll skuldi havt gjørt tað.

Heldur ikki vóru nøkur (fígginda) skip á Havnini tá. Claus Lund skrivaði í dagbók sína, at 28. apríl 1808 „Saaes det første Skib i dette Aar, en armeret Snow, fransk Flag, men kom ikke ind paa Havnen"

(Guttesen 2019, s. 346). Hann sipaði til bretska herskipið Clio, ið sigldi við fronskum flaggi millum oyggjarnar. Løbner upplýsti í eini frágreiðing til rentukamarið, sum er dagfest 4. juni 1808, at „vi ingen Efterretning fra Danmark havde erholdt, siden forrige October Maaned med Hr. Nolsöe“ (Guttesen 2019, s. 296). Tað ber illa til at fáa hesar samtíðarupplýsingarnar at samsvara við tað, at nøkur (donsk) skip yvirhøvur lógu á Havnini í apríl-mai 1808.

Spurningurin er tí, hvaðan frásøgnin um, at „Captain *Baugh*, whilst cruising of the *Faroe Islands*, received intelligence that some enemy's vesels were lying in *Thorshavn*“ (Guttesen 2019, s. 341), sum Baugh upplýsti í ákæruritinum í rættinum í London í 1811, stavar frá, 1) tá hon ikki er at finna í øðrum samtíðarkeldum, 2) tá eingi (donsk) skip lógu á Havnini millum oktober 1807 og juli í 1808, og 3) tá ið Baugh óivað visti, at eingi (donsk) skip yvirhøvur lógu í Havn nevnda tíðarskeið. Ella øðrvísi, hvaðani er frásøgnin komin og nær og við hvørjum endamáli er hon íspunnin? Tað ber illa til at ímynda sær, at skansamanningin, sum var umborð á Clio 28. apríl 1808, ella Nólsoyar-Páll, sum var umborð fyrst í mai 1808, skuldu havt nakað motiv til at fortalt Baugh nakra líknandi søgu, sum ikki hevði hald í veruleikanum. Tvørturímóti hevði Nólsoyar-Páll, sum hevði avdúkað, at Clio var bretskt herskip, alt fyri eitt sent boð um fíggindaskipið til kommandant Løbner, soleiðis at hann kundi fyrireika skansan upp á at verja Havnina. Heldur ikki finst nøkur kelda, sum bendir á, at nakar av teimum skuldu havt fortalt Baugh nakað líknandi, og eingin sannlík frágreiðing er upp á nakað motiv. Her verður sæð burtur frá tí seinni varðveittu frásøgnini um ´tað taktiska bluffið` hjá Nólsoyar-Pálli viðvíkjandi styrkini og kanónunum á skansanum, sum í sjálvum sær heldur ikki er stuðlað av samtíðarkeldum, tá ið skip hjá bretskum fíggindum á Havnini ikki eru partur av hesi frásøgnini og illa fáast at samsvara við frásøgnina. Ja, tesan hjá Guttesen um, at Nólsoyar-Páll skuldi havt fortalt Baugh, at skip hjá bretskum fíggindum lógu í Havn, sum illa kann skiljast øðrvísi enn, at Nólsoyar-Páll skuldi havt *eggjað* Baugh til at taka skansan, tykist stríða ímóti tesini um óhepna leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli, tá hann royndi at *ráða* Baugh frá at taka skansan.

Baugh, sum varð fyrstur at fortelja søguna, hevði hinvegin motiv til at siga frá søguni um skip hjá bretskum fíggindum á Havnini í 1808 fyri rættinum í London í 1811, har træta millum hann og Hompesch um rættin til vørurnar í Havn varð tikin upp til endaligan dóm. Hompesch barónur varð fyrst í juni 1808 komin á Havnina við Salamine fyri at ræna handilin fyri handilsvørur, sum bretski skiparin Baugh, - ella rættari bretska krúnan – sambært yvirgevingarsáttmálanum millum Baugh og Løbner frá 16. mai 1808 helt seg hava allan rættin til.

Ein ikki óhugsandi frágreiðing um upprunan til hesa søguna tykist vera, at Baugh, sum var skipari á einum bretskum herskipi, móti rættinum í London (dómur 26. januar 1811), har træta um hansara hertøkuvirksemi í Havn varð viðgjørd, hevur mett seg hava tørv á at grundgeva væl fyri avgerðini um at taka og oyða skansan í Havn, sum lítlan týdning hevði fyri krígsførsluna. Baugh hevði, sum tað sæst av rættarmálinum, heldur ikki fingið boð úr London um at taka og oyða skansan. At advokatar hjá krúnuni akkurát í hesum spurningi hava havt tørv á at styrkja um løgfrøðiliga grundarlagið undir gerðum hjá Baugh í Havn sæst eisini óbeinleiðis av, at mótparturin hjá bretsku krúnuni og Baugh, t.e. verjar hjá Hompesch, í rættinum í London brúktu akkurát omanfyrinevndu vitnisfrágreiðing sum grundgeving fyri, at Baugh „had acted without any authority from his government … and consequently that their property“ - t.e. almenna ognin í Føroyum - „was open to the attack of any other British cruiser“ (Edwards 1815, s. 104-105). Tað fingu verjar hjá Hompesch ikki viðhald í í London (Hompesch tapti rættarmálið), men uttan „intelligence“ um „some enemy´s vessels“ á Havnini, sum vórðu vard av einum skansa, høvdu atsóknirnar hjá Baugh í Havn neyvan verið eins væl grundaðar í hansara skyldum sum skipari á bretskum herskipi. Tað er týðiligt av samanhanginum, at Baugh mótvegis rættinum í London við upplýsingunum um fíggindaskipini royndi at grundgeva fyri, hví hann metti tað vera sína skyldu - „duty“ - um møguligt at taka skansan. Baugh var ikki farin til Føroya fyri at taka skansan, men mest fyri at taka donsk handilsskip á Eysturindialeiðini. Tí er ikki óhugsandi, at Baugh fyri rættinum í London upplýsti, at hann, meðan hann sigldi

við Clio millum oyggjarnar, hevði frætt, at nøkur skip hjá bretskum fíggindum lógu á Havnini, sum varð vard av einum sterkum skansa. Og at hesi „enemy´s vessels“ vóru ein grund til, at hann helt seg hava „duty to capture the said island if possible,“ hóast hann visti, at eingi (donskt) skip lógu í Havn. Men „intelligenche“ um „enemy´s vessels“ á Havnini kundu í 1811 stuðla avgerðina hjá Baugh um at leypa á ein skansa, sum síðan vísti seg at verja ein hungursraktan bý, sum var so illa fyri, at hann ongan herfong tók (Guttesen 2019, s. 378).[21] Baugh hevði sambært bretskari lóg rætt til at taka „any fortress upon the land“ (Edwards 1815, s. 113), men skip hjá fíggindum Bretlands í Havn gjørdu hansara sak betri í rættarmálinum móti Hompesch. Hesi skip gjørdu tað beinleiðis til hansara skyldu at taka skansan í Havn. Tað er trupult at finna nakra aðra sannlíka frágreiðing um upprunan til bretsku frásøgnina um „fíggindaskipini“ á Havnini, sum - hóast søgan í sjálvum sær ikki er ósannlík - er í stríð við tær óheftu og viðkomandi samtíðarkeldurnar.

Tað er ikki óhugsandi, at Baugh hevur fingið hugskotið um donsku skipini í Havn frá Hompech, sum í brævi til bretska handilsmálaráðharran Lord Hawkesbury (1729-1808) 25. august 1808 vardi seg og sínar gerðir í Havn og m.a. nevndi „a Danish Vessel, which lay there … (the Rainden Frija)“ (sí West 1969, s. 145). Løbner váttaði í skjali, sum er dagfest 12. juli 1808, at Nólsoyar-Páll júst var komin til Havnar 1. juni, akkurát meðan ruðuleikin við Hompesch stóð uppá, og at hann fór til Suðuroyar 4. juni (Nolsøe 1963, s. 144, 147). Í hesum sambandi er tað ikki so avgerandi, at tað heldur ikki er heilt vist, at Royndin Fríða lá á Havnini 1. juni 1808, tí okkurt kundi bent á, at Royndin Fríða ikki kom á Havnina hetta árið fyrr enn 4. juni - meira um hetta seinni. Her er nóg mikið at gera vart við, at sambært skjølum í London, sum Baugh eigur at hava sæð í sambandi við rættarmálið, upplýsti Hompesch at „a danish Vessel“ 1. juni 1808, t.e. eftir at Baugh var farin, lá á Havnini.

21 Her skal viðmerkjast, at í sambandi við rættarmálið í London í 1811 verður upplýst, at „Part of the public property was carried on board the Clio, and Captain Baugh sailed soon afterwards …,“ (Edwards 1815, s. 102) men talan hevur helst í høvuðsheitum verið um t.d. hondvápn og krút av skansanum, sum Guttesen eisini upplýsir í hesum sambandi.

Tað er kanska meira sannlíkt, at skansamanningin, sum var umborð á Clio 28. ella 30. apríl 1808 og tosaði við Baugh um skansan, hevur fortalt honum, at skansin vardi handilin og donsk handilsskip, sum komu til Føroya við vøru. Í øllum førum vita vit frá samtíðarkeldum, at Baugh hevði spurt manningina um styrkina á skansanum. Sambært skansaprotokollini helt skansamanningin, at talan var um eitt franskt skip. Um so var, at manningin visti, at Frakland og Danmark vóru í samgongu, kann hon eisini hava tosað opnari við Baugh enn Nólsoyar-Páll, sum visti, at herskipið var bretskt og hevði okkurt í kvittanunum. Í London kann Baugh so í sambandi við nevnda rættarmál hava orðað seg soleiðis, at hann hevði frætt, at (donsk) skip *lógu* á Havnini. Tað er hinvegin lítið sannlíkt, at skansamanningin - uttan mun til um hon helt skipið vera franskt ella enskt - kann hava givið Baugh ósannar upplýsingar um, at (donsk) skip *lógu* á Havnini, men skuldi onkur havt gjørt tað, so mugu vit ganga út frá, at Baugh, uttan mun til hvat hann fekk at vita, visti, at *eingi* skip lógu í Havn.

Tað tykist hinvegin rættiliga sannlíkt, at Baugh fyrst og fremst umhugsaði at hertaka og oyða skansan fyri at forða fyri, at hann kundi gagnnýtast sum skjól hjá donskum handilsskipum, m.a. tílíkum, sum sigldu millum Eysturindia og Danmark. Hetta kann síggjast sum eitt natúrligt framhald av virksemi hansara at taka donsk eysturindiaskip. Guttesen dugir ikki at síggja hendan samanhangin. Tvørturímóti vil hann vera við, at tað „onga meining" gevur, at Baugh, sum var úti eftir eysturindiaskipum, avgjørdi at taka skansan (Guttesen 2019, s. 340), men tað er møguliga tí, at Guttesen er meira upptikin av at finna ein leiklut til Nólsoyar-Páll. Tað er í øllum førum ikki torført at síggja eina „meining" í, at Baugh, uttan upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli ella nøkrum føroyingum, hevði ætlanir um at taka og oyðiliggja skansan. Harumframt benda samtíðarkeldurnar týðiliga á, at Baugh, áðrenn hann norðanfyri hitti Nólsoyar-Páll, umhugsaði at taka og oyðileggja skansan.

Tað tykist ikki, sum Guttesen hevur hugsað um, at frágreiðingin hjá Baugh frá 1811 til rættin í London kann skiljast uppá meira enn ein máta, men grundin er ikki tann, at hann ikki hevur atgongd til tær

keldur, sum vísa, at eingi (donsk) „fíggindaskip“ lógu á Havnini í apríl-mai 1808, t.e. meðan Clio sigldi millum oyggjarnar. Guttesen hevur allar upplýsingar, men hann gagnnýtir tær ikki í hesum sambandi. Í staðin heldur hann, við støði í eini danskari bók frá 1852, sum í hesum førinum tykist byggja á frágreiðingina frá rættarviðgerðini í London í 1811, at „Baugh hevði væntað at funnið“ „Skibe i Havnen,“ tí hann hevði „erholdt Underretning om“ at „danske Fartøjer“ „skuldu liggja í Havn“ (Guttesen 2019, s. 374). Í samanhanginum tykist tað týðiligt, at her er aftur ein tilsiping til Nólsoyar-Páll, sum verður lagdur undir at hava fortalt fyri Baugh kapteyni, at (donsk) fíggindaskip lógu á Havnini, men einki í samtíðarkeldunum bendir á, at nakar føroyingur skuldi havt fortalt honum nakað tílíkt, ella at Baugh - heldur ikki um onkur skuldi havt fortalt honum hetta - í apríl-mai í 1808 „hevði væntað“ at funnið donsk skip í Havn. Baugh fregnaðist sambært samtíðarkeldum ongantíð eftir hesum skipum, mest sannlíkt tí at hann frá sínum fregnartænastuarbeiði visti, at eingi skip lógu á Havnini. Í London hevði hann hinvegin brúk fyri at stuðla avgerð síni um at taka ein skansa, sum lítlan týdning hevði. Heldur ikki tykist Guttesen yvirhøvur hava umhugsað at viðgera spurningin, um tað hongur saman, at sama persónur, sum royndi at verja skansan móti álopi við at *ræða* Baugh, gav Baugh upplýsingar um fíggindaskip í Havn, sum bert – í øllum førum soleiðis sum m.a. Guttesen tykist tulka tekstin - kundu havt *eggjað* Baugh til at leypa á Havnina. Hetta hongur rættiliga illa saman, og heldur ikki eru nakrar keldur, sum stuðla hesum.

Her er eisini talan um eina søgu, sum Guttesen hevur skapt uttan grundarlag í egnum samtíðarkeldum, og tað eru tílíkar illgrunavekjandi framsetingar, ið seiglívaðar søguligar mytur kunnu og ofta verða skaptar av. Kanska hevur Guttesen kelduprógv fyri tí, sum hann skrivar, men um so er eru tey ikki at finna í bók hansara. Tvørturímóti sær hann burtur frá keldum, sum hann hevur atgongd til, og sum stríða ímóti hansara illgruna.

Ein háttur at givið tesuni meining kundi sum fyrr nevnt verið at gingið út frá, at Nólsoyar-Páll royndi at ræða Baugh frá at taka

skansan við *bæði* at geva honum nógv yvirmettar upplýsingar um styrkina og kanónirnar á skansanum *og* billa honum inn, at donsk herskip lógu á Havnini. Onkuntíð kann ósamsvar í eini framseting tulkast burtur, men tað ber ikki til at tulka alt ósamsvar burtur uttan at koma í stríð við keldurnar. Hendan tulkingin skapar eisini aðrar stórar trupulleikar: 1) eingin kelda upplýsir, at Nólsoyar-Páll skuldi havt fortalt fyri Baugh, at nøkur skip hjá fíggindum Bretlands lógu á Havnini, 2) heldur ikki upplýsti Baugh fyri rættinum í London í 1811, at talan var um herskip, 3), skuldi Baugh havt fingið upplýsingar um, at fleiri donsk herskip lógu á Havnini, sum harumframt varð vard av einum sterkum og væl vardum skansa, so er tað ósannlíkt, at hann einsamallur og uttan boð ella stuðul úr London fór undir at taka skansan, 4) eingi skip lógu á Havnini, meðan Baugh var í Føroyum, 5) Baugh visti mest sannlíkt, áðrenn hann tók skansan, at einki skip lá í Havn, 6) upplýsingar um fíggindaskip í Havn vóru valla grundin til, at Baugh tók avgerð um at taka skansan í Havn, og 7) Baugh hevði í London í 1811 motiv til at orða søguna um (donsku) fíggindaskipini, sum *lógu* á Havnini.

Mest sannlíkt umhugsaði Baugh longu 28. apríl, sum samtíðarkeldur benda á, at taka skansan, tí hann kundi brúkast sum skjól hjá donskum handilsskipum, m.a. teimum, sum hann sjálvur var á havleiðini kring Føroyar fyri at taka. Tí sigldi hann millum oyggjarnar í meira enn tvær vikur, eftir at hann 28. apríl hevði lagt merki til skansan, og fregnaðist eftir neyvari upplýsingum um, hvussu sterkur hann var, manning og kanónir. Tað er í veruleikanum eisini tað, sum Baugh upplýsti fyri rættinum í London í 1811, tá ið hann segði, at skansin var ein fyrimunur hjá bretskum fíggindum. Hann krydrar hesa nærum sjálvsøgdu niðurstøðu, sum tað illa ber til at seta spurnartekin við, við upplýsing um, at skip hjá bretskum fíggindum *lógu* á Havnini, men tann søgan fæst ikki at samsvara við viðkomandi samtíðarkeldur, og mest sannlíkt visti Baugh, at eingi skip lógu í Havn.

Her er umráðandi at gera vart við, at meðan Guttesen uttan nakað viðkomandi keldutilfar roynir at skapa eitt idealistiskt og persónssøguligt grundarlag fyri, at Nólsoyar-Páll var orsøkin til,

at Baugh fór undir at taka og oyða skansan, bendir tann størri samanhangurin og viðkomandi samtíðarkeldur á, at Baugh, áðrenn hann kom í samband við Nólsoyar-Páll, hevði ætlanir um at taka skansan, og at grundirnar einki høvdu við Nólsoyar-Páll at gera. Nólsoyar-Páll var bara ein av teimum, sum Baugh fregnaðist eftir upplýsingum frá um skansan, men eingin av teimum var orsøkin til, at Baugh avgjørdi at taka og oyðileggja skansan. Orsøkirnar eru sum so ofta rættiliga samansettar frágreiðingar og knýta seg eisini at tí størra strategiska kontekstinum.

Frásøgnin um breggið hjá Nólsoyar-Pálli mótvegis Baugh um ta øgiligu styrkina og tær ræðuligu kanónirnar á skansanum hevur øll eyðkenni av at vera ein seinni skapt myta, men tað er frásøgnin um, hvussu Løbner gav yvir skansan til Baugh, ikki. Frásøgnin um ræðuskítin Løbner, ið yvirgav skansan uttan at lata skot av, er eins gomul sum skansatøkan í 1808. Hesa søguna, sum einki hevur at gera við Nólsoyar-Páll, hevur Guttesen tó hildið vera neyðuga at umrøða og gera upp við í eini bók um Nólsoyar-Páll. Í hesum døminum, sum nú skal umrøðast nærri, hevur tað sostatt ikki eydnast Guttesen at finna nakran - óhepnan - leiklut til Nólsoyar-Páll, men hann hevur hildið tað vera neyðugt at verja Løbner móti sínum vánaliga eftirmæli.

# Tað var rætt av Løbner at yvirgeva skansan

Guttesen byggir beinleiðis sína illgiting um, at Nólsoyar-Páll fekk Baugh til at taka skansan á ta sannroynd, at Baugh ikki hevði fingið nøkur boð úr London um at taka skansan, men skotski vísindamaðurin George Stuart Mackenzie (1780-1848), sum var jarðfrøðingur og var í Føroyum í 1812, upplýsti í 1822 (Mackenzie 1822, s. 96-97), at Baugh í 1808 varð sendur til Føroya við Clio, og at skansin varð hertikin og oyðilagdur, soleiðis at hann ikki kundi brúkast sum skjól hjá (donskum) kaparum. Her tykist Mackenzie møguliga geva ábendingar um, at Baugh varð sendur til Føroya fyri at hertaka skansan í Havn. Í tí sambandi bendir Guttesen á, at tað einasta rætta hjá Løbner var at yvirgeva skansan (Guttesen 2019, s. 366), tí hevði tað eydnast at verja hann, høvdu bretar óivað sent ein sterkari flota til Føroya fyri at taka hann (Guttesen 2019, s. 368-369). Er tað rætt, sum skotski jarðfrøðingurin møguliga gevur ábendingar um, at Baugh hevði fingið boð úr London um at taka og oyðileggja skansan, er hendan tulkingin møguliga væl grundað. Tað hevði hann bara ikki, sum Guttesen sjálvur grundgevur fyri. Mackenzie skrivar heldur ikki beinleiðis, at hann hevði fingið líknandi boð, hóast teksturin kann tulkast soleiðis (Guttesen 2019, s. 368). Hetta merkir hinvegin, at nýtslan hjá Guttesen av søguligum keldum er inkonsistent og keldukritiskt veik - tað ber illa til at blása og hava mjøl í munninum.

Tað er beinleiðis inkonsistent (mótstríðandi) av Guttesen at brúka tvey mótstríðandi uppáhald, sum bæði ikki kunnu vera sonn, til at upplýsa, hvørji boð Baugh hevði fingið frá stjórnarmyndugleikunum í Bretlandi, og so brúka tey til at verja tvey ymisk sjónarmið - í fyrra lagi illgrunan (niðurstøðuna) hjá Guttesen um ein óhepnan leiklut hjá Nólsoyar-Pálli í sambandi við hertøkuna av skansanum og í øðrum lagi sjónarmiðið, at Løbner gjørdi tað einasta rætta, tá hann, uttan at lata skot av, yvirgav skansan til Baugh (Guttesen 2019, s. 368-369). *Antin* hevði Clio ikki fingið boð úr Bretlandi um at taka skansan, og so *kunnu* upplýsingar frá m.a. Nólsoyar-Pálli hava fingið Baugh til at hertaka skansan (men so var tað einans Baugh og Clio, ikki ta samlaðu bretsku hermegina, sum Løbner skuldi verja skansan í Havn ímóti) *ella* hevði Baugh fingið boð úr Bretlandi um at hertaka skansan, og so kunnu tey afturlítandi vera við til at rættvísgera, at Løbner gav skansan yvir, uttan at nakað skot varð latið av (men so kann skansahertøkan *ikki* hava nakað við t.d. Nólsoyar-Páll ella upplýsingar frá nøkrum øðrum føroyingum at gera). Bæði uppáhaldini kunnu ikki passa, tey útihýsa hvørjum øðrum, og tey kunnu tí ikki brúkast til at grundgeva fyri báðum sjónarmiðunum: 1) at tað t.d. var Nólsoyar-Páll, sum fekk Baugh til at taka skansan, og 2) at hevði Løbner ikki yvirgivið skansan, hevði hann sett seg upp ímóti samlaðu bretsku hermegini, soleiðis sum Guttesen í royndini tykist halda. Tað er inkonsistent. Í veruleikanum eru bæði uppáhaldini skeiv: 1) Tað var, sum grundgivið fyri omanfyri, ikki Nólsoyar-Páll, sum hevði givið Baugh upplýsingarnar, ið fingu hann at taka skansan, og 2) Baugh hevði ikki fingið nøkur boð við sær frá admiralitetinum í London um at hertaka og oyða skansan í Havn, sum Guttesen eisini viðurkennir. Tað merkir hinvegin ikki, at Baugh ongar ætlanir – „no intention“ - hevði um at taka skansan, tá hann kom til Føroya og legði merki til hann við innsiglingina í Havn, sum Guttesen vil vera við (Guttesen 2019, s. 453).

Tað skal viðmerkjast, at Guttesen sjálvur sáar iva um tulkingina av Mackenzie, at Baugh hevði fingið boð úr London um at taka skansan, men hann endar kortini nevnda brot við at endurgeva úr bók, sum

grundgevur við støði í Mackenzie, og tað stendur tí sum ein parts niðurstøða í bókini, at mótstøða hevði verið nyttuleys (Guttesen 2019, s. 369). Tað er kortini ikki tað, sum áður nevndu keldur hjá Guttesen upplýsa í hesum føri.

Ein onnur grundgeving hjá Guttesen er, at Baugh skuldi havt hótt við „at brænde Byen af" (Guttesen 2019, s. 364), um Løbner ikki yvirgav skansan. Guttesen heldur, at hesin „setningur" er avgerandi fyri at skilja valið hjá Løbner: „antin at yvirgeva seg til eina militera yvirmakt ella lata býin ræna og brenna í grund." Nevndi „setningur" kann kortini illa hava ligið til grund fyri avgerðini hjá Løbner um at yvirgeva skansan, soleiðis sum Guttesen vil vera við. Í fyrra lagi var tað ikki Baugh, sum sambært kelduni segði hesi orðini, men ein av havnarmonnunum, sum 15. mai var umborð á Clio, segði sambært egnari frásøgn við Baugh, at tað vildi ikki vera til nakra nyttu fyri hann „at Brænde byen af." Í øðrum lagi varð hetta sambært kelduni sagt við Baugh umborð á Clio av einum av gíslunum hjá Baugh. Løbner kann tí illa hava vitað nakað um tað, sum varð sagt umborð, fyrr enn hermenn og gíslar vóru komnir í land og hann longu hevði givið skansan yvir. Eingin kelda bendir heldur á, at samskift kann hava verið millum Baugh og Løbner um tílík viðurskifti, fyrr enn skansin var givin yvir. Fyrstu ferð Baugh móti føroyingum beinleiðis gav til kennar, at hann ætlaði at taka skansan, var á Havnarvág 15. mai 1808. Í øllum samskifti frammanundan hevði Baugh brúkt taktisk snildi og fjalt sínar ætlanir mótvegis bæði skansamanning og Nólsoyar-Pálli við at geva seg út fyri at vera fraklending. Eiheldur benda líknandi dømi aðrastaðni frá á, at tílíkar hóttanir skuldu takast fyri nakað annað enn akkuát hóttanir.

Líknandi dømið hjá Guttesen úr Kristiansand í Noregi frá september 1807 (Guttesen 2019, s. 370-371), har kommandanturin á skansanum - hóast hóttanir frá Stopford, skipara á bretska herskipinum HMS Spencer, um at oyða býin og sivilfólkið, um hann gjørdi mótstøðu - læt skot av, tykist heldur ikki stuðla sjónarmiðið hjá Guttesen, at bretar sendu ein sterkari herflota, sum Guttesen grundgevur fyri í sambandi við skansatøkuna í Havn. Bretsku herskipini í Kristinasand, trý í tali,

flýggjaðu, tá ið kanónskot vórðu latin av móti teimum, og bretar komu ongantíð aftur til Kristianssand við einum størri herflota fyri at taka tann sterka skansan, sum varð brúktur sum skjól hjá stórum donskum herskipum, sum lógu í havnini í Kristianssand. Kristianssand og íbúgvarnir í býnum komu sostatt ikki at líða undir „deres fuldkomne Ødelæggelse," sum Stopford hevði hótt við „sikkerligen [vil] blive deres Skæbne, skulde Fjendtlighederne engang begynde." Heldur ikki gjørdu tey bretsku herskipini seg inn á verjuleys støð ella sivilfólk í økinum, tá tey flýggjaðu. Hetta var bæði fyrstu og einastu ferðina, at Christiansholm skansin við Kristinassand var í bardaga. Harumframt er her ein avgerandi munur, at ætlanin hjá Stopford var at taka tað dansk-norska herskipið HDMS Prinds Christian Frederik, sum hevði 70 kanónir og lá í havnini í Kristianssand, meðan einki (fígginda) skip yvirhøvur lá í Havn. Hetta dømi kann í veruleikanum einans stuðla undir, at verjustøðan á Havnarskansa í mai 1808 ikki var so heilt vónleys.

Annað dømi er úr Christiansø við Bornholm í Eystursjónum, har fleiri bretsk herskip í samsvar við ætlanir hjá admiralitetinum í London 24. oktober 1808 fóru undir eitt álop á tann danska skansan á oynni. Hóast fleiri hundrað oyðileggjandi kanónskot regnaðu yvir Christiansø skansan hendan dagin, vardi skansamanningin undir leiðslu av Kohl kommandanti skansan so væl ímóti yvirmentu bretsku hermegini, at bretsku herskipini at enda góvu upp, og skansin varð ongantíð tikin (Voss 2012). Bretsku herskipini vóru so yvirment mótvegis kanónunum á Christiansø skansanum, at manningin hjá Kohl í fyrstuni ikki kundi gera annað enn at fjala seg fyri teimum bretsku kanónskotunum, tí herskipini lógu so langt burturfrá, at tær nógv minnu kanónirnar á skansanum ikki rukku út til tey. Men tá eitt av teimum bretsku herskipunum kom so tætt at skansanum, at kanónirnar rukku, avgjørdi Kohl at lata kanónskot av, og herskipið vendi alt fyri eitt við (Kofoed 1961, s. 186-187). Tey trý bretsku herskipini, sum vóru við í álopinum, rýmdu øll og komu ongantíð aftur. Ein grund til, at bretar ynsktu at taka Christiansø skansan var, at fleiri danskir kaparar, sum høvdu støð har, áhaldandi lupu

á og tóku bretsk handilsskip. Tann eini danski kaparin tók 15 skip upp á bert 10 dagar. Farleiðin millum Bretland og Eystursjógvin var rættiliga avgerandi fyri bretar, sum fingu korn, timbur og nógvar aðrar vørur úr Eystursjóarøkinum. Hóast bumbuálopið varð framt við støði í ætlanum hjá admiralitetinum í London, kom einki nýtt álop á Christiansø skansan, sum varð nógv styrktur eftir bretska álopið. Í veruleikanum var tað fyri at verja farleiðina í Eystursjógvin, at bretar í september 1807 høvdu bumbað Keypmannahavn. Tað tykist tí lítið sannlíkt, at bretar høvdu sent Baugh hernaðarliga hjálp til at taka ein fyri bretsku krígsførsluna rættiliga týdningarleysan skansa í Havn, sum hann enntá ikki hevði fingið nøkur boð úr London um at taka.

Í hesum sambandi kundi eisini verið roknað við, at Guttesen í øllum førum nevndi og kanska eisini viðgjørdi upplýsingar hjá Jákupi Nolsøe, bróður Nólsoyar-Páll, sum upplivdi hendingarnar í mai 1808 og hevur skrivað um hendingarnar. Jákup Nolsøe skrivaði m.a.: „Captainen“ – t.e. Baugh – „forsikrede, efterat Overgivelsen var sket, at hvis ikkun eet skud havde været løst fra Skandsen, vilde han strax have kappet Anker og været gaaet til Søes.“ (Nolsøe 1963, s. 154-155). Tað er undranarvert, at Guttesen ongantíð nevnir hesar rættiliga áhugaverdu og viðkomandi upplýsingar hjá Jákupi Nolsøe, sum hann eigur at kenna. Og samanbera vit við bretsku álopini á Christiansholm og Christiansø, tykjast upplýsingarnar harumframt rættiliga sannlíkar. Nógv bendir eisini á, at vilji var millum hermenn á skansanum at gera mótstøðu móti bretska herskipinum.

Jákup Jakobsen sigur, at skansamanning og havnarfólk „vare opsatte paa at forsvare den“ t.e. skansan, men hann varð yvirgivin „uden mindste Modstand“ (Jakobsen 1892, s. 590). Heldur ikki hetta er ein tjóðskaparlig myta, sum Jákup Jakobsen hevur funnið uppá seinni. Frásøgnin er at finna í samtíðar- og eygnavitniskeldum (Guttesen 2019, s. 365 - eisini Nolsøe 1963, s. 154). Eisini í ferðafrásøgnum er søgan varðveitt. Graba, sum var í Føroyum í 1828, skrivaði soleiðis um støðuna á skansanum, tá Løbner hevði sent 20 mans út á Clio, har teir vórðu tiknir til gísla: „soldátarnir, ið vóru eftir, stóðu við brennandi krúttráð hjá kanónunum og høvdu bestan hugin at lata

skot av; men teir fingu strong boð um at halda seg friðarligar" (Graba 1830, s. 28 – her eftir føroysku týðingini, Graba 1987, s. 30). Ein onnur - fronsk - ferðafrásøgn frá 1839, har havnarborgarar verða nevndir, orðar hetta sama nakað soleiðis: „Íbúgvarnir í Tórshavn vóru argir um tílíkt svik og ynsktu at renna til kanónirnar fyri at luttaka í bardaganum" (Marmier 1839 – egin týðing). Her er við øðrum orðum mest sannlíkt talan um samtíðarfrásagnir, sum hava livað og verið fortaldar á mannamunni eftir hendingina.

Tvørturímóti er Jákup Jakobsen varnari enn hesar eldru ferðafrásagnirnar, sum byggja á føroyskar frásagnir. Meðan Guttesen ongantíð tykist umhugsa, at Løbner kanska átti onkran leiklut í, at skansin varð hertikin, so tykist Jákup Jakobsen halda, at tað neyvan var fyrr enn triðingurin av skansamanningini, sum Løbner 15. mai hevði sent út á Clio, varð tikin til gísla og síðani brúktur sum skotverja í sambandi við hertøkuna, at neyðugt gjørdist at yvirgeva skansan fyri at forða fyri, at bardagi og morð spurdist burturúr (Jakobsen 1912, s. 137). Jákup Jakobsen helt, at tá bretsku hermennirnir 16. mai komu í land við skansamanning og havnarfólki sum skotverju, var best at yvirgeva skansan, men hann fanst at tí, sum Løbner gjørdi í tímunum undan hertøkuni.

Tað sæst eisini, at Løbner mótvegis rentukamarinum í Keypmannahavn tykist hava havt ein ávísan tørv á at rættvísgera sína avgerð um uttan nakra mótstøðu at yvirgeva skansan til Baugh, tá ið hann í frágreiðing síni skrivaði, at álopið 16. mai 1808 kom óvæntað og brádliga. Hetta samsvarar kortini sera illa við, 1) at Løbner longu 3. mai visti, at herskipið var bretskt og 2) at hann 5. mai brynjaði skansan til orrustu við Clio. Tað er tí ikki heilt sannførandi, tá Guttesen roynir at rættvísgera hesar upplýsingar hjá Løbner til rentukamarið við at tulka tær soleiðis, at Løbner helt Clio vera franskt, t.e. „ikki fíggindaskip," tá ið skipið 15. mai kom á redina í Havn við „fronskum flaggi" vundið á stong (Guttesen 2019, s. 359). Harumframt samsvarar hetta hvørki við tað, sum Løbner sjálvur upplýsti fyri rentukamarinum, t.e. einans at herskipið var „engelsk," ella við aðrar samtíðarkeldur hjá Guttesen, sum upplýsa, at skipið „heisede engelsk Flag," tá tað legði seg fyri

akker eina stutta skotlongd frá skansanum í Havn, t.e. áðrenn nakar fór umborð av bátum, sum Løbner sendi til skipið (Guttesen 2019, s. 365 – og Nolsøe 1963, s. 154). Tað er eisini, sum fyrr víst á, sannlíkt, at Løbner mótvegis rentukamarinum yvirmetti hernaðarligu styrkina á Clio og herdeildina, sum 16. mai 1808 gjørdi landgongd í Havn. Hetta bendir á, at heldur ikki Løbner sjálvur var heilt sannførdur um, at tann *veruligi* styrkismunurin millum skansan og HMS Clio í sjálvum sær var ein nøktandi grund til at rættvísgera, at hann yvirgav skansan, soleiðis at Havnin var verjuleys, tá ið Brillumaðurin kom við Salamine á Havnina at ræna Kongaliga handilin. Skansin, sum var brynjaður til orrustu, hevði 21 kanónir vendar móti Baugh, sum kundi venda 8 kanónum í senn móti skansanum. Men skansin var undirmannaður, serliga eftir at Løbner hevði sent heilan triðing av manningini út á Clio, har hon varð tikin til gísla, tí tá varð Løbner settur í eina nærum ómøguliga støðu. Tað visti Baugh, tá ið hann við 44 monnum og føroyskum gíslum fór í land fyri at fáa Løbner at yvirgeva skansan.

Tað er møguligt, at hesar gerðir hjá Løbner, sum einki hevði hoyrt um kríggið, síðan Nólsoyar-Páll í oktober 1807 kom úr Danmark við tíðindum um, at Keypmannahavn var bumbaður av bretum, kunnu rættvísgerast við, at Løbner 15. mai 1808 illa kundi vita, um kríggj framvegis var millum Bretland og Danmark (Guttesen 2019, s. 374). Og tó, Løbner „brynjaði“ skansan til „orrustu,“ tá ið hann fyrst í mai 1808 frætti frá Nólsoyar-Pálli, at Clio, sum skansamanningin hevði verið úti á 28. apríl 1808, var eitt bretskt herskip, sum sigldi undir fronskum flaggi millum oyggjarnar. Tað kundi valla heldur vera nøkur onnur grund til, at bretskt herskip við fronskum flaggi sigldi millum danskar oyggjar, enn at krígsstøða framvegis var millum Danmark og Bretland. Í øllum førum, tá ið hesar upplýsingar gjørdust kendar fyrst í mai 1808 mugu eisini myndugleikar í Føroyum hava vitað, at kríggið enn valdaði. Og hóast myndugleikarnir í fyrstuni hildu, at talan var um franskt herskip, sum manning á loðsbátinum hevði fingið upplýst 28. apríl, ið vardi Føroyar, serliga Havnina, „mod engelske kapere,“ soleiðis sum skiparin á Clio skuldi havt upplýst

fyri Nólsoyar-Pálli fyrst í mai mánað 1808 (Jakobsen 1892, s. 589) og helst eisini fyri skansamonnum á loðsbátinum, hevði eisini tað verið tekin um, at kríggj enn valdaði millum Danmark og Bretland. Eisini tað, at einki skip var komið til Føroya síðan oktober 1807, má hava sannført føroyskar myndugleikar og onnur við um, at kríggið millum Danmark og Frakland helt á.

Guttesen er nakað ógreiður her, men hann heldur, at Løbner „ikki" helt Clio vera „fíggindaskip," tí tað síðan 28. apríl 1808 hevði siglt millum føroysku oyggjarnar og - sambært honum - 15. mai 1808 kom á Havnarvág við „fronskum flaggi" (Guttesen 2019, s. 359), t.e. at tað tykist undirskilt, at hevði herskipið siglt við *enskum* flaggi, so hevði verið talan um eitt fíggindaskip. Her verjir Guttesen umstríddu avgerðina hjá Løbner við eini grundgeving, sum byggir á ta fyritreyt, at Løbner visti, at Frakland var sameint við Danmark í krígnum móti Bretlandi og tess sameindu, meðan hann sær burtur frá tí sannroynd, at hann longu fyrst í mai hevði fingið upplýst frá Nólsoyar-Pálli, at Clio var eitt bretskt herskip, sum er rættiliga avgerandi fyri metingina. Um so var, at Løbner undan hertøkuna visti, at Clio var bretskt fíggindaskip, so fellur verjan hjá Guttesen til jarðar.

Løbner hevði í seinasta lagi 3. mai 1808 fingið upplýst frá Nólsoyar-Pálli, at Clio var eitt bretskt herskip, sum hevði okkurt illgrunavert í kvittanunum, soleiðis sum samtíðarkeldur í samsvari við Jákup Jakobsen upplýsa. Ein av skansamonnunum, sum upplivdi hendingarnar í sambandi við, at skansin varð tikin, hevur orðað seg soleiðis um hetta: „1808. d förste Maj var det som man kunde fornemme at Skib var kommen under Feröe da Skip: *Poul Nolsöe* gik som Bonde og spurte om nÿt, men han gav sig ud for en *Franskmand*, og havde til hensigt at Krÿdse efter Engels manden og spurte ham om garnisonens stÿrke etc., P: Nolsöe sendte strax Brev til Hr. *Commendant Löbner*, hvori han ÿtrede at samme var en Engels Kutterbrig, som havde noget i sinde." (Færøes Revolution). Hesin tekstur er sambært árstali í byrjanini av frágreiðingini helst skrivaður av eygnavitninum longu í 1808. Um hesir upplýsingarnar komu Løbner í hendi fyrst í mai 1808, so kundi hann illa hava verið í iva um, at kríggj framvegis

leikaði millum Danmark og Bretland, og at Baugh longu tá hevði onkrar illgrunasamar ætlanir, ið illa kundu vera annað enn rættaðar móti skansanum. Hetta samsvarar við tað, sum Jákup Jakobsen skrivaði í 1892, og sannlíkt er tí, at í Føroyum vistu myndugleikarnir, tá Clio kom, at krígsstøða var millum Danmark og Bretland. Hetta merkir eisini, at Guttesen fer skeivur, tí Løbner visti, at Clio var bretskt, tá hon kom á Havnina 15. mai 1808. Tað er undranarvert, at Guttesen, sum sjálvur hevur avskrivað samtíðarkelduna (history.fo), ikki endurgevur hendan partin, men í staðin setur spurnartekin við tað, sum hon - enntá í samsvari við aðra samtíðarkeldu (Guttesen 2019, s. 343) - upplýsir (Guttesen 2019, s. 348).

Guttesen tykist *bæði* 1) vilja verja Løbner móti ákærum um, at hann einki gjørdi fyri at brynja skansan til at verja Havnina móti álopi frá tí bretska fíggindanum, við at vísa á, at hann 5. mai 1808 brynjaði skansan til orrustu, *og* 2) vilja rættvísgera, at Løbner 11 dagar seinni, uttan mótstøðu, noyddist at yvirgeva skansan til tann bretska fíggindan, tí hann helt, at talan var um eitt vinarliga sinnað franskt herskip. Men hetta hongur ikki rættiliga saman. Tað ber illa til at verja Løbner móti báðum hesum skuldsetingunum. Harafturat kemur, at skansamanningin kendi aftur herskipið, sum longu 28. apríl 1808 varð komið á Havnina, tá tað aftur vísti seg har uml. 3. mai 1808 (Guttesen 2019, s. 361), so tað kann illa vera komið óvart á Løbner kommandant, tá hetta sama bretska herskipið (sambært Guttesen við fronskum flaggi) kom aftur á Havnina 15. mai 1808. Álopið kom ikki heilt óvart á 15. mai 1808, og skansin var fyrireikaður til at verja Havnina móti bretska herskipinum.

Bretsk herskip undir Napoleonskrígnum vóru í teirra krígsvirksemi og krígsheimildum avmarkað til at taka „any fortress upon the land, or any arms, ammunition, stores of war, goods, merchandize, and treasure belonging to the state, or to any public trading company of the enemies of the Crown of Great Britain upon the land,“ meðan kaparar vóru „restricted to fortified places and fortresses, and to property waterborne“ (Edwards 1815, s. 113). Hevði tað við kanónskotum eydnast Løbner at fingið Baugh til at flýggja av Havnini (soleiðis

sum Jákup Nolsøe upplýsti, at Baugh um *eitt* kanónskot varð latið av, hevði upplýst, at hann hevði gjørt), hevði tað tí ikki verið honum loyvt í staðin at gjørt seg inn á - verjuleys - støð í Føroyum. Og tað er lítið sannlíkt, at Baugh, sum heldur ikki hevði fingið nøkur boð frá admiralitetinum í London um at taka og oyðileggja skansan í Havn, hevði gjørt seg inn á sivil havnarfólk og Havnina, har eingi fíggindaskip lógu og hungursneyð hótti, um Løbner eftir at hava latið kanónskot av hevði yvirgivið skansan, tí eitt endamál við hesum ásetingum var at forða bretskum skipum „of plundering individuals" (Edwards 1815, s. 113). Eisini skiparar við kaparaloyvi skuldu móti dómstólum standa til svars fyri „gældende krigsret" og „lovligheden" í tí, sum teir gjørdu (Guttesen 2019, s. 401). Rætturin hjá bretskum herskipum og kaparum til at gera seg inn á sivilfólk og privata ogn í fíggindalondum var avmarkaður av strongum reglum, sum skuldu verja sivilfólk móti krígnum. Í veruleikanum avgjørdi bretska stjórnin, - formliga kortini ikki fyrr enn 7. februar 1810 - at „Faroe … and the Inhabitants thereof, and the Property therein, shall be exempted from the Attack and Hostility of His Majesty's forces and Subjects" (The London Gazette, 6. februar - 10 februar 1810, s. 189). Í 1812 varð tí avgjørt, at virðið á vørum, ið Hompesch hevði tikið í Havn í 1808, skuldi latast aftur til Føroya.

Tað kunnu vera góðar grundir til, at tað var skilagott av Løbner at yvirgeva skansan til Baugh, uttan at skot varð latið av, men grundgevingarnar, sum Guttesen setur fram, eru ikki sannførandi - onkur er inkonsistent, og eingin stuðlar undir, at øll mótstøða var vónleys. Her fer Guttesen í síni roynd at rættvísgera gerðir hjá Løbner í sambandi við skansahertøkuna langt út um tað, sum hansara samtíðarkeldur kunnu bera. Uppaftur verri verður tað, tá ið høvundurin uttan nakað keldugrundarlag roynir at leggja upp til ein konspiratoriskan, í veruleikanum landsskaðiligan, leiklut hjá Nólsoyar-Pálli, sum verður illtonktur fyri at hava givið Baugh og Hompesch upplýsingar, sum fingu teir at leypa á og ræna Havnina (Guttesen 2019, s. 390, 412, 455).[22] Um

22 Illgiting um landsskaðiliga atferð er eisini týðilig í sambandi við kollsigldu avtaluna við Løbner (Guttesen 2019, s. 314).

leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í sambandi við skansahertøkuna upplýsa keldurnar, at hann avdúkaði, at Clio var eitt bretskt fíggindaskip og gav Løbner boð um tað, so hann kundi fyrireika skansan upp á at verja Havnina.

Sostatt vikna eisini próvgrundirnar fyri, at Løbner gjørdi tað einasta rætta, tá ið hann gav skansan yvir. Tað, sum Guttesen upplýsir um, at skansin longu 5. mai 1808 varð brynjaður til orrustu - Jákup Jakobsen tykist eisini vita tað, tá ið hann upplýsir, at kanónir vóru løddar (Jakobsen 1912, s. 135-136) - ger grundgevingina fyri, at Løbner tók røttu avgerðina, uppaftur veikari. Harumframt er neyðugt at síggja sjálva yvirgevingina sum úrslit av eini longri og samansettari hendingarrøð, har gerðir hjá fleiri pørtum – eisini gerðir hjá Løbner – hava ávirkað tað endaliga úrslitið. Nólsoyar-Páll átti hinvegin ongan leiklut í, at skansin varð álopin og fall, men hann gjørdi tað hann kundi fyri at ávara kommandantin um tann vanda, sum var fyri framman. Í øllum førum er hetta sannlíkt, um søgufrøðingar halda seg til samtíðarkeldur, sum Guttesen leggur fram í bókini.

Avleiðingin av, at skansin, uttan at nakað skot varð latið av, varð yvirgivin til Baugh og síðan oyðilagdur, var, at Havnin var verjuleys, tá ið ránsmaðurin Hompesch fyrst í juni 1808 kom á Havnina við Salamine og rændi einahandilin, men bretska admiralitetið, ið sambært Guttesen hevði sent størri flota til Føroya, um Løbner gjørdu mótstøðu, avgjørdi, at vørurnar, sum Hompesch hevði rænt í Havn, skuldu latast aftur til føroyingar.

Til verju fyri Løbner ber til at siga, at hann illa kundi vita alt hetta í 1808, men tað gjørdi Guttesen í 2019.

Kanska besta grundgeving fyri, at Løbner í samtíðarhøpi tók rætta avgerð, tá hann valdi at yvirgeva skansan til Baugh, uttan at lata eitt skot av, tykist vera, at hann illa kundi vita, um Baugh hevði fingið nøkur boð frá admiralitetinum í London um skansan, men Guttesen visti í 2019, at Baugh *ikki* hevði fingið boð úr London um at taka skansan, og tí er *hansara* grundgeving fyri, at Løbner tók røttu avgerðina stórt sæð óbrúkilig. Í fyrra lagi kann grundgevingin ikki nýtast til *afturlítandi* (retrospektivt) at rættvísgera avgerðina hjá Løbner um at yvirgeva skansan, og í øðrum lagi kann hon enn minni

brúkast til at skilja veruligar gerðir hjá Løbner í *samtíðini*. Tvørturímóti. Hevði Løbner í 1808 vitað tað, sum Guttesen visti í 2019 (at Baugh ikki hevði fingið boð um at taka skansan), so kundi tað - um hann ivaðist - havt fingið hann at tikið avgerð um at lata skot av.

Í hesum spurningi mugu vit kortini ganga út frá, at kommandantarnir á Christiansholm og Christiansø, sum í september 1807 og oktober 1808 tóku avgerð um at verja seg, vóru í somu støðu sum kommandanturin í Havn. Í so máta ber væl til at samanbera hesar støðurnar, kommandantarnar og avgerðirnar, sum teir tóku.

Guttesen finnur ongan óhepnan leiklut til Nólsoyar-Páll í samband við, at Løbner yvirgav skansan til Baugh 16. mai 1808, men hann finnur harafturímóti ein beinleiðis landsskaðiligan leiklut til Nólsoyar-Páll 6. juni 1808, tá ið Hompesch kom aftur á Havnina fyri at ræna. Hetta dømið skal nú umrøðast og viðgerast nærri.

# Nólsoyar-Páll fekk Hompesch at koma aftur á Havnina fyri at ræna handilin

Soleiðis er eisini í bókini, tá Guttesen uttan keldu - í veruleikanum í stríð við tað, sum keldurnar upplýsa - ella motiv bendir á, at tað kundi havt verið Nólsoyar-Páll, sum 6. juni 1808 fekk Hompesch at koma aftur á Havnina fyri aðru ferð - hann kom fyrstu ferð 1. juni uttan at gera ónáðir - fyri at ræna einahandilin, tí her manglar bæði keldugrundarlag og motiv, sum hann eisini viðurkennir (Guttesen 2019, s. 390). Harumframt upplýsir Guttesen sjálvur, at Hompesch sambært nevnda rættarmáli í London á heysti í 1808 m.a. tók 1308 troyggjur frá Nólsoyar-Pálli, sum vóru á goymslu hjá einahandlinum (Guttesen 2019, s. 415).[23] Tað hevði so verið løgið, um hann - í øllum førum tilvitað - skuldi havt givið Hompesch upplýsingar, sum fingu hann til at koma aftur á Havnina 6. juni at ræna einahandilin, og tað eru sum nevnt ongar keldur at byggja illgrunan á.

Hompesch hevði sjálvur upplýst fyri Løbner, at hann hevði fingið upplýsingarnar um vørurnar í handlinum frá einum presti í Norð-

23 Í veruleikanum tók Hompesch ikki vørurnar, men læt tær vera í handlinum, tá Jákup Nolsøe gjørdi hann varugan við, at talan var um privata ogn hjá Nólsoyar-Pálli, men her er viðkomandi, at hann ætlaði at taka tær. West 1969, s. 151.

uroyggjum, meðan Løbner helt, - ja, hann skrivaði beinleiðis, at „det er uden for all Tvivl“ (Guttesen 2019, s. 388-389) - at Skipar Hansen, sum Hompesch, tá ið hann fór av Havnini 1. juni, tók við sum loðs, var tann seki. Tað sær sostatt ikki út til, at Løbner nakrantíð hevði illgruna til Nólsoyar-Páll, og tað sigur kanska ikki so lítið, tá vit vita, hvussu trupul viðurskiftini millum teir vóru blivin um hetta mundið. Guttesen sipar hinvegin til eina nógv seinni frásøgn, sum einans er at finna í eini danskari hernaðarsøgubók frá 1852 hjá danska heryvirmanninum Jacob Ræder (1798-1853), sum ikki tykist hava vitað, at Nólsoyar-Páll seint í 1808 gekk burtur við North Star á leiðini til Føroya. Í bókini upplýsir Ræder, at Hompesch antin hevði fingið hesar upplýsingar frá Skipar Hansen ella „en anden Indvaaner, som drev Fiskeri under Øen.“ Guttesen brúkar nú hesa einsamøllu og nógv seinni upplýsing frá 1852 til at kasta illgrunan á Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 455). Hetta má sigast at vera eitt tunt grundarlag at byggja illgiting um landasvik – tí tað er væl tað, hetta er - á, serliga tá samtíðarkeldur hansara siga nakað annað. Tað sigur kanska ikki so lítið, at Guttesen er sinnaður til at viðganga, at Nólsoyar-Páll „drev Fiskeri“ fyri at fáa sett hendan illgrunan fram ímóti honum.

Hvaðani Jacob Ræder hevur upplýsingarnar um ein „som drev fiskeri“ ber illa til at siga nakað við vissu um, men líknandi orðingar eru at finna í samtíðarkeldunum. M.a. í Færøes Revolution, har havnarmaðurin, sum var vitni til hendingarnar í Havn í mai-juni 1808, skrivaði, at Hompesch og Salamine á veg av Eiði til Havnar 1. juni 1808, t.e. fyrstu ferðina, „Tog tvende Mend fra en fisker baad at de skulde Lose ham til Thorshavn“ (Færøes Revolution). Í frágreiðing frá Løbner til rentukamarið, ið er dagfest 4. juni 1808, verður upplýst, at talan var um „tvende Fiskere fra Midwaag“ (Nolsøe 1963, s. 139). Jacob Ræder tykist hava lisið frágreiðingar hjá Løbner, so hann kann møguliga hava hildið, at nevndu „Fiskere“ kundu havt givið Hompesch upplýsingar um handilshúsini, uttan at gáa eftir, at hesir fiskimenn vóru umborð á Clio, áðrenn skipið fyrstu ferð kom á Havnina. Samtíðarkeldurnar vita hinvegin einki at siga um nakrar aðrar „Fiskere,“ sum komu í samband við Salamine, og sambært

samtíðarkeldum er tað beinleiðis útihýst, at her kann hava verið talan um Nólsoyar-Páll. Uttan mun til, hvussu vit venda hesum, so er tað trupult at síggja nakað samband við Nólsoyar-Páll.

Niðurstøðan er í øllum førum, at Guttesen fer alt ov lætt um sínar keldur, tá hann 1) byggir sína illgiting um ein konspiratoriskan leiklut hjá Nólsoyar-Pálli á bert eina einsamalla og nógv seinni danska frásøgn frá 1852 um ein „som drev Fiskeri under Øen," 2) sum ongastaðni er eyðmerktur at vera Nólsoyar-Páll, 3) samstundis sum hann viðurkennir, at hann einki motiv dugir at síggja (Guttesen 2019, s. 390). Vit kunnu einans ímynda okkum ta vónleysa uppgávu ein ákæri í rættarmáli hevði havt, um hansara uppgáva var á hesum grundarlagi at fáa Nólsoyar-Páll dømdan fyri at hava konspirerað við Hompesch. Kortini staðfestir Guttesen her við støði í hesum fyritreytum, at Nólsoyar-Páll „could easily be construed to be the culprit" (Guttesen 2019, s. 455).[24] Enntá í eini støðu, har bert „tvende Fiskere" úr Miðvági eru nevndir í keldum, samstundis sum vit vita, at samtíðarkeldur siga eina aðra søgu. Hendan hypotesan hjá Guttesen tykist vera eins høpisleys, sum tann undanfarna, har Nólsoyar-Páll verður skuldsettur fyri at hava fingið Baugh til at hertaka skansan. Hetta kann bert brúkast sum enn eitt dømi um, hvussu søgugransking og søguskriving ikki eigur at útinnst.

Tað verður enntá lagt up til, at okkurt loyniligt ella serligt samband skal hava verið millum Nólsoyar-Páll og Hompesch (Guttesen 2019, s. 412), men tað er eitt sindur trupult at fáa eyga á, hvørjar grundgevingarnar eru fyri hesum illgrunanum. Harafturímóti er tað í hesum sambandi eitt sindur løgið, at einki verður upplýst um, at Hompesch sambært bæði Emilius Løbner og Jákup Nolsøe, t.e. tveimum óheftum eygnavitnum og samtíðarkeldum við rættiliga ymiskum áskoðanum á Nólsoyar-Páll, hevði Nólsoyar-Páll í varðhaldi

24 Tað kann tí ikki annað enn undra, tá ið Guttesen í viðmerking til ummæli av bók síni skrivar: „Møguleikin/hypotesan, at tað var Nólsoyar Páll," – sum fekk Hompesch at koma aftur á Havnina – „verður tí avvíst av mær." (Guttesen 2020). Hasin møguleikin verður týðiliga settur fram í bókini, møgulleikin verður ongastaðni avvístur, men tvørturímóti kemur Guttesen til ta niðurstøðu, at Nólsoyar-Páll lættliga kann útleggjast at vera tann seki/illgerðarmaðurin/brotsmaðurin.

1. juni, tá hann ætlaði at taka hann við Salamine sum loðs, um Skipar Hansen ikki vildi koma við honum (Nolsøe 1963 s. 147 og 155). Tað eydnaðist tó Hompesch, eftir at hava latið trý kanónskot av yvir Havnina, at fáa Skipar Hansen sum loðs, men hetta bendir ikki akkurát á nakað dult samband millum Hompesch og Nólsoyar-Páll. Hinvegin tykist Guttesen gloyma at upplýsa, at samtíðarfólk hildu sambandið millum føroysk embætisfólk (Løbner og Hammershaimb) og fíggindan (Hompesch og Gilpin) vera sera vinarligt (Nolsøe 1963, s. 155).

Heldur ikki er tað vist, at nakar, eftir at Salamine 1. juni var farin av Havnini, kundi havt fortalt Hompesch nýggjheitir um, at handilshúsini í Havn vóru full av vøru, tí tað visti Hompesch sambært eini samtíðarkeldu longu, áðrenn hann 1. juni fyri fyrstu ferð kom á Havnina. Í samtíðarfrágreiðingini frá nevnda havnarmanni, sum upplivdi skansahertøkuna og ránið, verður upplýst, at Hompesch, áðrenn hann kom á Havnina 1. juni 1808, hevði fingið upplýst frá eiðismonnum, at Skansin var tikin, „dog var alt andet uberørt." Guttesen er sjálvur fullvísur í, at her má verða sipað til einahandilshúsini (Guttesen 2019, s. 381-383), men hann ivast tó eitt sindur í hesi samtíðarkelduni, tá Hompesch 1. juni bert segði seg vera komnan á Havnina fyri at biða um loðs. Guttesen tykist ikki hava umhugsað, at Hompech, sum segði seg føra eitt franskt skip, kanska ikki segði allan sannleikan í sambandi við síni ørindi, ella at hann við ella uttan nevndu upplýsingum frá eiðismonnum skjótt hevði lagt merki til, at handilshúsini í Havn stóðu órørd. Skipar Hansen, sum Hompesch segði seg vilja hava við Salamine sum loðs við Noregs strendur, upplýsti í øllum førum sambært Løbner, tá hann (Hansen) fann útav, at Salamine var bretskt kaparaskip, at Hompesch í veruleikanum bert vildi hava ein loðs at loðsa Salamine millum oyggjarnar í Føroyum, meðan hann leitaði eftir donskum eystindiaskipum (Nolsøe 1963, s. 146). Upplýsingar í samtíðarskjølum hjá Løbner benda eisini á, at Hompesch visti meira, enn hann lætst, tí „I Handelen blev Kromboeden" - sambært Løbner - „opbrækket" longu fyrstu ferð Hompesch vitjaði (Nolsøe 1963, s. 147), so tað er neyvan

nøkur grund til at halda, at Hompesch fyrstu ferð hann vitjaði Havnina var óvitandi um, at goymslubygningarnir hjá einahandlinum í Havn stóðu órørdir. Áðurnevnda samtíðarkelda hjá einum havnarmanni upplýsir harumframt, at „Forvalteren med de, som vare med ham i Land, Brækkede Krambode tog alle penge uddaf disken“ (Færøes Revolution). Keldurnar upplýsa sum sæst sostatt ikki, at tað vóru menn hjá Hompesch, sum brutu inn í ella rændu pening og vørur í einahandilinum, men tá Løbner í sama høpinum leggur afturat, at „Det bevæbnede Mandskab viiste sig fortrydelig, at det ej kunde komme til at plyndre“ (Nolsøe 1963, s. 147), so visti manningin á Salamine í øllum førum sambært Løbner, at bæði vøra og peningur var at ræna í Havn.[25] Hvørki Nólsoyar-Páll - sum ongastaðni er nevndur í hesum sambandi - ella onnur tykjast eftir fyrstu vitjanina sambært hesum hava kunnað givið Hompesh nýggjar upplýsingar um vørur í handilinum, sum gjørdu, at Salamine 6. juni 1808 kom aftur á Havnina at ræna. Her mugu helst aðrar frágreiðingar til, enn bert tann sera einfalda, at Hompesch undan ella á fyrstu vitjanini á Havnini 1. juni 1808 ongantíð legði merki til, at handilshúsini hjá einahandlinum stóðu órørd, og at hann ikki fekk frænir av, at vørur og peningur var í handlinum, fyrr enn hann 1. juni var farin av aftur Havnini (Guttesen 2019, s. 455).

Hompesch visti frá eiðismonnum og/ella Løbner, at skansin varð tikin av Baugh, og hann visti helst eisini, at handilin stóð órørdur. Trupulleikin var, at hann eisini mátti vita, 1) at hevði Baugh oyðilagt skansan og tikið Havnina og fingið Løbner at undirskrivað yvirgevingarsáttmála, 2) hevði hann sum bretskur kapari ongan rætt til at gera seg inn privatfólk og privata ogn í Havn, sum nú var óvard, og 3) at almenn ogn í Havn hoyrdi sambært yvirgevingarsáttmálanum til Baugh og bretsku krúnuna. Tað man vera høvuðsgrundin til, at hann hevði roynt at hildið sínar menn frá at ræna Havnini 1. juni 1808, hóast hann má hava vitað, at bæði vøra og peningur var í handlinum.

25 Jákup Jakobsen vil beinleiðis vera við, at 1. juni 1808 „meðan henda leitan“ - t.e. eftir Skipar Hansen - „stóð við, tustu eingilskmenninir í land úr skipinum, brutu inni í húsini og rændu og plindraðu firi hond“ (Jakobsen 1912, s. 145). Hetta sæst ikki av samtíðarkeldum og tað er tí møguligt, at Jákup Jakobsen ella hansara heimildir hava misskilt hetta.

Tað, sum hann kanska ikki visti, var, at almenn ogn – t.e. ogn hjá danakongi – sum sambært yvirgevingarsáttmálanum millum Baugh og Løbner varð ogn hjá bretsku krúnuni, framvegis var í handlinum. Mest sannlíkt var tað okkurt viðvíkjandi hesum ivamálinum, sum hann síðan fekk frænir av, ið at enda fekk hann at venda aftur á Havnina, har hann setti varðhald við handilsbygningarnar hjá handlinum og fór á skrivstovuna hjá Løbner fyri at leita eftir skjølum, yvirgevingarsáttmálanum og øðrum, sum kundi geva honum neyvari upplýsingar um, hvønn rætt hann hevði til at taka bæði vøru og pening við sær til Bretlands.

Samanumtikið kunnu vit siga, at sambært samtíðarkeldum visti Hompesch helst áðrenn ella meðan hann var á Havnini fyri fyrstu ferð, at alt uttan skansin stóð órørt, eftir at Baugh hevði verið har 16. mai. Á veg til Havnar hevði Hompesch sambært samtíðarkeldum tosað við fólk á Eiði, sum fortaldu honum, at alt uttan skansin stóð órørt, og tveir „Fiskere“ úr Miðvági hevði hann eisini tikið umborð á vegnum av Eiði til at loðsa Salamine til Havnar. Í Havn tosaði hann við Løbner, sum greiddi honum frá um yvirgevingina av skansanum til Baugh, og meðan Hompesch royndi at fáa Skipar Hansen við sær sum loðs millum oyggjarnar, brutu fólk inn í krambúðina og tóku bæði vøru og pening. Sambært Løbner visti Hompesch, at vøra og peningur var at ræna í Havn, men Hompesch helt monnum sínum, sum vidu sleppa at ræna Havnina, frá at ræna handilin og Havnina. Tá Hompesch seinni sama dagin, 1. juni, fór av Havnini, hevði hann fingið Skipar Hansen við sær at loðsa Salamine millum oyggjarnar. Nakrar dagar seinni, 6. juni, kom Salamine aftur á Havnina fyri at ræna handilshúsini fyri almenna ogn og pening, sum Hompesch fyri Løbner segði seg hava frætt frá einum presti í Norðoyggjum var í einahandilsbygningunum. Hesa søguna um prestin í Norðoyggjum var Løbner sannførdur um var „en Fabel,“ og Løbner var ivaleysur í, at Hompesch í veruleikanum hevði fingið hesar upplýsingar frá Skipar Hansen. Samtíðarkeldur siga einki annað. Kortini velur Guttesen við støði í danskari frásøgn frá 1852, sum nevnir, at Hompech hevði fingið upplýsingarnar frá Skipar Hansen ella – nýtt í mun til samtíðarkeldur

– frá einum, sum „drev Fiskeri under Øen," at sáa illgruna um, at hesin fiskimaðurin hevur verið Nólsoyar-Páll.

Men trupulleikarnir við tesuni hjá Guttesen eru størri enn so, at hon ikki byggir á keldur. Óivað fyri at gera illgiting sína móti Nólsoyar-Pálli eitt sindur meira sannlíka spyr Guttesen: „hvat gjørdi hann" – t.e. Nólsoyar-Páll – „hasar dagarnar millum 1. og 6. juni? *Royndin Fríða* hevur verið úti nakrar av hasum døgunum, tí tann 4. juni – meðan *Salamine* er burturi – kemur hann á Havnina og fór sama dag til Suðuroyar. Claus Lund skrivar 4. juni: „*Kom Capt. Nolsöe fra Nordøer, sejlede samme eftermiddag til Suderø*." Tað er tí møguligt, at *Salamine* og *Royndin Fríða* hava møtst onkustaðni á leiðini har norðuri." (Guttesen 2019, s. 399). Hóast vit einki vita um tað, so er tað sjálvandi møguligt, at Nólsoyar-Páll og Baugh kunnu hava møtst norðanfyri, men um so skuldi verið, tykist tað ósannlíkt, at ein persónur, sum hevði roynt at forða fyri, at bretska herskipið Clio tók skansan - og tað góðtekur Guttesen (Guttesen 2019, t.d. s. 340) - fýra vikur seinni tilvitað skuldi havt givið bretskum kaparaskipara upplýsingar, sum fingu hann at ræna Havnina. Harafturat kemur spurningurin, um Nólsoyar-Páll var norðanfyri og „drev Fiskeri," tá Salamine 1. juni fór av Havnini. Dagbókin hjá Claus Lund upplýsir ikki beinleiðis, at Nólsoyar-Páll kom á Havnina við Royndini Fríðu hin 4. juni, men vit mugu ganga út frá, at tað er Royndina Fríðu, sum hann sipar til í dagbókini, serliga tá Nólsoyar-Páll sama dag fór víðari til Suðuroyar. Guttesen hevur hinvegin yvirsæð, at Nólsoyar-Páll sambært eygnavitnum, Løbner og Jákupi Nolsøe, var í Havn longu 1. juni (Nolsøe 1963, s. 147, 155), har hann sum nevnt varð hildin í varðhaldi av Hompesch. Hesi eygnavitnini nevna heldur einki um, at Nólsoyar-Páll 1. juni kom á Havnina við Royndini Fríðu, men Poul Johannesen (1797-1893) (Johannesen 1936, s. 116), bróðursonur Nólsoyar-Páll, og Jákup Jakobsen (Jakobsen 1892, s. 592 og 1912, s. 146), sum upplýsa júst tað sama, leggja afturat, at Nólsoyar-Páll kom til Havnar við nólsoyingum, sum vóru farnir úr Nólsoy og norður í Vág við árabáti eftir Nólsoyar-Pálli, tá ið teir frættu, at Hompesch var komin á Havnina við Salamine. Jákup Jakobsen hevur helst søguna

frá Poul Johannesen, sum var 13 ár í 1808, men samsvar er her við samtíðarkeldurnar. Løbner tykist eisini forútseta, at Nólsoyar-Páll ikki var komin til Havnar við Royndini Fríðu 1. juni 1808, tá hann í sambandi við eina umrøðu av Royndini Fríðu orðar seg soleiðis: „Ejeren af nysbemeldte Skib,“ – t.e. Royndini Fríðu – „en ved Navn P. P. Nolsøe, var just i denne Tummel ankommen her til Byen.“ Tað er møguligt, at hetta er grundin til, at Claus Lund ikki hevur viðmerkt nakað í dagbókina hjá sær um, at nakað skip – t.e. Royndin Fríða - kom á Havnina 1. juni, men hetta gevur illgitingini hjá Guttesen eitt nýtt skot fyri bógvin. Um Nólsoyar-Páll var í Havn longu 1. juni 1808, t.e. sama dag sum Hompesch kom á Havnina, og tað mugu vit við støði í hesum keldum ganga út frá er skjalfest, so er enn truplari at hugsa sær, at hann hevði hitt Hompesch „norðanfyri“ millum 1. og 4. juni, tá ið hann - tríggjar dagar eftir, at Hompech fór av Havnini - sambært m.a. Claus Lund fór til Suðuroyar.

Harumframt bendir einki av hesum á, at Nólsoyar-Páll kann hava verið ein, sum „drev Fiskeri under Øen,“ tí sambært keldum fór hann ikki úr Vági til Havnar 1. juni 1808 fyri at reka fiskiskap. Og hann fór til Suðuroyar 4. juni fyri at tosa við teir, sum hann átti Royndina Fríðu saman við um avtaluna, sum Løbner hevði í hyggju at gera við teir um at leiga Royndini Fríðu til at fara skjótan túr til Danmarkar við nøkrum týðandi skjølum.

Hóast Jákup Jakobsen í 1912 upplýsir, at Nólsoyar-Páll fór norður aftur í Vág, eftir at Hompesch 1. juni varð farin av Havnini (Jakobsen 1912, s. 147 – men hann nevnir einki um tað í 1892. Jakobsen 1892, s. 592-593), so upplýsa keldurnar einki um, at Nólsoyar-Páll fór norður aftur til Vágs við onkrum báti, eftir at Hompesch var farin av Havnini 1. juni ella um annar norðoyingur møguliga førdi Royndina Fríðu til Havnar 4. juni, men dagbókin hjá Claus Lund upplýsir tó, at „*Capt. Nolsøe*“ kom á Havnina 4. juni. Hinvegin upplýsti Hompesch í verjuskrivi sínum frá 25. august 1808 í sambandi við, at hann kom á Havnina 1. juni 1808, at Royndin Fríða „lay there“ (West 1969, s. 145). Í hesum samanhangi er tað heldur trupulari at síggja eina grund til, at hann skuldi havt skrivað ósatt her. Hompesch hevði sjálvandi

eins og Baugh motiv til at verja sínar gerðir í Havn, og hann tykist eisini rættvísgera nakað við at sipa til Royndina Fríðu. Hann vísti á, at hann ikki tók Royndina Fríðu, ið hann sum bretskur kapari annars hevði fullan rætt til sambært bretskari lóg (Edwards 1815, s. 113). Tvørturímóti upplýsti Hompesch í skrivinum, at hann eftir umbøn frá Løbner hevði givið Nólsoyar-Pálli og Royndini Fríðu eitt viðmæli, sum alt er rætt. Harafturat kemur, 1) at Hompesch var ítøkiligari enn Baugh, tá ið hann nevndi eitt heilt ávíst skip í Havn (Royndina Fríðu), og 2) samtíðarkeldur vátta, m.a. Løbner sjálvur í frágreiðingum sínum til rentukamarið, at hann (Løbner) í sambandi við kollsigldu leiguavtaluna við Nólsoyar-Páll um at fara ein skjótan túr við Royndini Fríðu til Danmarkar, sum er viðgjørd aðrastaðni,[26] hevði heitt á Hompesch um at geva Nólsoyar-Pálli eitt viðmælisskriv at vísa bretskum kaparum, ið hann møguliga møtti á leiðini til Danmarkar (Nolsøe 1963, s. 140). Heldur ikki kann Hompesch hava lagt merki til, at Royndin Fríða „lay there“ (t.e. á Havnini) nakran annan dag enn akkurát 1. juni 1808. Nólsoyar-Páll fór sambært bæði Lund og Løbner við Royndini Fríðu til Suðuroyar 4. juni og hann kom ikki aftur fyrr enn 10. juni, meðan Hompesch fór av aftur Havnini sama dag, sum hann kom, t.e. 1. juni, og var aftur á Havnini seinnu ferð 6. juni og fór av stað aftur 9. juni. Royndin Fríða lá á Havnini 27. juni, tá Salamine fyri triðju ferð kom á Havnina, men tá var Hompesch ikki sjálvur við Salamine. Heldur ikki lógu, sum grundgivið er fyri aðrastaðni, nøkur onnur skip á Havnini í hesum tíðarskeiðinum.[27] Harumframt var tað júst í sambandi við viðmælið, sum Løbner hevði biðið Hompesch um 1. juni (Nolsøe 1963, s. 140-141), at Hompesch upplýsti, at Royndin Fríða „lay there“ og fekk nevnda viðmælisskrivið frá honum. Tað er ikki so lætt at taka dagar ímillum hesar at síggja til mótstríðandi samtíðarkeldurnar, men tað ber illa til at ímynda sær, at Claus Lund kann hava skrivað skeiva dagfesting í dagbókina, serliga tá Løbner eisini upplýsti, at Nólsoyar-Páll kom á Havnina 4. juni

26 Nólsoyar-Páll rýmdi frá neyðarrópi og hungrandi landsmonnum.

27 Nólsoyar-Páll gav Baugh upplýsingar um fíggindaskip á Havnini.

(Guttesen 2019, s. 313), ella at hann eins og øll onnur enn Hompesch hevði yvirsæð, at Royndin Fríða (eisini) kom á Havnini 1. juni.

Ein møguleiki er, at Hompesch í sambandi við viðmælisbrævið bara hevur gingið út frá, at Royndin Fríða „lay there,“ t.e. í Havn, men tað er ikki lætt at finna nakra grund til at vraka hesa upplýsingina hjá honum. Tó so, Nólsoyar-Páll váttaði 4. november í 1808 fyri rættinum í London, at Gilpin - skiparin hjá Hompesch - ikki tók nakra vøru frá honum, men hann upplýsti samstundis, at Gilpin hevði havt í hyggju at taka vøru hjá Nólsoyar-Pálli - „then lying in the Magazine or Warehouses in Thorshaven“ (sí West 1969, s. 150-151). Nólsoyar-Páll dagfesti ikki hendingina, men hann upplýsti, at hetta var „at the time of the capture of the goods,“ sum bert kann hava verið millum 6. og 9. ella 27. juni, tá ið Salamine fyri aðru og triðju ferð var á Havnini. Fyrstu ferð Salamine var á Havnini, 1. juni, hvørki royndi ella tók Hompesch vørur úr handlinum. Tá Jákup Nolsøe hevði skjalprógvað fyri Gilpin (Hompesch er ikki nevndur), at talan var um privata ogn, læt Gilpin vøruna fáa frið. Er vitnisfrágreiðingin hjá Nólsoyar-Pálli álítandi, kundi hetta bent á, at Hompesch ikki mintist heilt rætt, og møguliga seinni hevur minst ella fortalt tað soleiðis, at Royndin Fríða, sum eftir umbøn frá Løbner fekk eitt viðmæli frá honum 1. juni 1808, eisini lá á Havnini tá. Í øllum førum samsvarar upplýsingin hjá Hompesch um, at Royndin Fríða lá á Havnini 1. juni 1808, ikki við aðrar keldur. Tað er harumframt rættiliga ósannlíkt, at Royndin Fríða, sum ikki kom á Havnina fyrr enn 27. juni fyri at gera klárt til at fara við farmi til Danmarkar, longu 1. juni skuldi havt ligið á Havnini fermd við vørum at hava við á túrinum. Tað er sannlíkari, at vørurnar framvegis lógu í goymslunum hjá einahandlinum, sum Nólsoyar-Páll upplýsti, og at Hompech seinni misskilti Gilpin, sum millum 6. og 9. ella 27. juni ætlaði at taka tær í einahandlinum. Tað er eisini tann møguleiki, at hendingin, sum Hompesch umrøddi í sambandi við, at hann var í Havn 1. juni, í veruleikanum var 27. juni, tá ið bæði Royndin Fríða og Salamine lógu á Havnini. Hetta kann grundast við, at Hompesch, sum ikki var við á hesum túrinum, heldur ikki er nevndur í sambandi við vørurnar hjá Nólsoyar-Pálli, sum Gilpin ætlaði

at taka. Frágreiðingin hjá Hompesch tykist heldur ikki vera nøkur álítandi kelda, og í summum førum – t.d. í sambandi við hertøkuna hjá Baugh av skansanum – er frágreiðing hansara heilt øðrvísi enn í øllum øðrum keldum frá samtíðini, sum siga frá hendingini (sí West 1969, s. 145).[28] Eiheldur stuðla aðrar samtíðarkeldur Hompesch – hvørki dagbókin hjá Lund, frágreiðingar hjá Løbner ella vitnisskjal hjá Nólsoyar-Pálli. Tað ber illa til at siga nakað við vissu, men mest sannlíkt kom Nólsoyar-Páll og Royndin Fríða ikki á Havnina í 1808 fyrr enn 4. juni.

Hompesch hevði sum nevnt eisini orsøk til at verja sína atferð í Havn mótvegis bretskum myndugleikum í sambandi við rættarmálið. Tað er tí ikki óhugsandi, at hann í sambandi við Royndina Fríðu hevur hugsað um vøruna, sum hann (Gilpin) ikki tók í Havn, men av misgáum ella fyri at gera sína søk eitt sindur betri, hevur knýtt hendingina at Royndini Fríðu, sum hann visti skuldi til Danmarkar við einum viðmælisskrivi frá honum. Tað er eisini møguligt, at Royndin Fríða veruliga lá á Havnini 1. juni 1808, meðan grundin til, at Hompesch ikki tók skipið var, at eingin vøra var umborð at taka. Seinni kann hann so hava brúkt hesa søguna mótvegis bretskum myndugleikum sum grundgeving fyri, hvussu hóvliga hann og hansara menn fóru fram í Føroyum.

Akkurát hetta er kortini ikki so avgerandi fyri tann spurning, sum verður viðgjørdur her, tí keldurnar tykjast í øllum førum á einum máli um, at Nólsoyar-Páll var í Havn 1. juni 1808. Samtíðarkeldurnar vita sostatt nakað meira enn Guttesen vil vera við at upplýsa um, hvar Nólsoyar-Páll var nevndu dagar í juni 1808, samstundis sum somu samtíðarkeldur á ongan hátt benda á nakað dult vinarsamband millum Nólsoyar-Páll og Karl von Hompesch – tvørturímóti. Tað ber til at gera eina varna niðurstøðu einans við støði í hesum. Um

28 Hompesch vil vera við, at Baugh í sambandi við hertøkuna av skansanum sendi út neyðarkall og at tað var snildið, ið gjørdi, at Løbner sendi tveir bátar við skansamanning og havnarfólki út á Clio fyri at hjálpa. Hompesch segði seg hava søguna frá Løbner, men hon er ikki at finna í øðrum kendum samtíðarkeldum, m.a. hvørki hjá Løbner, Jákupi Nolsøe ella í Færøes Revolution. Tað tykist týðiligt, at talan er um eina íspunna roynd hjá Hompesch at seta Baugh í ringt ljós í London, eins og hann roynir at seta seg sjálvan í gott ljós. Frágreiðingin kann ikki brúkast uttan serlig keldukritisk atlit.

Hompesch skáksigldi millum oyggjarnar og leitaði eftir donskum eysturindiaskipum, eftir at hann 1. juni fór av Havnini, har hann hevði fingið loðs, ber illa til at ímynda sær, at Hompesch, eins og Guttesen bendir á, kann hava verið í sambandi við Nólsoyar-Páll norðanfyri hesar dagar – í øllum førum ikki 1. juni. Og tá Nólsoyar-Páll ikki fór av Havnini til Suðuroyar fyrr enn 4. juni, og Hompesch kom aftur 6. juni, so fækkast møguleikarnir nakað fyri, at Royndin Fríða og Salamine hava møtst. Hompesch nevndi heldur einki um hetta í síni frágreiðing til bretar, har hann annars nevndi Royndina Fríðu, sum hann gav eitt viðmæli at hava við á ferðini til Danmarkar.

Her kann leggjast afturat, at einasta kelda, sum bendir á, at Salamine fór norðureftir, tá hon fór av Havnini 1. juni, er Løbner, ið upplýsti frá Hompesch, at hann hevði frætt tíðindini um vørurnar í einahandlinum frá einum presti í Norðoyggjum, men hesa frágreiðingina var Løbner sjálvur sannførdur um var „en Fabel.“ Í síni egnu frágreiðing er Hompesch ógreiður, tá ið hann upplýsti, at „I left North Farro … (West 1969, s. 146), tá hann fór av Havnini 1. juni. Mest sannlíkt eigur hetta at skiljast soleiðis, at hann fór norður um Føroyar. Um Hompesch við hesum royndi at fjala sannleikan, sum Løbner tykist leggja upp til, so er tað meira sannlíkt, at Salamine fór suðureftir, sum samsvarar við fyrstu fráboðanina hjá Hompesch um at sigla til Noregs. Tað er tó sannlíkari, at hann ongantíð hevði ætlað sær annað enn at sigla kring oyggjarnar við herfongi fyri eyga.

Síðsta royndin hjá Guttesen at sáa illgruna móti Nólsoyar-Pálli er, at tá Hompesch kom aftur, fór hann beint í kommandanthúsini, har hann leitaði eftir skjølum, ið hann tóktust vita vóru har, t.d. yvirgevingarsáttmálan við Baugh og avtaluuppskotið við Nólsoyar-Páll, sum tó ongantíð bleiv undirskrivað (Guttesen 2019, s. 390). Illgitingin tykist vera, at einans Nólsoyar-Páll kundi havt fortalt Hompesch um hesi skjølini, men heldur ikki tað er sannførandi. Hompesch visti frá fyrstu ferðini, hann var á Havnini, at Løbner og Baugh høvdu skrivað undir yvirgevingarsáttmála, og tað er lætt at skilja, at Hompesh hesaferð vildi kanna hendan sáttmálan fyri at fáa at vita, hvat hann kundi loyva sær at taka í Havn. Í sambandi við

viðmælisbrævið, sum Løbner 1. juni bað hann skriva til Nólsoyar-Páll, má hann eisini hava vitað, at onkur sáttmáli varð ella skuldi gerast teirra millum. Tað er heldur einki løgið í tí, at hann, nú hann hevði tikið avgerð um at taka vørur úr einahandlinum við sær, vildi síggja sáttmálan millum Nólsoyar-Páll og Løbner, soleiðis at hann kundi fáa neyvari vitan um, í hvørjum ørindum Nólsoyar-Páll - við hansara viðmæli - skuldi til Danmarkar. Tað hevði í øllum førum verið heilt natúrligt, um Hompesch fyrst vildi tryggja sær, at Royndin Fríða ikki hevði nakrar vørur hjá Kongaliga einahandlinum – t.e. almenna ogn - við til Danmarkar, tí tær ætlaði hann at taka. Løbner nevnir harumframt seinni fyri rentukamarinum, at Hompesch „vilde true os til at underskrive den, da den ei var underskreven“ (Nolsøe 1963, s. 144). Guttesen nevnir ikki hetta, sum leiðir illgrunan burtur frá Nólsoyar-Pálli, tí hann sýtti sum nevnt at enda fyri at undirskriva sáttmálan við Løbner undir teimum treytum, sum Løbner setti. Í øllum føri gevur tað lítla meining, at Nólsoyar-Páll skuldi havt sent Baugh til Løbner fyri at noyða Løbner at skriva undir eina avtalu við Nólsoyar-Páll, sum Løbner sjálvur skuldi havt sett fram ynski um at fáa í lag. Heldur ikki nevnir Guttesen í hesum sambandi, at fleiri fólk í Havn, m.a. Skipar Hansen, sum Løbner var sannførdur um hevði givið Hompesch upplýsingarnar um vørurnar í einahandlinum, sum vóru á fundinum í Havn 20. mai 1808, har heitt var á Løbner um at gera avtalu við Nólsoyar-Páll at fara til Danmarkar, kendu til hetta málið. Og beinleiðis ynsktu, at Løbner fekk eina avtalu í lag við Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 307). Hetta peikar alt onkran annan veg enn til Nólsoyar-Páll, sum heldur eingin annar enn Guttesen hevur havt illgruna til.

Tað marháttligasta í hesum er, at Guttesen stuðlar nevnda illgruna móti Nólsoyar-Pálli á ein setning í einum brævi hjá Løbner, har hann upplýsir, at Hompesch, tá hann kom á skrivstovu hansara 6. juni 1808, „vidste vi havde oprettet en Contract med Skp. Nolsöe om at gaae til Danmark.“ Uttan grundgeving ella viðmerking heldur Guttesen síðan sjálvur fram soleiðis: „Hetta peikar á tann møguleika, at „*en anden Indvaaner, som drev Fiskeri under Øen*“ kundi verið Páll

P. Nolsøe (Guttesen 2019, s. 390). Tað kann ikki sigast at vera heilt sannførandi søgugransking, tá ið orðingar hjá Løbner, sum ongantíð hevði nakran illgruna til Nólsoyar-Páll, – ja, beinleiðis afturvísti møguleikanum – verða tulkaðar at kunna stuðla eini heimildarleysari illgiting um, at Nólsoyar-Páll var „the culprit." Lesur ein søgugranskari burtur úr keldu illgrunar, sum beinleiðis stríða ímóti sjónarmiðum hjá upphavsmanninum til kelduna, er hann farin langt út um tað, sum fakliga og skilvíst er møguligt. Tað ber sjálvandi illa til at tulka orðingar hjá Løbner, sum vit í hesum máli vita ikki hevði illgruna til Nólsoyar-Páll, soleiðis, at tær stuðla eini heimildarleysari illgiting um tann sama illgruna móti Nólsoyar-Pálli. Tá Løbner í viðkomandi frágreiðingum og brøvum var so sannførdur um, at Skipar Hansen var „the culprit," at hann útihýsti øllum øðrum møguleikum, ber sjálvsagt illa til at gagnnýta aðrar orðingar í frágreiðingum hjá honum til at stuðla einari frammanundan heimildarleysari illgiting um, at Nólsoyar-Páll var „the culbrit." Gangast má út frá, at Løbner er betri kelda til, hvussu hansara orð skulu skiljast, enn seinni søgugranskarar.

Eingin, sum hevur lisið frágreiðingarnar hjá Løbner til rentukamarið, kann heldur vera í iva um, at hevði hann havt minsta illgruna um, at Nólsoyar-Páll hevði givið Hompesch upplýsingar, sum fingu hann at venda við og fara aftur á Havnina at ræna, hevði hann fest hendan illgrunan á blað í onkrari frágreiðing. Tað ger hann ongantíð. Tvørturímóti avvísir Løbner beinleiðis, at talan kann vera um nakran annan enn Skipar Hansen.

Øll hesi viðurskiftini munnu vera grundir til, at Løbner ongantíð tóktist hava nakran illgruna til Nólsoyar-Páll. Tvørturímóti. Guttesen byggir hinvegin í stríð við samtíðarkeldur – t.d. Løbner – sín illgruna á bók frá 1852, sum heldur ikki nevnir nakað um, at Nólsoyar-Páll hevði nakað at gera við, at Hompesch 6. juni kom aftur á Havnina eftir vøru. Guttesen skrivar, at Salamine sambært hesi bók skal vera farin „norðureftir" (Guttesen 2019, s. 388), tá hann fór av Havnini 1. juni 1808, men tað stendur ongastaðni í hesum tekstinum, og heldur ikki er nøkur ábending um tað í tekstinum. Meira umráðandi er, at Nólsoyar-Páll var í Havn 1. juni 1808, har hann varð hildin í

varðhaldi av Hompesch. Harumframt hongur tað heldur ikki saman, at Nólsoyar-Páll, sum í mai 1808 royndi at forða fyri, at Baugh hertók skansan í Havn, nakrar fáar vikur seinni beinleiðis skuldi havt givið Hompech landsskaðiligar upplýsingar um vørur og pening at ræna í Kongaliga einahandlinum í Havn.

Tað ber tí illa til at koma til aðra niðurstøðu enn, at hesin illgruni bert er at finna í hypotesuni hjá Guttesen. Hetta er helst enn ein heilt nýggj myta um Nólsoyar-Páll, sum Guttesen hevur skapt. Í øllum førum mugu vit flokka hendan illgrunan sum mytu, til 1) onkur kelda verður løgd fram, sum bara gevur onkra ábending um, at Nólsoyar-Páll kundi verið „the culprit," 2) ein frágreiðing verður givin um, hví samtíðin ongantíð tykist hava havt nakran illgruna til Nólsoyar-Páll, 3) ein frágreiðing verður givin um, hví heldur ikki mótstøðufólk hjá Nólsoyar-Pálli í samtíðini nakrantíð høvdu illgruna til hann, 4) onkur frágreiðing verður givin um, hvørji motivini hjá Nólsoyar-Pálli vóru til at geva Hompesch landsskaðiligar upplýsingar um vørur í einahandlinum í Havn, 5) ein frágreiðing verður givin um, hvussu tað ber til, at Nólsoyar-Páll, sum fyrst í mai 1808 royndi at forða fyri, at skansin varð hertikin, fýra vikur seinni skuldi havt eggjað bretska kaparanum Hompesch til at ræna Havnina, og 6) ein frágreiðing verður givin um, hvussu tað nú ber til, at Nólsoyar-Páll, sum sambært óheftum samtíðarkeldum 1. juni 1808 varð hildin í varðhaldi í Havn av bretska kaparanum Hompesch, skal hava verið norðanfyri um hetta mundið og havt okkurt loyniligt og landsskaðiligt samband við Hompesch.

Hypotesan hjá Guttesen hevur onga frágreiðing um nakrar av hesum fyri tesuna so avgerandi spurningar.

# Nøkur orð afturat um háttalag

Háttalagsliga er tað undranarvert, at ein høvundur, sum vil gera upp við eina mytu - hvør hon so enn er - um Nólsoyar-Páll, sum Jákup Jakobsen skal hava skapt, ofta er rættiliga heftur at akkurát upplýsingum, ið Jákup Jakobsen hevur fest á blað, enntá uttan yvirhøvur at gera sær nakrar tankar um, nær til ber at hava álit á Jákupi Jakobsen, og nær tað ikki ber til at hava álit á honum. Eitt boð er, at Guttesen tykist gagnnýta upplýsingar hjá Jákupi Jakobsen, tá tað tænir hansara endamáli, t.e. ofta fyri sáa illgruna um virksemið hjá Nólsoyar-Pálli, tí einki keldukritiskt háttalag liggur undir nýtslu hansara av Jákupi Jakobsen. Aðrastaðni kann ein lesari koma til at ivast í, um tað yvirhøvur verður skilt ímillum tað, sum Jákup Jakobsen skrivar í verkum sínum um Nólsoyar-Páll, og tað, ið Páll sjálvur skal hava sagt (Guttesen 2019, t.d. s. 265, 340). Tað sama er galdandi fyri aðrar høvundar, t.d. Nolsøe, sum ábyrgdast keldu, ið hann endurgevur (Guttesen 2019, s. 360).

Eg havi bert funnið eitt dømi um, at nýggj uppáhald í bókini eru til fyrimunar fyri Nólsoyar-Páll. Talan er um hypotesuna um, at Nólsoyar-Páll í mars 1808 skuldi verið komin úr Skotlandi við kornfarmi til Føroya, „som dermed frelstes fra Nød Vinteren over." Her er sostatt talan um frásøgn, sum setur Nólsoyar-Páll í rættuliga gott ljós, men søgan hevur sum illgrunarnir einki keldugrundarlag. Hóast hungursneyð hótti í Føroyum, so er eingin samtíðarkelda varðveitt, sum nevnir hendan frelsandi túrin hjá Nólsoyar-Pálli.

Tvørturímóti staðfesta samtíðarkeldur, at einki skip kom til Føroya millum oktober 1807 og apríl 1808, tá ið Baugh sigldi við bretska herskipinum Clio millum oyggjarnar. Løbner sipaði í hesum sambandi í eini frágreiðing frá 4. juni 1808 beinleiðis til, at einki tá varð frætt úr Danmark „siden forrige October Maaned med Hr. Nolsöe" (Guttesen 2019, s. 336). Tað ber illa til at ímynda sær, at Løbner, sum kærdi sína neyð um hóttandi hungursneyð, eins og onnur longu hevði gloymt, at Nólsoyar-Páll var komin til Føroya í tíðarskeiðinum við korni til føroyingar.

Til tíðir tykist viðgerðin av keldutilfari, selektiv endurgeving úr keldum, retoriskir spurningar og ósakligar illgitingar, benda á, at høvundurin longu frammanundan hevur avgjørt, hvørja niðurstøðu hann kemur til.

Tann størsti trupulleikin er kortini, at sum verk er bókin inkonsistent, soleiðis at kelduviðgerð, keldutulking, frágreiðingar og søgur ofta fara í ymiskar mótstríðandi rætningar og tí ikki hanga saman sum *eitt* narrativ. Ella øðrvísi, endamálið við narrativinum tykist vera at verja Løbner og vinna Nólsoyar-Pálli so nógvar neisir sum til ber, men tað endamálið hevur við sær, at narrativið ofta kemur í stríð við keldurnar og við seg sjálvt. Samanhangurin og fjølbroytnið í framsetingini líðir ofta undir, at høvundurin ynskir at at seta fram einfaldar persónstongdar frágreiðingar um viðurskifti, sum eru alt annað enn einføld ella tongd at ávísum persóni.

Í mun til tær nógvu skuldsetingarnar móti Nólsoyar-Pálli, sum verða settar fram í bókini, tykist tað eisini eitt sindur løgið, at einans trý neilig viðurskifti verða nevnd í endanum – og enntá ikki tær mest álvarsomu skuldsetingarnar um landasvik (Guttesen 2010, s. 431-432). Talan er um kornfarmin í Hvalba, neyðarrópini hjá Løbner, sum eru viðgjørd frammanfyri, og „stórari last av smuglaravørum," sum Nólsoyar-Páll legði upp í Noregi í 1807, tá hann „ikki var heiðurligur móti sínum medbygdamonnum norðuri í Vági" og „sveik tað álit, sum fútin Hammershaimb og kommandanturin Löbner vístu honum, tá ið hann bað um at blíva klareraður har norðuri, og ikki í Havn, sum annars var vanligt." Hetta triðja dømið er ikki umrøtt og viðgjørt

millum tær níggju tesurnar í hesi bókini. Tað er væl møguligt, at Guttesen hevur rætt í hesum, men tað er vert at leggja merki til, at hetta byggir bert á eina frágreiðing frá Løbner til rentukamarið frá 27. august 1807, har Løbner staðfestir, at „han saavel har skuffet os, som disse Mænd," – sum høvdu kannað Royndina Fríðu – „have vi erfaret" (Guttesen 2019, s. 204). Eitt er, at hetta er eitt sera tunt og lítið umboðandi grundarlag at byggja niðurstøðuna um, at Nólsoyar-Páll „ikki var heiðirligur móti sínum medbygdamonnum norðuri í Vági" á, men beinleiðis ósamanhangandi er tað, at bert trý neilig viðurskifti verða tikin fram í endanum, tá ið fleiri aðrar og eisini nógv álvarsligari skuldsetingar verða umrøddar og settar fram móti Nólsoyar-Pálli í bókini.

Tjóðskaparliga mytologin um Nólsoyar-Páll frá 1880-árunum (um vit her bara ganga út frá, at sipað verður til myndina hjá Jákupi Jakobsen av Nólsoyar-Pálli), sum høvundurin hevur sett sær fyri at gera upp við, tykist harumframt vera nakað væl eldri enn tann føroyska tjóðskaparrørslan. Og ofta er upprunin til søgurnar, ið høvundurin sigur seg gera upp við, útlendskur. Stórur partur av varðveittu føroysku frásøgnini um Nólsoyar-Páll byggir á føroyskar samtíðarkeldur og nógvar hava enntá røtur í donskum samtíðarkeldum um mannin.

Einki av hesum ógildar kortini tann veruleika, at Guttesen hevur lagt nógv aftur at granskingini um Nólsoyar-Páll, serliga tá talan er um nýggja keldutilfarið, sum vit øll hvør í sínum lagi kunnu leita okkum nýggja vitan í.

# Tjóðskaparrørslan skapti mytuna við støði í einum gloymdum Nólsoyar-Pálli

Tað undrar eisini, at søguligi persónurin Nólsoyar-Páll sambært Guttesen skjótt varð „gloymdur“ (Guttesen 2019, s. 424), tá hann, m.a. í síni roynd at tekna ein søguligan persón við fleiri persónligum lýtum, m.a. sipar til eina rúgvu av skjølum frá samtíðini, eisini til donsk bløð frá samtíðini, ið umrøða Nólsoyar-Páll. Hann sipar til Reventlow greiva, ráðharran í stjórnini hjá krúnprinsinum, sum umrøddi Nólsoyar-Páll. Hann endurgevur danska umrøðu av Nólsoyar-Pálli hjá Muhle frá 1844 og hann endurgevur umrøðu av Nólsoyar-Pálli í eini bók eftir dananum Ræder frá 1852. Eisini sipar Guttesen til grein frá 1885 um Nólsoyar-Páll í tí einasta føroyska blaðnum, Dimmalætting, frá 1878. Her er eitt hav av tilfari í Føroyum, Danmark og í Bretlandi, sum umrøða Nólsoyar-Páll, tilfar, sum valla finst um nógvar persónar í sama tíðarskeiði. Og Guttesen hevur langt frá umrøtt alt viðkomandi tilfar.

Johan Hendrik Schrøter, presturin í Suðuroy, sipaði eisini til Nólsoyar-Páll í brævi til Christian Ludvig Tillish amtmann í 1826 (Degn 1979, s. 43), men hetta samskiftið nevnir Guttesen ikki í bókini um Nólsoyar-Páll.

Harumframt verður - tó uttan navn - sipað til Nólsoyar-Páll í dagbókini hjá Graba, har Graba í sambandi við umrøðu av yvir-

gevingini av skansanum, ið hann lýsir á ein líknandi neiligan hátt, sum Jákup Jakobsen ger, sipar til Nólsoyar-Páll, men ta søguna nevnir Guttesen ikki. Tað er sostatt ikki soleiðis, at tann neiliga myndin av Løbner, sum Guttesen treyðugt vil viðganga hevði nøkur persónlig brek, í sambandi við yvirgevingina av skansanum er skapt seinni av tjóðskaparligum grundum í 1880-árunum. Hon hevur verið fortald í Føroyum í árunum eftir skansahertøkuna og er síðan, í 1828, komin m.a. týska ferðamanninum Carl J. Graba fyri oyra. Heldur ikki nevnir Guttesen franska frásøgn frá 1839, har sipað verður til fiskimenn úr Norðoyggjum (tað má vera Nólsoyar-Páll), sum løgdu merki til eitt herskip við fronskum flaggi (Marmier 1839). Heldur ikki bretska bók frá 1841 (Nicol 1841, s. 333-334), sum - eisini uttan navn - sipar til Nólsoyar-Páll og umrøður hertøkuna, sipar hann til her. Frásagnirnar frá 1828 og 1841 upplýsa eisini, at hesin sjómaður (úr Vági í Norðoyggjum), t.e. Nólsoyar-Páll, avdúkaði, at herskipið (Clio), ið sigldi við fronskum flaggi, var enskt, og at hann sendi boð til kommandantin í Havn. Guttesen ger lítið við skaldskap hjá Nólsoyar-Pálli, sum hevði livað á mannamunni og varð festur á blað frá 1880´árunum. Og óivað er tað skaldskapin, sum føroyingar minnast hann mest fyri.

Danska tveybinds verkið hjá Callisen o.ø. frá 1807-1809 (*Physisk Medizinske Betragtninger over Kiøbenhavn Stadens Beboere*), har Nólsoyar-Páll verður umrøddur í keldum, nevnir ella endurgevur Guttesen heldur ikki.

Heldur ikki frásøgnin um, at Nólsoyar-Páll varð fyrstur at flyta koppingarevni til Føroya „mann av manni“ í 1805 er nøkur myta, sum tjóðskaparrørslan seinni hevur skapt. Frásøgnin er at finna í frágreiðing frá koppingarnevndini í Danmark til kongin fyri árið 1806, har orðingarnar um Nólsoyar-Páll eru meira rósandi enn nakað av tí, sum Jákup Jakobsen hevur skrivað. Nevndin skrivar til kong um „Capitain Nolsøes patriotiske Handling, der er af saa meget større Vigtighed, som de naturlige Kopper, der ikke i lang Tid have grasseret paa Færøerne, vilde engang, naar de udbrøde, have anrettet betydelig Ødelæggelse, anseer Commissionen ham fuldkommen værdig til den

samme Belønning, hvor med Deres Majestæt benaadede Kiøbmand Esbensen her i Staden, der paa egen Bekostning lod indføre og foretage Vaccinationen i Vardøe og Vadsøe Sogne i Øst-Finmarken, hvortil Commissionen fordrister sig allerunderdanigst at indstille ham.“ Nevndin heldur fram: „I Henseende til Handels-Betient Jacob Nolsøe, der ved besværlige Reiser til langt fra hans Boepæl beliggende Øer har fremmet Vaccinationen, maa Commissionen, paa Grund af de i Sorenskriverens forommeldte Attest af 29de September forrige Aar anførte Omstændigheder, i dybeste Underdanighed henstille til Deres Majestæts allernaadigste Forgodtbefindende, paa hvilken anden Maade han derfor kunde være at belønne.“ (Callisen 1809, s. 114). Er hetta ein myta um Nólsoyar-Páll, er mytan skapt av donsku koppingarmyndugleikunum.

Soleiðis tykist minnið um Nólsoyar-Páll, sum - tað sæst týðiligt í verkinum hjá Jákupi Jakobsen - hevði livað á mannamunni í Føroyum, serliga í Nólsoy, í Norðoyggjum og í Suðuroy, eisini umvegis útlendskar høvundar, koma inn í føroysku skriftmentanina, sum tók seg upp í seinnu helvt av 1800-talinum. Hetta er óivað tekin um, at Nólsoyar-Páll ikki varð gloymdur, og at Jákup Jakobsen í 1892 festi eina frásøgn á blað, sum eisini útlendingar høvdu skrivað um, og sum í fleiri ymiskum útgávum hevði livað á mannamunni í Føroyum í eina knappa øld. Í einum føroyskum almúgusamfelagi í fyrru helvt av 1800-talinum, har eingin skrivlig siðvenja var, var hetta heilt náttúruligt. Og tað ber illa til at koma til ta niðurstøðu, at tá ið eingin hevur skrivað um ávísan persón, so er tað tí, at hann var nærum gloymdur - í hesum sambandi kann enntá sigast, at tað ikki er rætt, at eingin skrivaði um hann áðrenn Jákup Jakobsen. Harumframt er m.a. dagbókin hjá Graba tekin um, at frásagnir um hann hava verið varðveittar á mannamunni. Tað er í øllum førum greitt, at neiliga umrøðan av skansahertøkuni, har tað eisini verður sipað til Nólsoyar-Páll, ikki er skapt í sambandi við framkomuna av tjóðskaparrørsluni í seinnu helvt av 1800-talinum – frásøgnin tykist eins gomul sum hertøkan, og Guttesen sipar sjálvur til neiligar søgur í eldri tilfari - enntá samtíðarkeldur (Guttesen 2019, s. 375-376 og 410). Søgan hevur

verið fortald í Føroyum í árunum aftan á hertøkuna og í frásagum hjá útlendingum er hon síðan komin á prent í útlendskum tekstum, og hon er komin aftur til æru sum føroysk skriftmentan seint í 1800-talinum.

Hon er sjálvandi fortald í einum broyttum samanhangi og formi, ið varð ávirkaður av ráðandi romantiskum rákum í tíðini, men tað er ikki sannførandi, at Nólsoyar-Páll varð gloymdur stutt eftir, at hann gekk burtur.

Nakað annað er, at søgurnar um Nólsoyar-Páll og Løbner hava passað væl til tjóðskaparligu søguskrivingina, sum tók seg upp í sambandi við tjóðskaparrørsluna, men hvørki hendingar ella sjónarmið eru skapt av henni.

Tað ivasama eftirmælið hjá Løbner, sum Guttesen ikki tykist vilja kennast við, ella í øllum førum ynskir at gera upp við, eisini í sambandi við skansatøkuna í 1808, er ikki uppfunnið seinni av tjóðskaparligum áðum.

Tað vildi verið at sett fram eina nýggja mytu um Løbner, sum lítið ella einki hald hevur í samtíðarkeldunum.

# Ein uppgerð við mytuna um Nólsoyar-Páll

Myndin hjá Jákupi Jakobsen av Nólsoyar-Pálli er jalig, men tað er ikki heilt rætt, at Jákup Jakobsen teknaði eina einvíst jaliga mynd av Nólsoyar-Pálli sum eina lýtaleysa tjóðskaparhetju, soleiðis sum Guttesen vil vera við (Guttesen 2019, s. 443), tí Jákup Jakobsen - eins og tær keldur, sum Guttesen gagnnýtir til at tekna eina minni hetjukenda mynd av Nólsoyar-Pálli (sí Guttesen 2019, s. 429) - fjalir ongastaðni, at Nólsoyar-Páll í síni egnu samtíð var ein umstríddur persónur. Í verki sínum frá 1912 skrivaði Jákup Jakobsen m.a. soleiðis um Nólsoyar-Páll: „Ovmikið stríð stóð um hann í samtíðini" (Jakobsen 1912, s. 166), men høvundurin metti samstundis, at eftirtíðin átti at virða Nólsoyar-Páll fyri tað týðandi verk, sum hann hevði útinnt fyri Føroyar.

Tað er hugvekjandi, at Guttesen tykist gera tað sama við Løbner, ein annan í samtíðini umstríddan mann, men heldur ikki her fáa vit nógv at vita um, at Løbner var ein umstríddur embætismaður í síni egnu samtíð.

Tað munnu ikki vera nógvir aðrir føroyingar, sum livdu um 1800, ið ferðaðust so víða sum Nólsoyar-Páll, og hvørs verk, meðan teir virkaði eins og eftir deyða teirra, varð umrøtt so víða sum tað hjá Nólsoyar-Pálli. Men sjálvandi var Nólsoyar-Páll, sum livdi í eini pre-tjóðskaparligari tíð, ikki nøkur føroysk tjóðskaparlig hetja í samtíðini, sum einans hugsaði um tað besta fyri føroysku tjóðina - tílíkt er søgulig anakronisma. Hinvegin er stórur partur av tilfarinum, sum Guttesen

endurgevur fyri at tekna eina minni hetjukenda mynd av Nólsoyar-Pálli, prentað í 20. øld. Talan er v.ø.o. ikki um upplýsingar, ið hava verið fjaldar fyri føroyingum síðan 1892. Myndina av Nólsoyar-Pálli, sum Jákup Jakobsen hevur sett fram í sínum verki, arbeiðir Guttesen tó lítið við. Harafturímóti sipar hann javnan ókritiskt til upplýsingar, sum hann hevur frá Jákupi Jakobsen. Tað eydnast honum tí heldur ikki at seta verkini hjá Jákupi Jakobsen inn í nakað tjóðskaparkritiskt høpi. Tvørturímóti ger hann javnan nýtslu av upplýsingum hjá Jákupi Jakobsen, tá hann setur fram nýggjar mytur um Nólsoyar-Páll. Tá grundleysar illgitingar og retoriskir spurningar eru lagdar til síðis, er myndin av Nólsoyar-Pálli í bókini hjá Guttesen ikki so nógv øðrvísi enn hon, sum er at finna hjá Jakobsen og øðrum søgubókum um mannin.

Tað undrar meg heldur ikki so lítið, at Guttesen ongantíð viðger tær meira fantastisku og rættiliga ótrúligu hetjusøgurnar um Nólsoyar-Páll, sum eisini eru í verkinum hjá Jákupi Jakobsen. T.d. tá Nólsoyar-Páll, fylgdur av nøkrum havnarmonnum og nólsoyingum, óvápnaður trokaði seg ígjøgnum stóra fjøld av alvápnaðaðum hermonnum hjá Hompesch í garðinum hjá kommandantinum og síðan fór inn í húsini, har Hompesch deildi, blótaði og hótti Løbner við, at hann fór at seta eld á Havnina. Innkomin hugdi Nólsoyar-Páll rundan um seg, legði merki til korðuna hjá kommandantinum, sum stóð aftan fyri eina kommodu, tók korðuna og setti oddin á henni fyri bringuna á Hompesch og segði „don´t move! else you are a dead man!.“ Til havnarmennirnar og nólsoyingarnar, sum høvdu fylgt honum og bíðaðu uttan fyri húsini, rópti hann, „Um eg krivji hann, so sláið frá hond harúti,“ og ein uttanfyri rópti afturímóti, „Tað skal vera, sum tú slært kóp.“ Einsamallur eydnaðist tað Nólsoyar-Pálli at fáa Hompesch, ið ikki fekk drigið sína egnu korðu og mundi óttast fyri at vera dripin, til at geva honum lyfti um at eira Havnina og einki ilt gera. Tástani læt Nólsoyar-Páll Hompesch fara. (Jakobsen 1912, s. 146-147). Her er enntá møguligt at samanbera við meira eftirfarandi samtíðarkeldur (sí t.d. Sølvará 2008, s. 275-276), men tílík hetjumynd sleppur av onkrari grund at standa fullkomiliga órørd hjá Guttesen.

Hendan søgan hjá Jákupi Jakobsen er enntá beinleiðis í móttstríð við uppfatanina av viðurskiftunum millum Nólsoyar-Páll og Hompesch, sum Guttesen hevur illgruna um vóru heldur vinarlig (Guttesen 2019, s. 390 og 399). Harumframt skuldu hesar hetjukendu hendingar gingið fyri seg 1. juni 1808, tá Guttesen uttan at sipa til nakrar keldur hevur illgruna um, at Nólsoyar-Páll var norðanfyri og hevði okkurt landsskaðiligt samskifti við Hompesch um vørur at ræna í einahandlinum í Havn. Í hesum høpinum er tað uppaftur meira undranarvert, at hesar hendingarnar í Havnini 1. juni 1808 hvørki verða umrøddar ella bara nevndar í bókini hjá Guttesen. Serliga tá óheftar samtíðarkeldur upplýsa, at Nólsoyar-Páll var í Havn, t.e. ikki var norðanfyri, 1. juni í 1808.

Samanumtikið hevur Guttesen skrivað eina sera góða og virðismikla bók um Nólsoyar-Páll, har ein rúgva av góðum keldutilfari verður lagt fram. Sæð í mun til høvuðssjónarhorn mítt í hesi bókini, sum leggur herðslu á arbeiðsháttin og viðgerðina av tilfarinum, hevur tað kortini ikki eydnast Guttesen at gera upp við „mytuna" og seta fram nýggja tulking av Nólsoyar-Pálli. Til tess er bókin ástøðiliga og háttalagsliga alt ov veik, samstundis sum Guttesen sjálvur er ov sjónligur. Eisini er Guttesen í ov stóran mun heftur av Jákupi Jakobsen til at talan kann vera um uppgerð við hann. Tað er eyðsæð, at verkið hjá Jákupi Jakobsen um Nólsoyar-Páll er ávirkað av romantiskum rákum, sum vóru ráðandi í hansara samtíð. Og tí skrivar hann søgu við støði í idealistiskari søgufatan, sum leggur herðslu á persónar. Tað er einki løgið í tí, tí soleiðis gjørdu tey flestu í tíðarskeiðinum. Í so máta er bókin hjá Guttesen, sum eisini er ávirkað av hansara umhvørvi og sjónarmiðum, einki undantak. Eisini Guttesen leggur stóra herðslu á persónar, og verkið tykist idealistiskt og persónstongt eins og verkið hjá Jákupi Jakobsen. Persónarnir verða bara lýstir á ein annan hátt enn hjá Jakobsen, men teirra persónligu gerðir og mistøk standa eins og hjá Jakobsen í miðdeplinum í sjálvari framsetingini. Tann stóra hetjan hjá Jákupi Jakobsen verður bara ein ráksnúningur hjá Guttesen, meðan hetjan hjá Guttesen er ein ræðuskítur hjá Jákupi Jakobsen. Tað er ikki serliga nýskapandi og tykist eitt sindur løgið, tá

høvundurin er geografur og umboðar eitt fakøki, sum vanliga ikki leggur herðslu á persónar. Og í veruleikanum er Guttesen sjónligari í sínum verki um Nólsoyar-Páll enn Jákup Jakobsen er í sínum. Akkurát hesi viðurskiftini gera, at Guttesen úr einum *søgufakligum* sjónarhorni ongantíð veruliga hepnast við uppgerðini við *verkið* hjá Jákupi Jakobsen. Hóast tjóðskaparromantikkur ikki sæst í verkinum hjá Guttesen, er tað heimspekiliga útgangsstøðið hjá honum ikki so nógv øðrvísi enn tað idealistiska og persónstongda útgangsstøðið í verkunum hjá Jakobsen.

Ein tjóðskaparkritisk uppgerð við Jákup Jakobsen og hansara mynd av Nólsoyar-Pálli treytar eitt søgufakligt grundstøði í nýggjari fakbókmentum um tjóð, tjóðskap og tjóðskaparrørslu sum almenn fyribrygdi (sí m.a. Gellner 1983, Anderson 1983, Hobsbawm 1983 og 1992, Hettne o.a. 2006 og Østergaard 2007). Hetta síggja vit kortini einki til hjá Guttesen, sum hevur eina rættiliga avmarkaða føroyska tilgongd til sítt evnið. Nýggjari gransking um tjóð, tjóðskap og tjóðskaparrørslu, sum ofta tekur støði í m.a. nevndu klassisku verkum um, hvussu tjóðskaparrørslan skapar tjóðina, sæst ikki í verkinum hjá Guttesen. Hann fyriheldur seg ongantíð til altjóða gransking um tjóðir, tjóðskap og tjóðskaparrørslu sum almenn fyribrigdi, men tekur bert støði í eini heilt ávísari føroyskari mynd av Nólsoyar-Pálli, sum hann ítøkiliga roynir at finnast at. Tí fáa vit lítið annað enn gomlu myndina við øvugtum fortekni, og onga almenna frágreiðing um, hvussu eisini tann føroyska tjóðskaparrørslan hevur brúkt hetjur til at skapa tjóðina. Tað skal kortini viðmerkjast, at hetta er heldur ikki nakað, sum søgugransking í Føroyum generelt hevur fingist nógv við, men tað eru nøkur undanatøk (Debes 1991, Østergaard 1992, Joensen 1991 og 2003). At tjóðskaparrørslur skapa tjóðarhetjur sum lið í skapanini av tjóðini er sambært nýggjari gransking ikki eitt serligt føroyskt tjóðarfyribrygdi, men eitt alment fyribrygdi. Ein nýtulking treytar, at tulkarin ger seg leysan av tjóðskaparliga tulkingarsamanhanginum, heldur enn bert at finnast at ítøkiligum feilum í teimum gomlu framsetingunum, sum annars grundleggjandi verða varðveittar.

Tí fáa vit heldur ikki nakað samanhangandi útgangsstøði, sum ein nýtulking av klassisku føroysku myndina av Nólsoyar-Pálli kundi bygt á, men ofta fáa vit bert spjaddar atfinningar av ávísum uppáhaldum hjá ávísum granskarum um ávís viðurskifti í sambandi við Nólsoyar-Páll. Tað einasta veruliga nýggja, sum vit finna hjá Guttesen, er tí tilfar um ávísar hendingar, sum ikki er viðgjørt áður. M.a. hevur Guttesen funnið tilfar, sum vísir, at Løbner veruliga gjørdi skansan kláran til bardaga við Baugh, men tann hendingin hevur sum so ikki so nógv við Nólsoyar-Páll at gera, uttan kanska tað, at keldurnar upplýsa, at Nólsoyar-Páll frammanundan hevði ávarað Løbner um enska fíggindan. Hetta tilfar setur hinvegin yvirgevingina hjá Løbner av skansanum í nýtt ljós. Nakað bendir kortini á, at Jakobsen longu í 1892 visti av hesum, tá hann nevnir løddar kanónir, men poengið er, at tilfarið ikki verður sett inn í eitt yvirskipað høpi. Í hesum førinum verður tilfarið gagnnýtt til at finnast at granskarum, sum hava funnist at Løbner fyri ikki at gera nakað fyri at gera skansan til reiðar til verju ímóti Baugh, meðan Guttesen aðrastaðni finst at teimum, sum hava lastað Løbner fyri at yvirgeva skansan, uttan at eitt skot varð latið av. Her eins og aðrastaðnis er trupult at finna samanhang og endamál, uttan so, at hetta mest snýr seg um at verja Løbner. Guttesen manglar eitt greiðari fokus og eitt yvirskipað sjónarhorn, sum leiðir viðgerðina burtur frá hansara egnu sym- ella antipatium móti ávísum persónum og móti eini fakliga samanhangandi viðgerð av einum ávísum tilfari við støði í fakliga grundaðum spurdómum.

Í ov stóran mun eru tað ávísir persónar, bæði høvundurin sjálvur og persónar í verkinum hjá høvundinum, sum mynda verkið, og í ov lítlan mun óheftir fakligir spurningar og óheft søgufaklig viðgerð av tilfari og evni. Men kanska hevur hetta eisini nakað við tilvild at gera, tí tilvildarligar hendingar, sum persónar koma út fyri, kunnu onkuntíð ávirka sjónarmiðini hjá einum persóni. Í innganginum sipar Guttesen við endurgeving eftir John Davidsen til, at hevði Jákup Jakobsen á eini stuttari vitjan í Nólsoy í 1885 farið inn í onnur hús, so hevði hann óivað fingið eina aðra søgu fortalda um Nólsoyar-Páll (Guttesen 2019, s. 26). Sjálvur sigur Guttesen, at hann fekk íblástur

til sína bók um Nólsoyar-Páll eftir vitjan á Oyri. Tann ókunnugi Guttesen fór til skeiv hús at banka uppá og kom at tosa við oyrarmann um Nólsoyar-Páll. Oyramaðurin fortaldi Guttesen, at har á Oyri var Nólsoyar-Páll ikki tann stóri maðurin, sum fólk í Klaksvík og Havn hildu hann vera (Guttesen 2019, s. 19). Tá Guttesen nevnir hesa søguna, so mugu vit ganga út frá, at hon hevur ávirkað hann. Og tað sæst í bókini.

Til ber at spyrja, um Guttesen kanska eisini hevði fingið eina aðra søgu, um hann fór inn í onnur hús á Oyri, men úr einum søgufakligum sjónarhorni eiga søgufrøðingar at lata seg sannføra av samtíðarkeldunum. Í so máta var vitjanin hjá Jákupi Jakobsen meira viðkomandi, tá hann fór til Nólsoyar at tosa við eitt eygnavitni, ið sum smádrongur hevði upplivað Nólsoyar-Páll, meðan oyramaðurin ikki kann hava verið eitt eygnavitni.

Frásagnir verða valla neyvari við árunum, men tað er heldur ikki altíð, at søgubøkur gerast betri við árunum. Tað gerast tær bert, um søgufrøðingar støðugt halda seg til sakligar søgufakligar meginreglur, tá teir viðgera sítt keldutilfar og skriva sínar framsetingar. Tað er tann partin av søgugranskingini, sum skal umrøðast nærri niðanfyri. Hetta verður gjørt við støði í dømum úr teimum úrslitum, sum higartil eru viðgjørd í hesi bókini.

# Níggju søgufakligar meginreglur

At enda skulu nakrar háttalagsligar meginreglur setast fram, sum søgufrøðingar eiga at hava í huga, ikki ein fullkomin listi, men nakrar týðandi meginreglur, ið hava samband við arbeiðslagið í bókini um Nólsoyar-Páll.

**Endamál.** Setur ein søgufrøðingur sær fyri at granska eitt tíðarskeið, evni ella onkran persón, er neyðugt at hann við neyvum spurdómi og spurningum ger sær greitt, hvat hann ætlar at granska. Hetta tí, at uttan neyvar spurningar leitar granskarin í blindum, uttan nakra óhefta kumpass ella vegvísara, og tá er vandi fyri, at viðgerðin av keldutilfarinum verður tilvildarlig. Er ætlanin at granska eitt tíðarskeið, evni ella persón, sum søgufrøðingar fyrr hava fingist við, er eisini neyðugt sakliga at greiða frá hesi gransking og hvørji úrslit, hon er komin fram til. Harumframt skal granskarin gera greitt, hvørji hol og veikleikar eru í hesi granskingini, og um endamálið við hansara gransking er at seta øðrvísi spurningar til tað sama ella eitt annað empiriskt tilfar, soleiðis at møguligt er at fáa nýggja vitan um tíðarskeiðið, evnið ella persónin. Er ætlanin kanska at seta spurnartekin við eina ávísa - kanska ráðandi - tulking av einum ávísum tíðarskeiði, evni ella persóni, so er neyðugt at skjalprógva og sakligt greiða frá, hvat tað er fyri tulking, ið ætlanin er at seta spurnartekin við, og hvussu ráðandi hendan tulkingin er innan granskingina. Samstundis skal

greiðast frá, á hvønn hátt nýggja granskingin er øðrvísi, ástøðiliga, háttalagsliga og empiriskt, í mun til gomlu granskingina, sum ætlanin er at seta spurnartekin við. Tað er neyðugt at eyðmerkja alt keldutilfarið, styrkir, veikleikar, umboðan, og vísa til tilfarið, soleiðis at lesarin veit, hvar tilfarið kann finnast, men tað er ikki nokk. Tilvísingar til keldutilfar eru sjálvandi neyðugar, men í sjálvum sær siga tær nærum einki um, hvussu ein søgugranskari hevur arbeitt við tilfarinum. Fyri at vita, hvussu arbeitt verður við tilfarinum, skal granskarin leggja fram ástøði og háttalag.

Tað avgerandi er ikki bert at vísa til keldutilfar, men meira umráðandi er at vísa, hvussu arbeitt verður við tí. Tilvísingar upplýsa bert lesaran um, hvaðani ávís upplýsing stavar frá, men tær siga í sjálvum sær lítið um, hvat upplýsingin kann brúkast til ella um hon yvirhøvur kann brúkast sum skjalprógv fyri nøkrum sum helst.

Hesin parturin er veikur í bókini hjá Guttesen um Nólsoyar-Páll, tí lesarin veit ikki heilt, 1) hvørjir spurningar verða settir, 2) hvussu arbeitt verður við tilfarinum, ella 3) hvør mytan er, sum endamálið er at gera upp við. Onkuntíð fari eg sum lesari eisini at ivast í, um talan í veruleikanum er um eina bók um Nólsoyar-Páll, sum heitið sigur, ella um talan er um eina bók um Løbner, sum fyllir lutfallsliga nógv í eini bók um Nólsoyar-Páll. Eisini ivist eg í, um onnur, sum undan Guttesen hava skrivað um evnið, altíð fáa so sakliga viðgerð í bókini.

Tað er sjálvandi ikki neyðugt, at hetta beinleiðis er orðað í innganginum í eini populerari bók til leikfólk, men tað má bera til at ganga út frá, at ein høvundur, sum fer undir eitt so umstrítt evni, gjøgnum tekstin gevur sínum lesarum ein varhuga av, at viðgerðin er saklig og umboðandi. Tað fær ein lesari ikki altíð varhuga av, meðan hann lesur. Tvørturímóti fær tann árvakni lesarin onkuntíð eina kenslu av, at viðgerðin er ósaklig.

Tann minni vakni verður hinvegin ofta leiddur av leið av illgitingum, ósakligum orðavali, úrvaldum keldum, ósakligari viðgerð, onkuntíð selektivari endurgeving úr keldum, meðan ein, sum bara hevur samandráttin á enskum at halda seg til, ongan møguleika hevur fyri at vita, at niðurstøður onkuntíð eru rættiliga ivasamar.

**Konsistensur.** Eitt krav til kelduviðgerð og framseting er, at keldurnar verða viðgjørdar konsistent (t.e. uttan mótstríð), og at eisini framsetingin er konsistent. Tað ber ikki til í framsetingini at seta álit sítt á tvær keldur, sum innanhýsis eru mótstríðandi. Í tílíkum førum noyðist ein søgufrøðingur at velja aðra kelduna og vraka hina, tí báðar kunnu ikki vera álítandi. Antin er tað, sum onnur keldan upplýsir, skeivt, ella eisini fara báðar skeivar. Tí ber tað ikki til, sum Guttesen ger, at grundgeva við støði í eini keldu frá rættarmálinum í London í 1811, at Baugh *eingi* boð hevði fingið úr London um at taka og oyðileggja skansan, og at tað tí var Nólsoyar-Páll, sum fekk Baugh til at hertaka skansan, og samstundis grundgeva við eini aðrari keldu, sum upplýsir, at Baugh *hevði* fingið boð úr London um at taka skansan, og at tað tí var rætt av Løbner at yvirgeva skansan, tí hevði hann ikki gjørt tað, so hevði bretska admiralitetið sent størri hermegi til Føroya fyri at taka skansan. Báðar upplýsingarnar kunnu ikki vera og eru heldur ikki sannar, og tí vil ein framseting, sum gagnnýtir báðar upplýsingarnar til tvey heilt ymisk endamál, eisini vera inkonsistent. Heldur ikki ber væl til at halda upp á, at Løbner brynjaði skansan til orrustu 5. mai 1808, tí hann hevði fingið upplýsingar um, at bretskt fíggindaskip sigldi millum oyggjarnar, og samstundis halda upp á, at tað kom óvart á Løbner 15. mai 1808, tá ið sama skip kom á Havnina, tí hann helt, at talan var um franskt friðarskip. Konsistenskrøvini noyða søgufrøðingar til at velja millum ymiskar keldur og vraka aðrar keldur. Tað er ein keldukritiskur spurningur at avgera, *hvørjar* av fleiri møguliga mótskríðandi keldum/upplýsingum skulu vrakast, men tað er hinvegin ein skilvís, t.e. logisk, niðurstøða, at tá mótstríð er millum fleiri keldur, so noyðist ein søgufrøðingur *at velja* millum hesar keldur.

Tað sama ger seg galdandi við hypotesuni hjá Guttesen um, at Nólsoyar-Páll á mars 1808 gjørdi ein skjótan túr til Skotlands eftir vøru, sum beinleiðis kemur í stríð við hansara egnu samtíðarkeldur, ið upplýsa, at einki skip kom til Føroya í tíðarskeiðinum oktober 1807 til juni 1808. Hetta kann ikki standa soleiðis í tekstinum, t.e. uttan at ósamsvarið millum keldurnar yvirhøvur verður viðgjørt, tulkað ella bara nevnt í framsetingini.

Og tá søgufrøðingar í framsetingum seta fram tvær mótstríðandi frágreiðingar, so hava teir gjørt seg sekar í inkonsistensi, t.e. at hava skapt eina mótstríðandi framseting. Í tílíkum førum noyðast søgufrøðingar at velja millum keldurnar, t.e. vraka onkra, um teir ikki í framsetingini seta fram eina tulking, sum fær alt at hanga saman. Tulking kann onkuntíð fáa tílíkt, sum í fyrstu atløgu kann tykjast vera inkonsistensur millum keldur, til at hvørva, men tað ber illa til í hesum trimum omanfyrinevndu dømunum: 1) í fyrsta døminum (boðini úr London til Baugh) er talan um eitt heilt greitt mótstríð millum upplýsingarnar, sum ikki kunnu tulkast burtur í framsetingini, 2) í næsta førinum (upplýsingar hjá Løbner til rentukamarið um, at skansaálopið kom óvart á hann) er talan um eitt mótstríð í sjálvari framsetingini, sum høvundurin tykist hava skapt í síni roynd at verja gerðir hjá Løbner at verja *og* yvirgeva skansan, eitt mótstríð, sum kundi fingist burtur við at tulka innihaldið í skrivinum hjá Løbner til rentukamarið, har hann upplýsti, at álopið hjá Baugh kom óvart á og 3) í triðja førinum (hypotesan um skjóta túrin hjá Nólsoyar-Pálli í mars 1808) er talan um eina hypotesu í sjálvari framsetingini, sum beinleiðis er í mótstríð við samtíðarkeldur, sum verða brúktar í øðrum samanhangi í framsetingini. Tað kemur við øðrum orðum eisini fyri, at søgufrøðingar seta óneyðugt mótstríð í sínar framsetingar, onkuntíð av gáloysni ella misgáum, men onkuntíð kann tað vera tí, at teir eru ávirkaðir av sínum egnu sjónarmiðum. Tað ger Guttesen t.d., tá hann í sambandi við skansatøkuna byggir á ta treyt, at Nólsoyar-Páll royndi at forða fyri, at Baugh tók skansan, - at úrslitið í hesum førinum sambært Guttesen gjørdist tað øvugta, er í hesum samanhangi óviðkomandi - samstundis sum hann hevur illgruna til Nólsoyar-Páll um, at hann skuldi havt upplýst fyri Baugh, at donsk fíggindaskip hjá bretum lógu á Havnini. Her hongur framsetingin illa saman.

Tað ber sum nevnt onkuntíð til at tulka mótstríð burtur, men sum víst í framsetingini, so kann tað tíðum vera trupult, tá tað ofta hevur við sær nýtt mótstríð ella trupulleikar. Í hesum førinum er ein møguleiki, at Nólsoyar-Páll skuldi havt roynt at ræða Baugh frá at taka skansan við at siga frá eini søgu um donsk herskip á Havnini,

men tað skapar ósamsvar við tað tunna keldugrundarlagið og ger søguna uppaftur ósannlíkari.

Tað ber eisini til at spyrja, hví Guttesen hevur álit á upplýsing hjá Jákupi Jakobsen um, at Nólsoyar-Páll í mai 1808 mótvegis Baugh skuldi havt breggjað sær av, hvussu sterkur skansin var (Guttesen 2019, s. 349), sum fyri fyrstu ferð er fest á blað góð 80 ár eftir, at hendingin, sum nevnda upplýsing sipar til, skuldi havt gingið fyri seg, t.e. í 1892, tá ið hann einans heldur tað vera møguligt, at Nólsoyar-Páll hevði frískt koppingarevni við til Føroya í 1805 (Guttesen 2019, s. 169) - ein hending, sum er óheft váttað í fleiri samtíðarkeldum, m.a. í Dagen, frágreiðingum hjá koppingarnevndini og í kirkjubókum. Hetta er dømi um inkonsistenta viðgerð av keldum, tí uttan mun til, hvussu keldurnar verða viðgjørdar, so eiga tær allar at verða viðgjørdar við støði í teimum somu keldukritisku amboðum, men tað háttalagsliga konsistenskravið er trupult at fáa eyga á her.

Heldur ikki er tað konsistent at brúka upplýsingar í eini keldu til at kasta illgruna á ein ávísan persón, tá vit vita, at upphavsmaðurin til kelduna beinleiðis útihýsti tí, sum illgitingin leggur upp til. Tað er inkonsistent. Kortini ger Guttesen akkurát tað í sambandi við illgiting móti Nólsoyar-Pálli um landsskaðiliga atferð í 1808, tá hann uttan keldu illgitir, at Nólsoyar-Páll skuldi havt givið Hompesch upplýsing um vørur at ræna í Havn.

**Kontekstur.** Eitt annað, sum søgufrøðingar mugu hugsa um er, at keldur og hendingar mugu skiljast og tulkast í einum størri konteksti ella samanhangi. Skulu vit skilja hendingina, tá ið Nólsoyar-Páll í 1807 legði kornfarm upp í Hvalba, so mugu vit seta hendingina inn í rætta kontekstin. Tað merkir, at tað er ikki einans neyðugt at kanna, hvar vøran sambært skjølunum skuldi leggjast upp (hesi skjølini, sáttmálin millum Nólsoyar-Páll og einahandilin, verða heldur ikki løgd fram av Guttesen), men eisini um tørvur var á korninum í Suðuroy og hvussu støðan var í Havn, har kornið sambært Guttesen átti at verið lagt upp. Eisini má kannast, um tað var nakað heilt serstakt at fara inn á Hvalba í Suðuroy, um umstøðurnar so vanliga vóru tær somu, og

um myndugleikarnir átalaðu Nólsoyar-Páll fyri at hava lagt kornfarm upp í Hvalba. Harumframt var stórkríggj í Evropa, sum gjørdi avbjóðingarnar í Norðuratlantshavinum heilt øðrvísi enn í friðartíð. Konteksturin er tann størri samanhangurin, kringumstøðurnar, sum hendingar og gerðir mugu setast í samband við fyri at geva eina rætta mynd av teimum. Heldur ikki er tað óviðkomandi, at tað var hægsti embætismaður í Suðuroy, sýslumaðurin, - umframt prestin - sum gav Nólsoyar-Pálli boð um at leggja allan kornfarmin upp í Hvalba. Í frásøgnini hjá Guttesen um kornið, sum Nólsoyar-Páll - sambært summum keldum varð hann tvingaður til tað - legði upp í Hvalba, verður konteksturin illa lýstur, men hendingin verður kortini aftur og aftur søgd at vera brot á allar siglingarreglur og sáttmálar, uttan at víst verður til nakran sáttmála, kontrakt ella kringumstøðu. Heldur ikki vísir hann til nakrar myndugleikar, sum átalaðu ella revsaðu Nólsoyar-Páll fyri at fremja øll hesi brot á reglur og sáttmálar, sum Guttesen vil vera við, at hann her framdi. Í hesum sambandi er tað rættiliga avgerandi, at ein søgufrøðingur ikki á nakran hátt kemur at skilja seg sjálvan og síni egnu sjónarmið sum ein part av søguliga kontekstinum, tí sjónarmið hjá granskaranum eru í veruleikanum fullkomuliga óviðkomandi fyri tann kontekst, sum hendingarnar eru partur av. Í hesum førinum tykist týðiligt, at Guttesen og hansara persónligu sjónarmið um Nólsoyar-Páll verða ein týðandi liður í meting hansara av gerðunum hjá Nólsoyar-Pálli í Hvalba. Tað er røddin hjá Guttesen, sum aftur og aftur hoyrist í tekstinum. Tað kann vera torført at síggja burtur frá sær sjálvum og sínum sjónarmiðum, men tað er ein týðandi uppgáva í sakligari gransking. Í sjálvum sær er tað ikki ein trupulleiki, at høvundurin, stílur og frásøguháttur, sæst aftur í tekstinum, men tað verður ein trupulleiki, um røddin hjá høvundinum ikki verður stuðlað av viðkomandi samtíðarkeldum.

Tá ein hending skal lýsast, er avbjóðingin, at hon verður sett inn í tann rætta søguliga, t.e. viðkomandi, kontekstin, men tað er eins avgerandi, at óviðkomandi seinni viðurskifti ikki verða tikin við í metingina av søguligu hendingini. Konteksturin er altíð størri enn bert tann hendingin, sum verður viðgjørd, men hann er hinvegin

altíð avmarkaður. Avbjóðingin hjá einum søgufrøðingi er sostatt bæði at skilmarka og at avmarka søguliga kontekstin. Í hesum førinum ber til at siga, at 1) hendingin verður ikki sett inn í rætta søguliga, t.e. viðkomandi, samtíðarkontekstin, og 2) óviðkomandi seinni viðurskifti, t.d. sjónarmið hjá høvundinum, sum einki hava við viðkomandi søguliga samtíðarkonekstin at gera, verða tikin við í metingina av hesi hending.

Heldur ikki uppáhald hjá honum um, at lítið kom burturúr virkseminum hjá Nólsoyar-Pálli, serliga viðvíkjandi fiskarí, men eisini uppáhald um, at yvirhøvur lá lítið eftir hann í 1808, verða sett inn í viðkomandi kontekst. Í fyrra førinum ber illa til at greina tað, sum kom burturúr fiskiskapinum hjá Nólsoyar-Pálli við deksbáti, uttan at samfelagsligi konteksturin í samtíðini verður tikin við: 1) Kongaligi einahandilin, sum bert hevði ein handil í Havn, hevði ikki gjørt seg kláran at taka móti stórum nøgdum av fiski, so tað var trupult at royna vinnuligan fiskiskap av týdningi, 2) myndugleikarnir í Føroyum, ikki minst Løbner, vóru ímóti, at fríhandil skuldi setast á stovn í Føroyum, 3) heldur ikki helt Løbner, at fiskivinna sum sjálvstøðug vinnugrein var nakað, sum átti at verið raðfest í Føroyum, og 4) einki bendir heldur á, at Nólsoyar-Páll, ið virkaði í einum føroyskum samfelag, har landbúnaðurin var høvuðsvinnan - hann var sjálvur sum kongsbóndi upptikin stóran part av árinum av landbúnaði - og fiskarí bert var stuðul undir landbúnaðinum, bygdi Royndina Fríðu bert til fiskiskap. Kortini royndi hann við síðuna av landbúnaðinum og øðrum virksemi, sum hann tókst við, t.d. millumlandasigling, at fiska. Tann partin lítilsmetir Guttesen týðiliga, uttan at seta hansara virksemi í viðkomandi samfelagsligan kontekst. Avbjóðingarnar vóru so stórar, at heldur ikki royndir í 1820- og 1830-árunum, ið vórðu stuðlaðar av meira framburðssinnaðum amtmonnum, eydnaðust, men tær prógva í sjávum sær, at fleiri nú royndu at flyta føroyska samfelagið tann vegin. Konteksturin, ið Guttesen setur virksemið hjá Nólsoyar-Pálli í samband við, tykist mest vera smugling. Í hesum førinum sær Guttesen heilt burtur frá umhvørvinum, sum Nólsoyar-Páll var partur av í Føroyum, og

sum týðiligir ringvirkningar síggjast av, eftir at hann gekk burtur í 1808. Tá ið Nólsoyar-Páll saman við m.a. Jákupi í Toftum læt Royndina Fríðu byggja suðuri í Vági í 1804, var týðiliga talan um samstarv millum norðoyingar, nólsoyingar og suðuroyingar. Í hesum sambandi er tað løgið, at Guttesen ikki her nevnir, 1) at longu í 1810 høvdu nólsoyingar og suðuroyingar, m.a. Jákup í Toftum í Vági, latið bygt deksbátin Nødvendigheden í Suðuroy, sum m.a. gjørdi nakrar túrar til Skotlands eftir korni í neyðarárinum, men skipið fórst longu í 1810, 2) at í 1813 var aftur bygdur ein deksbátur í Nólsoy, ella 3) at í 1817 var annar størri deksbátur í gerð í Nólsoy. Eisini Løbner hevði tá fingið eyguni upp fyri, at neyðugt var við deksbátum í Føroyum, men hansara sjónarhorn var, at teir vóru neyðugir til at flyta embætisfólk millum oyggjarnar við, meðan hann ikki raðfesti royndir at reka vinnuligan fiskiskap í Føroyum við størri deksbátum serliga høgt.

Hetta eru bert tvey dømi um, at virksemið hjá Nólsoyar-Pálli noyðist at setast inn í samtíðarkontekstin fyri at geva eina rætta mynd av hansara arbeiði og týdninginum av hansara lívsverki. Tá Guttesen sær burtur frá hesum konteksti, er tað greitt, at tann mynd, sum hansara lesarar fáa av Nólsoyar-Pálli, verður skeiklað.

Eisini keldurnar skulu setast inn í ein kontekst. Tað ber t.d. ikki til treytaleyst at taka tað, sum verður sagt í eini rættarviðgerð fyri góða vøru, tí neyðugt er at hava í huga, at persónar eru í eini serligari støðu, har teir skulu verja sínar gerðir. Baugh var í eini tílíkari støðu í rættinum í London í 1811. Vitnisfrágreiðingar í einum ákæruriti í London skulu setast inn í ein rættarligan kontekst í London í 1811. Frágreiðingin hjá Løbner til rentukamarið, eftir at hann í mai 1808 hevði yvirgivið skansan til Clio, eigur at lesast í tí konteksti, at Løbner mótvegis rentukamarinum hevði tørv á at rættvísgera, at hann yvirgav skansan, uttan at eitt skot varð latið av. Ein søgufrøðingur kann ikki treytaleyst taka orðini hjá Løbner til rentukamarið frá 4. juni 1808, har hann rættvísgerð avgerð sína 16. mai 1808 at yvirgeva skansan við, at „blev man her, uden at formode sig noget fjendtligt, pludselig angrebet af en engelsk overlegen Magt“ fyri áljóðandi, uttan fyrst at

hava sett kelduna inn í tann kontekst, at Løbner móti rentukamarinum hevði tørv á at rættvísgera, at hann yvirgav skansan.

Í viðgerð av tekstum mugu søgufrøðingar eisini miðja eftir at skilja høvund og tekst, áðrenn teir brúka tilfar í sínum teksti. Hóast samrøðan millum Nólsoyar-Páll og Bagh neyvan ber niðurstøðuna, sum Guttesen setur fram, so eigur ein høvundur altíð at vera tilvitaður um, hvørjum konteksti upplýsingar í eini keldu eru partar av. Tað ber sostatt keldukritiskt sæð illa til at taka upplýsingar um samrøðu millum Nólsoyar-Páll og Baugh í nógv seinni teksti í álvara, men uttan mun til trúvirðið í einum teksti, so eigur ein søgufrøðingur ongantíð - í øllum førum ikki uttan størsta varsemi og umhugsni - at taka upplýsingar burturúr kontekstinum í tekstinum (í hesum førinum, at Baugh, longu áðrenn hann tosaði við Nólsoyar-Páll, bæði kendi til og ætlaði at hertaka skansan), og brúka tær í einum heilt øðrum samanhangi (at samrøðan var orsøkin til, at Baugh avgjørdi at taka skansan), sum Guttesen ger í sambandi við illgiting sína um leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í skansatøkuni.

Í viðgerðini av spurninginum um, hvør var fyrstur at flyta koppingarevni til Føroya og síðan fór at koppseta, Nólsoyar-Páll í 1805 ella Løbner longu í 1801, er viðgerðin ofta veik og niðurstøður illa grundaðar í keldum, hóast Guttesen hevur rætt í, at Nólsoyar-Páll vallað varð fyrstur at fáa koppingarevni til Føroya og koppseta. Í hesum sambandi er trupulleikin hinvegin, at viðkomandi kontekstur, t.d. at Nólsoyar-Páll gjørdi sjálvboðið arbeiði fyri føroyskar heilsumyndugleikar, ikki er partur av viðgerðini hjá Guttesen av hesum spurninginum. Uttan mun til viðgerðina av hesum spurningi annars, so er tað misvísandi bert at samanbera tað, ið Løbner skuldi havt gjørt fyri at fáa koppingarevni til Føroya, við tað, ið Nólsoyar-Páll gjørdi hesum viðvíkjandi, uttan at konteksturin, t.d. at annar var embætismaður og hin handlaði sum privatmaður, er partur av viðgerðini.

Kanska greiðasta dømi um, at hending ikki verður sett í rætta kontekstin, er søgan um miseydnaðu avtaluna millum Løbner og Nólsoyar-Páll í mai-juni 1808, tá ætlanin hjá Løbner var, at Nólsoyar-Páll skuldi fara ein túr til Danmarkar við brøvum fyri at kunna um

vánaligu støðuna í Føroyum og tørvin at fáa korn skjótast til bar. Guttesen illtonkir í hesum sambandi Nólsoyar-Páll fyri at hugsa meira um egnan vinning enn um hungrandi landsmenn og at rýma undan neyðarrópinum frá Løbner. Konteksturin er, at Nólsoyar-Páll ikki vildi góðtaka treytirnar hjá Løbner, sum vóru, at hann skuldi sigla báðar vegir uttan farm. Í veruleikanum var tað bert av neyð, at Løbner hevði vent sær til Nólsoyar-Páll, sum hann ikki hevði hug til at senda nøkur brøv við, tí einki skip og einki korn var komið til Føroya síðan oktober 1807, tá Nólsoyar-Páll kom við 250 tunnum. Tá boðini 27. juni 1808 komu til Havnar um, at farmaskip hjá handlinum loksins varð komið á Hvalba og varð á veg til Havnar við 500 tunnum av korni, sum lætti um neyðina, gjørdi Løbner av heldur at senda brøvini við hesum skipinum. Nólsoyar-Páll fór tí 29. juni til Danmarkar eftir korni uttan eina avtalu við Løbner. Hóast Guttesen hevur allar upplýsingarnar, so setur hann ikki miseydnaðu avtaluna millum Løbner og Nólsoyar-Páll í hendan kontekstin, men illgitir, at Nólsoyar-Páll sveik sínar hungrandi landsmenn og rýmdi frá neyðarrópinum. Hann sær enntá burtur frá eini keldu, ið týðiliga bendir á, at Løbner sjálvur valdi ikki at senda brøvini við Nólsoyar-Pálli, men brúkar kelduna í øðrum høpi, har hann hevur tørv á at byggja onkran illgruna móti Nólsoyar-Pálli.

Yvirhøvur ber til at siga, at verkið hjá Guttesen líðir undir, at ov stór herðsla verður løgd á gerðir og mistøk hjá ávísum persónum, meðan tann stóri samanhangurin - konteksturin - ofta verður burtur í tráðanini eftir at finna frágreiðingar um samansett viðurskifti í einstøkum gerðum og mistøkum hjá ávísum persónum.

Verða keldur og hendingar settar inn í skeivan søguligan kontekst, kann viðgerðin gerast heilt villleiðandi.

**Analogi.** Í søguligari gransking ber eisini til at kasta ljós yvir ávísa hending við at samanbera hendingina við aðrar líknandi hendingar, men tá er neyðugt at vera serstakliga varin. Samfelagsgranskarar, sum fáast við komparativa gransking, vita, at eingi viðurskifti eru samlík, og at ofta eru munirnir millum dømini eins stórir og nógvir

sum líkleikarnir. Søgufrøðingar vita, at ongar søguligar hendingar eru samlíkar ella endurtaka seg.

Tá hendingar verða samanbornar, er tað tí alneyðugt at gera sær greitt, hvørjir líkleikar og munir eru millum hendingarnar. Í sambandi við kornfarmin, sum Nólsoyar-Páll legði upp í Hvalba fyrst í oktober 1807, hevði tað verið upplagt at samanborið hesa hendingina við aðra hending í Hvalba í juni 1808, tá ið Svarrer eisini legði kornfarm upp í Hvalba. Hendingarnar liggja í tíð og stað heilt tætt at hvørjari aðrari, og konteksturin við vørutroti og flutningstrupulleikum undir Napoleonskríggjunum átti at gjørt hesar hendingar sambæriligur.

Kortini eru munir millum kontekstin, sum hesar hendingar mugu setast í samband við, t.d. var vørunøgdin í Føroyum ikki tann sama í 1807 sum í 1808, og Nólsoyar-Páll sigldi við egnum skipi, meðan Svarrer sigldi við skipi hjá einahandlinum. Tí er neyðugt hjá einum søgufrøðingi at vera tilvitaður um hesar munir, tá ið hann samanber hendingarnar. Í hesum sambandi kunnu vit siga, at Guttesen nevnir báðar hendingarnar, enntá á somu síðu, men hann ger av onkrari grund *onga* samanbering millum hendingarnar ella tann kontekst, sum gerðirnar hjá Nólsoyar-Pálli og Svarrer eru partar av. Tað tykist eitt sindur løgið, serliga tá ið Guttesen fellur ein harðan dóm yvir tað, sum Nólsoyar-Páll gjørdi, meðan hann onga ábreiðslu gevur Svarrer. Hann er ikki áhugaður í Svarrer, men bert í tí, sum føroyingarnir Evensen, Schrøder og Nólsoyar-Páll gjørdu. Tað er ikki vanligt, at granskarar døma - lasta - søguligar persónar, men í øllum førum eigur konsekvensur at vera í.

Aðrastaðni *ger* Guttesen samanberingar millum hendingar, sum hann heldur vera sambæriligar, men tykist ikki tilvitaður um munirnar millum hendingarnar. Tað er rætt, sum Guttesen upplýsir, at Stopford, bretski skiparin á HMS Spencer, ið í september 1807 royndi at taka skansan í Kristianssand, og Baugh, skipari á HMS Clio, sum tók skansan í Havn í mai 1808, vóru partur av sama kríggi – t.e Napoleonskríggjunum. Í so máta er tað upplagt at samanbera hendingarnar, men Guttesen tykist ikki heilt tilvitaður um sera viðkomandi munir.

Tað eru í øllum førum tveir munir, sum tykjast viðkomandi. Annar er, at Spencer flýddi úr Kristianssand, tá ið skot vórðu latin av, og bretar sendu ongan annan størri herflota til Kristianssand fyri at taka skansan (sum Guttesen grundgevur við í sambandi við síni meting av avgerð hjá Løbner at yvirgeva skansan í Havn), meðan Løbner yvirgav skansan í Havn til Baugh uttan at nakað skot varð latið av. Hin munurin er, at Spencer var úti eftir einum stórum donskum herskipi, sum lá í havnini í Kristianssand, meðan einki skip lá í Havn. Guttesen nevnir bert tann fyrra munin, men hann gagnnýtir hann ikki til nakað í samanberingini. Tað tykist eitt sindur løgið, serliga tá hann brúkar samanberingina millum hendingarnar til at grundgeva fyri, at Løbner gjørdi tað einasta rætta, tá hann yvirgav skansan í Havn uttan bardaga. Hetta er í veruleikanum ein heilt margháttlig niðurstøða. Í veruleikanum átti samanberingin at leitt hann til ta niðurstøðu, at støðan í Havn ikki var heilt vónleys, og at tað ikki hevði verið ómøguligt at rikið Baugh burtur við at latið skot av. Tað eru enntá fyrstu honds keldur varðveittar, sum Guttesen veit um, men ikki gagnnýtir, sum vísa, at hetta sjónarmið eisini var millum fólk í Havn í samtíðini. Hann kundi eisini brúkt samanberingina til at vísa á, at hevði tað eydnast at rikið Baugh burtur, so hevði bretska stjórnin neyvan sent nakran størri flota til Føroya fyri at taka og oyða skansan, men hann ger tað øvugta. Eisini kunnu vit ganga út frá, at viljin hjá Spencer til at hertaka skansan í Kristianssand, har eitt stórt danskt herskip lá og fjaldi seg, átti at verið størri enn viljin hjá Baugh til at taka skansan í Havn, har eingi skip lógu. Tað er eyðsæð, at aðrir munir eisini eru millum hesar hendingarnar, men niðurstøðan hjá Guttesen tykist margháttlig í mun til tann mun, sum hann sjálvur nevnir, og hon verður enn margháttligari sæð í mun til tað, sum Stopford og Baugh ætlaðu sær. Guttesen kundi eisini samanborið við onnur líknandi dømi, m.a. tá bretsk herskip við støði í ætlanum frá admiralitetinum í London 24. oktober í 1808 lupu á Christiansø skansan við Bornholm. Kohl kommandantur og manningin á skansanum vardu seg so væl, at bretsku herskipini góvu upp. Hóast boðini komu úr London, royndu bretar ongantíð

aftur at taka skansan. Hví skuldi admiralitetið í London sent Baugh hjálp til at taka skansan í Havn, sum hann ikki hevði fingið boð um at taka? Tað kundi verið ein viðkomandi spurningur at sett. Her er hinvegin í høvuðsheitum talan um vitan, sum er fingin til vega eftir hendingarnar, ið kann gera okkum – ikki aktørar í samtíðini – betur før fyri at meta um støðuna hjá teimum báðum kommantantunum í Kristianshavn og Tórshavn. Felags fyri allar kommandantarnar mundi vera, at teir, tá teir hvør í sínum lagi tóku sínar avgerðir, illa kundu vita, um bretar fóru at koma aftur við uppaftur sterkari hermegi, um tað eydnaðist teimum at reka herskipini burtur.

Niðurstøðan er, at tað er ofta upplagt at finna analogiir, sum kunnu kasta nýtt ljós á ávísa søguliga hending, men tað er eisini neyðugt at vera serstakliga tilvitað/ur um munir, sum altíð eru millum søguligar hendingar.

**Koherensur.** Tá inkonsistensur (mótstríð) er millum keldur, er neyðugt at vraka onkra keldu, men onkuntíð ber til at tulka ósamsvar, sum tóktist vera mótstríð millum keldur, burtur. Samstundis kann kelduviðgerðin leiða søgufrøðingin til at finna frágreiðingar um, hví ósamsvar er millum keldur. Tann væleydnaða framsetingin eigur at vera so koherent (samanhangandi), at hon ikki bara sjálv er uttan mótstríð, men eisini grundar seg á keldurnar og samstundis hevur eitt svar upp á, hví keldutilfarið er til, og hví eitt møguligt ósamsvar er millum keldurnar. Søgufrøðingurin kann ikki altíð ganga út frá, at søguligir persónar altíð eru álítandi ella bera seg skilagott at, men hann noyðist at stremba eftir at seta fram svar upp á sínar spurningar, sum hanga saman, og sum samsvara við keldutilfarið, ið hann hevur atgongd til. Tað ber ikki til at útihýsa tí møguleikanum, at tað ber til at seta fram ymiskar koherentar frágreiðingar um somu spurningar við støði í sama keldutilfari. Tað er møguligt, at ymiskir søgufrøðingar eftir at hava viðgjørt keldutilfarið koma fram til ymiskar metingar av, hvør partur av keldutilfarinum er avgerandi og hvør partur er minni avgerandi, men tann ideella støðan hjá einum søgufrøðingi er, at framsetingin í sjálvum sær er koherent, og at hon samsvarar við

og greiðir frá keldutilfarinum – eisini hví eitt ávíst keldutilfar ikki er eftirfarandi ella beinleiðis gevur falskar upplýsingar.

Framsetingin hjá Guttesen er, sum víst á omanfyri, í støðum inkonsistent (mótstríðandi), og tað er onkuntíð soleiðis, at hon heldur ikki er koherent (samanhangandi). Í summum førum verða niðurstøður gjørdar, uttan at alt viðkomandi tilfar verður gagnnýtt, og tað er heldur ikki altíð, at tað keldutilfar, sum niðurstøður verða grundaðar á, er serliga viðkomandi. Heldur ikki er altíð samanhangur millum tað, sum hesar keldur upplýsa, og tað, ið niðurstøðan sambært Guttesen er. Harumframt eru frágreiðingar ofta einfaldar (einstreingjaðar), soleiðis skilt, at orsøkir verða sagdar at vera *antin* ein *ella* ein onnur, meðan koherenshugtakið leggur upp til samansettar (heildar)frágreiðingar, t.e. at talan er um fleiri samanspælandi orsøkir. Guttesen leggur upp til, at tað *antin* var Nólsoyar-Páll *ella* manningin á loðsbátinum, ið fekk Baugh at taka og oyða skansan, meðan samtíðarkeldurnar og koherenshugtakið leggja upp til, at talan ofta er um samansettar frágreiðingar.[29] Nógv bendir eisini á, at Guttesen heldur „upplýsingar," sum ikki einans Nólsoyar-Páll, men fleiri føroyingar góvu Baugh um styrkina á skansanum, vera sjálvstøðugar „orsøkir," men tað er óivað ein misskiljing. Tað er nógv sannlíkari, at Baugh longu 28. apríl 1808, tá hann fyrstu ferð legði merki til og fregnaðist eftir upplýsingum um styrkina á skansanum, hevði ætlanir um at taka skansan, og at hesar ætlanir hansara vóru orsøkin til, at hann fregnaðist eftir upplýsingum um skansan. Hetta samsvarar eisini við tað, sum samtíðarkeldur upplýsa.

Ein ávís upplýsing, t.d. upplýsing, sum Baugh fekk frá Nólsoyar-Pálli 1. mai 1808, ella upplýsingar, ið Baugh fekk frá skansamonnum á loðsbátinum 28. apríl, Nólsoyar-Pálli 1. mai og havnarmonnum 15. mai, vóru við øðrum orðum hvørki hvør sær ella í felag *orsøkin*

---

29 Í ummæli av bókini hjá Guttesen (Sølvará 2020) havi eg grundgivið fyri, at keldutilfarið til skansatøkuna leggur upp til meira samansettar frágreiðingar um hertøkuna, men tað tykist ikki hava ávirkað Guttesen, sum í eini viðmerking til mítt ummæli framvegis hugsar í hesum sera einføldu - t.e. einstreingjaðu antin ella - frágreiðingunum (Guttesen 2020). Viðvíkjandi einføldum (einstreingjaðum) og samansettum frágreiðingum kann vísast til Kjeldstadli (2001, s. 258-262).

til, at Baugh hertók skansan, men tær vóru einans partur av tí fregnartænastuarbeiði, sum Baugh útinti í sambandi við, at hann ætlaði at taka og oyðileggja skansan. Helst var avgerðin hjá Løbner at senda bátar út á Clio eisini partur av *orsøkunum* til, at Baugh tók skansan. Her skulu vit minnast til, at ákæruritið í rættinum í London í 1811 skal tulkast og ikki bert lesast bókstavliga.

Heldur ikki umrøður Guttesen tann møguleika, at ætlanirnar hjá Baugh at taka skansan kunnu síggjast sum eitt natúrligt framhald av virksemi hansara at taka danskar eysturindiafarar á leiðini kring Føroyar. Skansin í Havn kundi brúkast sum skjól hjá hesum donsku skipum, og tað er sannlíkt, at tað er fyrst og fremst í hesum stóra samanhanginum, at vit eiga at síggja ætlanir hjá Baugh at taka skansan. Tann herðsla á Nólsoyar-Páll, sum Guttesen er so upptikin av, kann síggjast sum eitt dømi um einstreingjaða idealistiska persónssøgu, har frágreiðingar bert verða funnar í einstøkum persónum og teirra gerðum, meðan tann stóra myndin hvørvur.

Guttesen leggur eisini upp til, at tað *antin* var Skipar Hansen, prestur í Norðuroyggjum, *ella* Nólsoyar-Páll, sum fekk Hompesch til at koma aftur á Havnina at ræna handilin, meðan koherenskravið her leggur upp til eina samansetta frágreiðing, sum skal grundast á keldurnar og kunna forklára keldurnar. Guttesen byggir ikki sín illgruna um, at Nólsoyar-Páll fekk Hompesch at koma aftur á Havnina at ræna á nakra viðgerð av søguligum keldum, men hann tekur eina upplýsing óviðgjørda úr eini nógv seinni framseting, sum eisini gevur skeiva upplýsing um Nólsoyar-Páll og sær burtur frá samtíðarkeldum. Hartil kemur, at samtíðarkelda upplýsir, at upplýsingin um, at handilin stóð órørdur, hevði Hompech longu fingið frá eiðismonnum, áðrenn hann fyrstu ferð kom á Havnina, tá ið hann eisini hevði tveir miðvingar við umborð sum loðsar. Eisini funnu menn hansara fyrstu ferð teir vóru á Havnini útav, at vørur og peningur var í einahandlinum. Hetta leggur alt upp til eina meira samansetta frágreiðing. Her áleggur koherrenskravið, at framsetingin, sum sjálv skal hanga saman, eisini skal hanga saman við eini neyvari viðgerð av øllum tí fjølbroytta keldutilfarinum, men ta viðgerðina finna vit

ikki so lætt hjá Guttesen. Harumframt sær hann burtur frá kendum samtíðarkeldutilfari, sum upplýsir, at Nólsoyar-Páll og Hompesch als ikki sótu væl um sátt, umframt at Nólsoyar-Páll var í Havn 1. juni, meðan Hompesch var har, og at hann tí illa kundi hugsast at ferðast millum oyggjarnar og leggja duldar ætlanir saman við Hompesch. Koherrenskravið krevur ikki bert, at sjálv framsetingin skal hanga saman, men hon skal eisini hanga saman við teirri samlaðu kritisku viðgerðini av øllum keldutilfarinum. Hetta er hinvegin nakað, sum onkuntíð manglar hjá Guttesen, har kent og viðkomandi tilfar ikki verður tikið við í viðgerðina.

Í sambandi við yvirgevingina av skansanum heldur Guttesen eisini í samsvari við einstreingjaðar frágreiðingar um, at Løbner mátti velja ímillum *antin* at yvirgeva skansan til Baugh *ella* at lata Havnina ræna og brenna í grund (Guttesen 2019, s. 364), meðan bæði koherrensmeginreglan og ítøkiliga empiriska tilfarið leggja upp til, at Løbner hevði aðrar møguleikar eins og samanberingin við aðrar líknandi støður (t.d. Christiansholm og Christiansø) týðiliga vísir, at valið hjá Løbner ikki einans stóð millum yvirgeving ella oyðilegging. Alternativið til yvirgeving var ikki rán og oyðilegging, sum Guttesen vil vera við, men mótstøða. Og tað tykist sannlíkt, at Baugh hevði flýggjað av Havnini, um Løbner hevði gjørt av at lata skot av móti Clio. Eisini her hava vit tørv á samansettum frágreiðingum ella tulkingum og ikki teimum einstreingjaðu frágreiðingunum hjá Guttesen.

Omanfyri er nevnt undir konteksti, at eisini keldur, t.d. frágreiðingar hjá Løbner til rentukamarið, har hann upplýsir, at hann m.a. yvirgav skansan, tí álopið kom óvart á, ikki treytaleyst kunnu takast fyri áljóðandi, men at tær fyrst mugu setast inn í rætta kontekstin, t.e. kringumstøðurnar, t.d. at Løbner var í eini støðu, har hann hevði tørv á at rættvísgera, at hann yvirgav skansan. Men tað er í sjálvum sær ikki nóg mikið, tí keldur mugu eisini samanberast við aðrar keldur, í hesum førinum kelduupplýsingar um, at Løbner 5. mai 1808 brynjaði skansan til orrustu, tá hann frætti, at herskipið var bretskt og tí fíggindaskip. Koherrenskravið er holistiskt, t.e. at tað áleggur, at framseting, keldur og kelduviðgerð hanga saman sum ein heild, og

tí er eisini neyðugt í kelduviðgerðini at seta allar viðkomandi keldur í samband við hvørja aðra. Tað ger Guttesen ikki í hesum sambandi, men taka vit nevnda kontekst og keldur við í metingina av avgerðini hjá Løbner, so ber illa til at koma til ta niðurstøðu, at skansaálopið kom óvart á 16. mai 1808. Tað merkir ikki, at avgerðin var skeiv, men einans 1) at Guttesen ikki setur frágreiðingina hjá Løbner í viðkomandi kontekst, 2) at hann ikki samanber frágreiðingina hjá Løbner við aðrar viðkomandi keldur, og 3) at hann – sum nevnt undir analogi – ger eina villleiðandi samanbering millum støðuna hjá Løbner í mai 1808 og eina líknandi støðu í september 1807 hjá kommandantinum á skansanum í Kristianssand í Noregi. Í ongum av punktunum hómast koherrenskravið.

Í søgugranskingini eins og innan aðra gransking kemur tað stórt sæð ikki fyri, at einans ein *orsøk* er til ávísar hendingar, men talan er nærum altíð um samansettar *frágreiðingar*, sum fevna um nógvar ymiskar orsøkir.

Heldur ikki í viðgerðini av, hvussu koppingarevnið kom til Føroya fyrst í 1800-talinum megnar Guttesen at gera seg leysan av einføldum (einstreingjaðum) frágreiðingum, men fer ofta í somu grøv sum tey, ið hann vil gera upp við, tá hann tykist halda tann mest avgerandi spurningin vera, hvør persónur fyrst kom til Føroya við koppingarevninum. Síggja vit burtur frá, at tað er trupult at síggja, hvønn leiklut Løbner hevði í hesum, so benda keldurnar á, at talan var hvørki um eina hending ella fleiri av hvørjari aðrari óheftar hendingar, sum einstakir persónar óheft av hvørjum øðrum útintu, men talan var um eina sera samansetta gongd yvir nógv ár, sum eisini snúði seg um at fáa koppingarevnið breitt út í oyggjunum, sum stovnar og persónar, ið lærdu av hvørjum øðrum, vóru við til at fremja í einum samansettum samspæli: tørvur er við øðrum orðum á meira samansettum frágreiðingum. Heldur enn at gera upp við einfaldar frágreiðingar fyri at seta nýggjar einfaldar frágreiðingar í staðin, er neyðugt at leita eftir øllum tí samansetta, sum hómast í ella aftan fyri keldurnar, víðka um sjónarhornið og seta fram samansettar frágreiðingar í staðin fyri ta einføldu orsøkina.

Sambært koherrenskravinum skal teksturin sum heild, t.e. framsetingin, eisini hanga saman sum ein heild. Her kundi verið spurt, hvussu tað hongur saman, at Nólsoyar-Páll í 1805 sambært myndugleikunum gjørdi eitt stórt og virðismett arbeiði fyri at fáa frískt koppingarevni til og útbreitt í Føroyum, meðan sami maður av Guttesen nærum verður lagdur undir at vera landasvíkjari í 1808, tá ið hann verður lagdur undir illgruna fyri at hava givið Hompesch baróni upplýsingarnar, sum fingu hann til at koma aftur á Havnina fyri at ræna handilin fyri vøru. Hvussu kann ein persónur vera so hjálpsamur móti sínum landsmonnum í fyrra førinum, samstundis sum hann í øðrum førum í sama teksti verður lagdur undir illgruna fyri at svíkja sínar hungrandi landsmenn? Hvussu ber tað til, at Nólsoyar-Páll sambært Guttesen í mai 1808 royndi at hótta Baugh til ikki at leypa á skansan og taka Havnina, tá sami Nólsoyar-Páll sambært Guttesen í juni 1808, t.e. bert ein mánað seinni, verður lagdur undir illgruna fyri at hava eggjað Hompesch til at koma aftur á Havnina fyri at eyðræna handilin? Hetta er sera trupult at fáa samanhang í hjá einum lesara, sum onga (koherrenta) frágreiðing fær í tekstinum upp á, hvussu ein og sami persónur kann bera seg so inkonsistent at móti sínum landsmonnum.

**Evidensur.** Meðan koherrenshugtakið tekur støði í einum kravi um yvirskipaðan samanhang í framsetingini og samanhang millum framseting og viðgerðina av keldunum, so ber til at siga, at evidenshugtakið tekur støði í, at allar upplýsingar í framsetingini skulu grundast á keldur, sum hava staðið allar keldukritiskar royndir. Tá Guttesen grundar illgrunan um, at tað vóru upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli um, at skansin varð vardur av 300 monnum við nógvum ræðuliga stórum kanónum, sum fingu Baugh til at taka skansan, so er tað neyðugt, at hendan eina upplýsingin 1) kann standa fyri eini keldukritiskari roynd, og, um hon kann standa royndina, 2) at atvoldarsamanhangur kann skapast millum upplýsingina og tað, at Baugh avgjørdi at taka skansan, og 3) at tað ber til at útihýsa, at talan kann hava verið um aðrar orsøkir til, at Baugh avgjørdi at taka skansan.

Ber tað ikki til, so hevur Guttesen ongan evidens fyri hypotesuni um leiklutin hjá Nólsoyar-Pálli í skansatøkuni. Omanfyri er víst á, at ein so einføld orsøk, sum ikki greinar samansettar frágreiðingar, valla er sannførandi.

Kanna vit eftir, er talan um upplýsing, sum Guttesen hevur frá Jákupi Jakobsen, ið skrivaði um Nólsoyar-Páll í 1892 – t.e. at upplýsingin er ikki fest á blað, fyrr enn góð 80 ár eftir hendingina. Hetta ger í sjálvum sær upplýsingina ivasama, men hvat ger Guttesen fyri at grundgeva fyri, at upplýsing, um hvørja hann sigur „vit vita," er álítandi? Einki, ella tvørturímóti, hann sigur í veruleikanum, at hon má vrakast. Guttesen upplýsir, sum er rætt, at Jákup Jakobsen hevur upplýsingina frá Poul Johannesen, sum var bróðursonur Nólsoyar-Páll, men hann sigur samstundis, at frásøgnin hjá Poul Johannesen er so óálítandi, at hon má vrakast sum kelda. Í øllum førum er tað tað, sum Guttesen sigur um hesa keldu í øðrum høpi, men tað sama má vera galdandi her. Tað vil við øðrum orðum siga, at Guttesen byggir tesuna um, at tað vóru upplýsingar, sum Nólsoyar-Páll gav Baugh um styrkina á skansanum, sum fingu Baugh til at hertaka skansan, á eina keldu, sum hann sjálvur heldur má vrakast sum kelda. Tað er ikki neyðugt at taka støðu til, um Guttesen hevur rætt í, at keldan má vrakast, men úr einum evidenssjónarhorni er tað margháttligt, at ein søgugranskari byggir eina hypotesu á eina – og einans eina – keldu, sum hann sjálvur heldur má vrakast sum søgulig kelda. Tað kunnu eisini vera góðar grundir til at ivast í, um hald er í eini upplýsing, sum ikki er fest á blað fyrr enn meira enn 80 ár eftir, at hendingin, sum upplýsingin sipar til, gekk fyri seg. Støðan hjá Guttesen í mun til evidenskravið verður enn løgnari av, at hann heldur, at Jákup Jakobsen, sum niðurskrivaði frásøgnina, skapti mytuna um Nólsoyar-Páll.

Kortini heldur Guttesen í øðrum høpi somu keldu vera góða at brúka til at vísa á, at Nólsoyar-Páll í samtíðini var ein rættiliga umstríddur persónur (Guttesen 2019, s. 429), nakað, sum eisini Jákup Jakobsen endurgevur (Jakobsen 1912, s. 166), uttan iva eisini eftir somu frásøgnini hjá Poul Johannesen frá 1880-árunum. Heldur ikki her er lætt at síggja nakran keldukritiskan samanhang millum tað, sum Guttesen sjálvur

sigur, at ávís kelda kann brúkast til, og tað, sum hann sjálvur brúkar somu seinnu frásøgn til í síni bók um Nólsoyar-Páll.

Keldukritiskt sæð er tað við øðrum orðum ógvuliga ivasamt, um tað ber til at gagnnýta hesa frásøgnina sum evidens fyri, at Nólsoyar-Páll hevur orðað seg soleiðis mótvegis Baugh, sum Jákup Jakobsen upplýsir, men skuldi hann kortini havt gjørt tað, so kunnu upplýsingarnar í sjálvum sær heldur einki siga um, at tær vóru orsøkin til, at Baugh avgjørdi at taka skansan. Tað er ein annar spurningur, sum Guttesen einki grundarlag hevur fyri at svara játtandi. Tvørturímóti upplýsa hansara egnu samtíðarkeldur, sum mugu metast at hava størri tyngd enn 84 ár yngri upplýsingar hjá Jákupi Jakobsen, at Baugh hevði meira álítandi upplýsingar um styrkina á skansanum, áðrenn hann leyp á skansan, upplýsingar um, at 80 mans vardu skansan. Heldur ikki vita vit nakað um, at tað vóru *yvirmettar* upplýsingar um styrkina á skansanum, sum fingu Baugh til at taka avgerðina um at hertaka skansan. Eiheldur vita vit nakað um, *nær* hann tók ta endaligu avgerðina. Tað er møguligt, at hann ikki tók endaligu avgerðina fyrr enn 15. mai, tá hann hevði upplýsingar, sum gjørdu, at hann metti seg hava møguleika til tað, og Løbner, sum sendi triðing av manningini út á Clio, hevur valla gjørt tað torførari hjá honum at taka endaliga avgerð at royna at taka skansan. Sjálvur upplýsti Baugh einans, at hann helt tað vera sína skyldu at taka skansan, um tað var møguligt. Tað mundi eisini vera ein grund til, at Baugh meira enn einaferð undan hertøkuni sigldi tætt framvið Havnini og í einar tvær vikur eisini fregnaðist hjá øðrum bátum – í øllum førum tveimum – eftir upplýsingum um styrkina á skansanum.

Guttesen hevur við øðrum orðum ongan evidens fyri, at tað vóru upplýsingar frá Nólsoyar-Pálli, sum fingu Baugh at taka skansan, tvørturímóti, 1) so stendur tann upplýsingin, sum hann byggir illgrunan á, ikki nakra keldukritiska roynd, serstakliga ikki hansara egnu, 2) skuldi upplýsingin kortini verið álítandi, ber ikki til at skapa atvoldarsamanhang millum upplýsingina og avgerðina hjá Baugh at taka skansan, og 3) tað ber ikki til at útihýsa øðrum orsøkum; tvørturímóti benda álítandi samtíðarkeldur á aðrar orsøkir. Tað er ikki

altíð heilt lætt at finna evidens fyri hypotesum, men í hesum førinum er keldukritiska grundarlagið ikki-eksisterandi. Í veruleikanum ber til at siga, at vit hava keldukritiskan evidens fyri at siga, at hendan hypotesan er afturvíst.

Hinvegin hevur Guttesen grundgevingar fyri, at Nólsoyar-Páll valla var fyrstur við koppsetingini í Føroyum, men hann fer eitt sindur lættari um keldurnar, tá hann heldur Løbner vera millum tey fyrstu at koppseta. Harafturímóti hava vit í frágreiðingum frá koppingarmyndugleikunum, donskum bløðum og í kirkjubókum evidens fyri, at Nólsoyar-Páll í 1805 fekk til Føroya fríska koppseting, sum varð nógv brúkt at koppseta við. Guttesen er tí óneyðuga varin, tá hann ikki vil fara longur enn at siga, at Nólsoyar-Páll „møguliga hevði vaccinu við“ (Guttesen 2019, s. 169) í 1805, tí her er talan um upplýsingar, sum er váttaðar í fleiri av hvørjari aðrari óheftum samtíðarkeldum – Dagen, koppingarnevndini og kirkjubókum. Keldukritiskt er óneyðugt at ivast.

**Sannlíkindi.** Hóast søgufrøðingar greina keldurnar við keldukritiskum amboðum, seta hendingar, sum teir fáa burturúr teimum í tann rætta kontekstin, samanbera við aðrar líknandi hendingar, brúka keldukritisku amboðini til at sleppa av við inkonsistensir, tryggja sær, at teir altíð hava evidens fyri tí, sum teir skriva, og arbeiða yvirskipað við koherenshugtakinum, so er og fer tað ongantíð at vera soleiðis, at allar upplýsingar í eini framseting byggja á fakta. Tað fer ongantíð at vera soleiðis, sum Guttesen vil vera við í síni bók, „at alt, sum verður lagt fram og sagt, skal dokumenterast“ (Guttesen 2019, s. 17). Tað er, sum víst er á her, heldur ikki soleiðis í bókini hjá Guttesen. Summir vísindaástøðingar arbeiða við einum korrespondenshugtaki fyri sannleika, t.e. at eitt uppáhald er satt, tá og einans tá tað samsvarar við veruleikan, og at øll uppáhald í eini framseting eiga at sipa til eitt empirisk fyribrygdi/fakta, sum samsvara – t.e. korrespondera - í 1 til 1 lutfalli við hvørt annað. Men skuldu granskarar brúkt eitt tílíkt sannleikshugtak, so hevði øll vitan staðið fyri falli.

Fyri tað fyrsta ber ikki til at deila tann samansetta veruleikan sundur í ósamansett empirisk fyribrigdi/fakta, sum einfaldir setningar sipa til. Í øðrum lagi hava vit onga beinleiðis atgongd til veruleikan, í hesum førinum fortíðina, sum er farin og altíð vil verða miðlað til granskarar umvegis óbeinleiðis heimildir. Í triðja lagi vita vit ikki um orð, sum altíð avmarka, megna at lýsa veruleikan óheft og í øllum sínum fjølbroytni, ella um málið (subjektið) yvirhøvur kann fatast óheft av veruleikanum (objektinum). Í fjórða lagi mugu fakta - um tað finst nakað ótulkað fakta - skiljast og tulkast í ymiskum søguligum kontekstum, og søgufrøðingar noyðast í sínum framsetingum at byggja brúgv - onkur sigur beinleiðis yrkja - millum tær faktuellu upplýsingarnar, sum teir fáa burtur úr keldunum, tí uttan mun til, hvussu nógvar upplýsingar ein søgufrøðingur hevur atgongd til, hevur hann ongantíð so nógvar upplýsingar, at tær umboða allan veruleikan; hann hevur altíð avmarkaða nøgd av upplýsingum og nógv hol at fylla út við tulking. Í fimta lagi er tað so, at hóast søgufrøðingar skuldu havt atgongd til øll viðkomandi fakta, er tað framvegis uppgávan hjá søgufrøðinginum at seta spurningar og skapa *samanhangin* millum faktaini, at koma við *frágreiðingum*. Søgufrøðingar skulu hinvegin leggja sær í geyma, at teir ikki hava loyvi til at yrkja ella tulka ímóti sínum keldum. Teir koma helst ongantíð til at lýsa veruleikan sum so, teir koma einans til at brúka keldurnar til at svara upp á ávísar spurningar, sum teir seta.

Hetta eru orsøkir til, at søgufrøðingar ofta sleppa korrespondenskravinum (samsvar millum framseting og veruleika), sum er ómøguligt at liva upp til, og halda seg til koherrenskravið (t.e. samanhang millum ávísan spurdóm og framseting og millum framseting og kelduviðgerð og millum spurdóm og niðurstøðu), sum er trupult, men ikki heilt ómøguligt at miða ímóti. Lyfta vit alt hetta upp á eitt meira prinsipielt stig, kunnu søgufrøðingar ongantíð seta fram framsetingar, sum onga óvissu hava, men teir kunnu og eiga at miða eftir at seta fram ta mest sannlíku frágreiðingina upp á sínar spurningar. Søgufrøðingar fara ongantíð at prógva, at eingi donsk skip lógu á Havnini í apríl-mai 1808, men ein neyv viðgerð

av viðkomandi samtíðarkeldum, m.a. dagbókini hjá Claus Lund og frágreiðingum hjá Løbner til rentukamarið, sum óheft av hvørjari aðrari upplýsa, at fyrsta skipið í 1808 kom í juli, og samsvara við kontekstin í 1808 (hungursneyð og kornmangul), vil óivað leiða flest allar søgufrøðingar til ta niðurstøðu, at tað er rættiliga ósannlíkt, at nakað danskt skip lá á Havnini í tíðarskeiðinum. Heldur ikki er tað sannlíkt, at Løbner hevur givið skeivar upplýsingar um hetta til danskar myndugleikar, sum væl vistu, hvørji farmaskip teir høvdu sent til Føroya við vøru. Í hesum førinum koma søgufrøðingar so tætt at eini endaligari niðurstøðu, t.e. fakta, sum tað er møguligt. Tað ber valla til at prógva, at Baugh visti, at eingi donsk skip lógu á Havnini, men tað er rættiliga sannlíkt, at hann visti tað, tá samtíðarkeldurnar upplýsa, at hann tríggjar ferðir sigldi tætt framvið Havnini og enntá hevði vitjan umborð av skansamanningini. Harumframt sæst einki í samtíðarkeldum til, at hann fregnaðist eftir nøkrum skipum, meðan Clio lá í Havn. Tað ber ikki til at prógva, at Nólsoyar-Páll ikki gav Baugh upplýsingarnar um, at nøkur (donsk) fíggindaskip lógu í Havn, men tað er rættiliga ósannlíkt, at hann gjørdi tað. Í fyrra lagi er tað trupult at staðfesta nakað motiv, og í øðrum lagi upplýsa samtíðarkeldurnar, at hann ávaraði kommandant Løbner um, at eitt bretskt fíggindaskip, sum hevði okkurt í kvittanunum, sigldi millum oyggjarnar. Tá sannlíkindi fyri eini hending skulu staðfestast, er eisini neyðugt at at hava í huga, at hesi sannlíkindini mugu metast í mun til kontekstin og keldurnar. Í sjálvum sær kann tað væl tykjast sannlíkt, at donsk skip lógu á Havnini í apríl-mai, tí skip komu vanliga um várið úr Danmark til einahandilin við og eftir vøru, men verða hesi sannlíkindini sett í samband við kontekstin í 1808, t.e. krígsstøðuna og neyðina í Føroyum, og avgerandi samtíðarkeldur, m.a. dagbókina hjá Lund, frágreiðingar hjá Løbner til rentukamarið og skansaprotokollirnar, sum heldur ikki vita nakað at siga frá um nøkur skip á Havnini í nevnda tíðarskeiði, so verða hesi sannlíkindi stórt sæð beind av vegnum. Sannlíkindi fyri eini ávísari hending er við øðrum orðum ikki einans nakað, sum kann metast í mun til ein almennan samtíðarkontekst, men tey mugu harumframt setast

í samband við ein ítøkiligan kontekst og tað, sum tær viðkomandi samtíðarkeldurnar upplýsa. Verða sannlíkindini fyri eini ávísari hending soleiðis mett í mun til tey krøv um háttalag, sum eru nevnd omanfyri, t.e. endamál, analogiir, kontekst, keldukritiska viðgerð av keldutilfarinum, konsistens, evidens og koherrens, ber til at ganga út frá, at ein søgufrøðingur kemur so tætt upp á søguliga veruleikan, sum tað einaferð ber til, men beinleiðis prógv fyri korrespondensi millum tekst og veruleika er ómøguligt at eftirkanna og staðfesta. Ein søgufrøðingur, sum hinvegin ikki setur sína gransking og framsetingar upp ímóti líknandi fakligum meginreglum, er í stórum vanda fyri at koma til ósannlíkar niðurstøður – skapa nýggjar mytur. Tað ger Guttesen tíverri fleiri ferðir í bókini um Nólsoyar-Páll.

Tað síggja vit í hypotesuni hjá Guttesen um, at Nólsoyar-Páll fekk Baugh til at taka skansan, sum bert byggir á eina nógv seinni frásøgn, ið hann sjálvur heldur vera so óálítandi, at hon má forkastast sum kelda, meðan hann samstundis sær burtur frá samtíðarkeldum, sum geva eina aðra mynd av málinum. Hendan hypotesan livir ikki upp til nakað av krøvunum, sum eru sett fram her. Tað ger tesan hjá Guttesen um, at tað eisini var Nólsoyar-Páll, sum fekk Hompesch at koma aftur á Havnina at ræna handilin, heldur ikki. Hendan hypotesan er einans grundað á eina nógv seinni danska frágreiðing, sum í hesum sambandi heldur ikki nevnir Nólsoyar-Páll, meðan Guttesen sær burtur frá samtíðarkeldum, sum siga eina heldur øðrvísi søgu. Heldur ikki hendan hypotesan livir upp til nakað av teimum fakligu krøvum, sum verða sett fram her. Tað ger hypotesan um, at Nólsoyar-Páll í mars 1808 fór ein skjótan túr til Skotlands heldur ikki. Hon byggir einans á tvær nógv seinni frásagnir, sum heldur ikki upplýsa tað sama, meðan hon beinleiðis er í stríð við samtíðarkeldurnar. Seta vit harumframt hetta í samband við tann ítøkiliga føroyska kontekstin í 1808, t.e. vørutrot og hungursneyð, so minka sannlíkindini eisini uppaftur meira av, at eingin samtíðarkelda, m.a. frágreiðingar frá Løbner, nevnir nakað um, at Nólsoyar-Páll í mars 1808 kom til hungursraktar føroyingar við kornfarmi. Tað ber ikki altíð til at gera niðurstøður út frá tøgn í keldunum, men í hesum førinum er tað rættiliga ósannlíkt,

at eingin kelda skuldi havt nevnt handan túrin. Sannlíkindini fyri, at Nólsoyar-Páll fór handan túrin eru nærum eingi. Heldur ikki er nakað grundarlag fyri at seta fram ta hypotesu, at Løbner var tann fyrsti at flyta frískt koppingarevni „mann av manni" til Føroya og at koppseta í Føroyum. Henda hypotesan hevur 1) einki keldugrundarlag, 2) í kontekstinum er hon rættiliga ósannlík, og 3) hon er afturvíst av samtíðarkeldum – enntá eksplisit av Løbner sjálvum. Tað er ikki vist, at tað í søgugransking er møguligt heilt at koma frá mythos til logos, tí tað vil altíð vera eitt ávíst rúm fyri tulking í søgugransking, men royna søgufrøðingar ikki at halda seg til saklig vísindalig krøv um háttalag, m.a. tílík, ið eru nevnd her, er vandi fyri, at teir koma at at skapa heilt nýggjar mytur.

Óivað er logos eitt ideal, sum tað ikki er møguligt at náa, men í øllum førum eiga søgufrøðingar í sínum vísindaliga arbeiði við keldutilfarinum at stremba eftir at flyta søguna frá mythos og nærri móti logos. Tað kunnu teir einans fremja, um teir í øllum liðum í søgugranskingini halda seg til saklig vísindalig háttaløg.

**Samleiki.** Søga snýr seg um fortíðina, persónar, hendingar, virðir og samfelagsbroytingar, men tað, sum vit vita um okkara egnu søgu sigur okkum eisini nakað um, hvørji vit eru. Og tað uttan mun til, hvussu neyv ella misskilt okkara tulking av fortíðini annars er. Tí snýr søga seg eisini um samleika í samtíðini hjá tulkaranum. Tað kann vera tjóðarsamleiki ella politiskur samleiki av ymiskum slagi, bæði hjá bólkum ella einstaklingum, eisini hjá søgufrøðingum. Søgufrøðingar eiga sjálvandi at fáast við fortíðina við søgufakligum brillum einans, men teir hava eins og øll onnur síni egnu sjónarmið og sannføringar, sum eru truplar heilt at leggja til síðis, tá teir eru í granskaraleiklutinum. Hartil kemur, at bólkasamleikar, t.d. kvinna ella maður, sjálvstýrisfólk ella sambandsfólk, kunnu fáa avgerandi týdning fyri, hvørji evni í fortíðini søgugranskarar í ávísum tíðarskeiðum eru áhugaðir í. Tá vit leggja afturat, at søgugransking er vísindagrein, har ávíst rúm altíð er fyri tulkingum, so merkir tað eisini, at ávíst rúm er fyri, at granskarar leggja part av sær sjálvum niður í tulkingina av fortíðini.

Tí er tað avgerandi, at søgufrøðingar, serliga teir, sum fáast við spurningar, ið teir hava persónlig sjónarmið um, frammanundan gera sær greitt, at støðan er soleiðis, og at teir hugsa sín egna persón inn í háttalagsliga arbeiðið við keldunum og evninum, fyri at teir kunnu taka hædd fyri hesum. Tað ber sjálvandi ikki til at siga alt, tilfarið setur seg uppímóti ávísum tulkingum, og hevur granskarin sakligar háttalagsligar meginreglur fyri eyga, eigur møguleikin fyri, at hansara egnu sjónarmið verða tulkað inn í søguna at avmarkast rættiliga nógv. Restina má søgufrøðingurin fáa burtur við eisini at hugsa sín egna persón og síni sjónarmið sum ein part av háttalagsligu meginreglunum, ið hann arbeiðir við støði í. Tástani er trygd fyri, at sakligheitin ræður.

Og hóast málið hevur sínar avmarkingar, og orðavalið ofta avdúkar rithøvundin, ber til at velja ein meira sakligan og óheftan málbúna og orðaval enn tað, sum onkuntíð verður brúkt í verkinum um Nólsoyar-Páll. Tað er t.d. ikki heilt uttanveltað av Guttesen at brúka føroyska orðið „neyðarrópið“ (Guttesen 2019, s. 315-316) í staðin fyri tað meira óhefta danska orðið „doucumenter“ (Guttesen 2019, s. 308-309) ella fyri tey eins óheftu donsku orðini „Breve“ og „Indberetninger,“ ið viðkomandi samtíðarkeldur brúka. Tað ger Guttesen í sambandi við sína annars frítt íspunnu skuldseting um, at Nólsoyar-Páll rýmdi frá „neyðarrópið“ hjá Løbner. Enn ivasamari er, at ein annar høvundur, Páll J. Nolsøe, sum nýtir eina neyvari føroyska týðing av tí danska orðinum „doucumenter,“ „skjøl,“ verður lagdur undir at vera ósakligur, tí hann brúkar málfrøðiliga neyvaru týðingina (skjøl) og ikki orðing við halli hjá Guttesen (neyðarrópið). Tað er Guttesen, ikki Nolsøe, ið avdúkar eitt týðiligt hall í sínum orðavali, og hann leggur eisini Nolsøe undir at vera ósakligan á hesum grundarlagi. Konteksturin - t.d. at vørutrot var í Føroyum og hungursneyð hótti - er hinvegin eisini avgerandi fyri, um tað, hóast ítøkiliga orðavalið í keldunum tykist óheft, kann rættvísgerast at brúka orðingina „neyðarrópið,“ men í øllum førum er hetta dømi um, at høvundans orðaval hevur stóran týdning fyri meiningina í hansara teksti. Pall J. Nolsøe lýsir væl tann viðkomandi samanhangin uttan at brúka onnur orð enn tey,

sum Løbner sjálvur brúkar, meðan Guttesen við sitatúrvali reingir samanhangin og eisini brúkar orð við halli til at lýsa støðuna.

Men tað er ikki nógv, sum bendir á, at tey, sum knýta sín samleika at gerðum hjá Nólsoyar-Pálli, ella tey, ið ikki gera tað, - ella rættari, tey sum knýta samleikan at m.a. at gera upp við jagliga meting av Nólsoyar-Pálli - megna at halda síni egnu sjónarmið uttan fyri frásøgnina. Bókin hjá Guttesen er bert seinasta staðfestingin av hesum. Søgufrøðingar eiga at byggja á sakligar meginreglur, sum tryggja, at teir sjálvir ikki eru ov sjónligir í teirra tulkingum, men tað fara altíð at vera eyðkenni í tekstunum, m.a. stílur, sum stava frá høvundinum.

# Niðurstøða

Søga er vísindagrein, sum lýsir, greinar og tulkar evni í eini fortíð, ið er farin, umvegis óbeinleiðis keldutilfar. Tað merkir, at søgugranskarin onga beinleiðis atgongd hevur til sítt granskingarevni, og at ávíst rúm altíð er fyri tulking, soleiðis at vandi er fyri, at ein søgufrøðingur kann koma at leggja part av sær í sína framseting. Hartil kemur, at málið, orðini, hava íbygdar týdningar, sum gera, at orðaval ongantíð er fullkomiliga óheft.

Tað merkir kortini ikki, at óheft søgugransking og søguskriving er ómøgulig, men verður tilfarið og evnið ikki viðgjørt við støði í sakligum og vísindaligum háttaløgum, er vandi fyri, at viðgerðin av bæði tilfari og evni verður tilvildarlig. Tað ber ikki til at siga alt og framvegis byggja á keldurnar, tí tær avmarka møguleikarnar, og granskarin hevur ikki loyvi til at skriva sínar framsetingar í stríð við keldurnar. Gamaní er altíð møguligt at tulka, men verða m.a. omanfyrinevndu fakligu krøv løgd til grund fyri bæði granskingini og framsetingini, so verða møguleikarnir fyri at tulka avmarkaðir rættiliga nógv. Keldukritikkurin áleggur søgugranskaranum at tryggja sær, at tær upplýsingar, sum hann fær burtur úr keldunum, hava staðið allar keldukritiskar royndir, og at samanhangur má vera millum upplýsingarnar, sum fáast burtur úr keldunum, og tað, sum granskarin brúkar tær til at forklára. Konsistenshugtakið leggur nakrar bindingar á søgufrøðingin í mun til, hvussu keldur, hendingar og persónar kunnu viðgerast, t.e. uttan mótstríð, og koherrenshugtakið áleggur einum granskara eitt krav um, at viðgerðin av øllum keldum, hvussu tær verða brúktar í framsetingini og sjálv framsetingin, hongur saman sum

ein heild. Tað ber illa til at prógva, at ein søgulig framseting um eitt samansett søguligt evni grundleggjandi er sonn, men onkuntíð ber til at prógva, at uppáhald eru skeiv (Popper 1996, s. 36), og soleiðis kunnu vit ganga út frá, at tey svar, sum søgufrøðingar fáa burtur úr sínum keldum, við tíðini koma at nærkast einum ´søguligum veruleika` (sí Sølvará 2011). Eitt dømi um hetta er hypotesan um, at Løbner í oktober 1801 kom til Føroya við koppingarevni, og at boðini um eina væleydnaða koppseting í Føroyum vórðu send til danskar myndugleikar 19. november 1801 (Guttesen 2019, s. 164). Her er talan um eina hypotesu, sum tykist vera í stríð við viðkomandi samtíðarkeldur. Harafturat kemur, at fakligu krøvini noyða granskarar at viðgera keldur, evni og persónar við støði í so nógvum sínámillum treytaðum málistokkum, at møguleikarnir fyri at seta fram fleiri ymiskar koherrentar og innanhýsis mótstríðandi framsetingar fækka í tali. Og megna søgufrøðingar ikki sjálvir at liva upp til øll háttalagskrøvini, tá teir seta saman og orða sínar framsetingar, skal onkur annar óivað gera vart við tað. Tað er tað, sum hevur verið roynt at gera í hesi bókini við at lesa eina ávísa bók við háttalagsligum krøvum fyri eyga. Onkuntíð mugu vit kortini velja. Eg kundi havt valt eina aðra søgubók sum grundarlag undir viðgerðini í hesi søgufakligu kjakbók. Eg havi kortini roynt at grundgivið fyri valinum, men grundleggjandi er hetta val mítt. Vónandi fer onkur annar at lesa hesa bókina við somu háttalagskrøvum fyri eyga, tí tað avgerandi er, at háttalagskrøvini eru upp á spæl óheft av søgufrøðingum. Mótstríð í ella millum framsetingar eru avbjóðingar, ið motivera vísindaliga umhvørvið til at granska meira.

Tað er við at meta granskingarúrslit við støði í sakligum háttalagskrøvum, at tað vísindaliga samfelagið flytir granskingina fram á leið. Tað kemur meira enn so fyri, at nýggj søgulig verk skapa nýggjar mytur, men tað er bert við áhaldandi at arbeiða við støði í sakligum háttaløgum, at logos kann vinna økismiss aftur frá mythos.

Tað hevur ikki verið endamálið við hesi bók at verja ella gera upp við nakra mynd av Nólsoyar-Pálli, bert at viðgera nakrar tesur, sum hava verið settar fram um Nólsoyar-Páll í føroysku granskingina um

hann, men kanska kunnu onkrar niðurstøður í bókini brúkast av øðrum, ið ynskja at seta fram nýggja mynd av honum.

Yvirskipað eri eg kortini komin til ta niðurstøðu, at vit framvegis ikki hava fingið nakra søgufakliga uppgerð við verkið hjá Jákupi Jakobsen, tí tá retorikkur og illgitingar verða sáldaðar frá nýggjastu framsetingini um lív og virki hjá Nólsoyar-Pálli, stendur myndin hjá Jákupi Jakobsen av Nólsoyar-Pálli framvegis rættiliga sterk.

# Bókmentir


Anderson, Benedict (1983): *Imagined Communities. Reflections on the Origin and Spread of Nationalism*. Verso, London 1983.

Bonderup, Gerda (2001): *En kovending - koppevaccinationen og dens udfordring til det danske samfund omkring 1800*. Aarhus Uniersitetsforlag, Århus 2001.

Breckmann, Óli (2019): *Føroyar 1766-1966. Latið ei søguna doyggja*. Tryknet, Tórshavn 2019.

Callisen, Heinrich o.a. (1809): *Physisk Medizinske Betragtninger over Kiøbenhavn Stadens Beboere*. Anden Deel. Trykt paa Frederik Brummers Forlag Fos Direkteur J.F. Schultz, Kiøbenhavn 1809.

*Dagen* (danskt blað).

Debes, Hans J. (1991). „Tjóðskaparrørsla sum søguligt fyribrigdi og granskingarevni." Í *Fróðkaparrit 36-37*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.

Degn, Anton (1945): *Færøske kongsbønder 1584-1884*. Varðin, Tórshavn 1945.

Degn, Anton (1937): „Presturin J.H. Schrøter sigur frá loynihandli og øðrum í Suðuroy." Í *Varðin*, 17. bind. Emil Thomsen, Tórshavn 1979.

Diamond, Jared (1997): *Vejen til verden af i dag. Menneskesamfundenes udvikling i de sidste 13.000 år*. Akademisk, København 2002.

Eberhardt, Jakob (2016): *Verdenshistoriens største epidemier*. Fadl´s Forlag, København 2016.

Edwards, Thomas (1815): *Report of Cases in the High Court of Admitalty*. Fanshaw & Clayton, London 1815.

„Erobringen af Thorshavns Skandse og Træk af Livet paa Færøerne 1808 (Af en dalevende Færings Optegnelser)." Í *Dimmalætting*, 26. desember 1885.

Gellner, Ernest (1983): *Nations and Nationalism*. Basil Blackwell, Oxford 1983.

Graba, Carl J. (1830): *Tagebuch gefuhrt auf einer Reise nach Faro im Jahre 1828*. Perthes und Besser, Hamburg 1830.

Graba, Carl J. (1830): *Dagbók á árinum 1828 skrivað á eini ferð til Føroya*. Emil Thomsen, Tórshavn 1987.

Guttesen, Rolf (2018): „Tær fyrstu koppsetingarnar í Føroyum." Í *Frøði* 2. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2018.

Guttesen, Rolf (2019): *Poul P. Nolsöe. Skúmisleiv og tjóðarhetja*. Glyvursnes, Tórshavn 2019.

Guttesen, Rolf (2020): „Gott eyga kann einki ilt sjá?" Í *Dimmalætting* 18. september 2020.

Hettne, Björn, Sörlin, Sverker og Østergård, Uffe (2006): *Den globala nationalismen. Nationalstatens historia och framtid*. Anden udgave. SNS Förlag, Stockholm 1998/2006.

Hobsbawm, Eric. (1992): *Nations and nationalism since 1780. Programme, myth, reality*. Onnur útgáva. Oxford University Press, Cambridge 1990/1992.

Hobsbawm, Erik og Ranger, Terence. (1983): *The Invention of Tradition*. Cambridge University Press, Cambridge 1983.

Hovgaard, Gestur og Sølvará, Hans A. (2019): „Modernitetens gennembrud på Færøerne." Í *Historisk Tidsskrift* 119:1. Den Danske Historiske Forening, København 2019.

Jacobsen, Elin S. (2004): *Slóðir í Heilsuverkssøguni*. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn 2004.

Jakobsen, Jakob (1892): „Poul Nolsø. Et Livs- og Tidsbillede fra Færøerne ved Slutningen af det 18de og Begyndelsen af det 19de Aarhundrede." Í *Historisk Tidsskrift*, Bind 6. række, 3, København 1892.

Jakobsen, Jakob (1912): *Poul Nolsø. Lívssøga og irkingar*. Onnur óbroytta útgáva. H.N. Jacobsens Bókahandil, Tórshavn 1966.

Jespersen, Kári og Nolsøe, Jens P. (2009): *Havnar søga* III. Tórshavnar kommuna, Tórshavn 2009.

Jenner, Edward (1798): *An Inquiry Into the Causes and Effects of the Variolae Vaccinae: A Disease Discovered in Some of the Western Counties of England, Particularly Gloucestershire, and Known by the Name of the Cow Pox*. Simpson Low, London, 1798.

Johannesen, Poul: (1936): „Um Nólsoyar Páll og ætt hansara (uppskrivað hevur Sanna Jacobsen)." Í *Varðin*. Bind 16. Felagið Varðin, Tórshavn 1936. Endurprentað av Bókagarði, Tórshavn 1977.

Kjeldstadli, Knud (2001): *Fortiden er ikke hvad den har været – en indføring i historiefaget*. Roskilde Universitets Forlag, Roskilde 2001.

Kofoed, Anker E. (1961): *Cristiansøs Historie*. Bornholms Historiske Samfund, Rønne 1961.

Kragh, Helge, Skydsgaard, Morten A. og Wang, Tobias (2013): *50 Opdagelser. Højdepunkter i Naturvidenskaben*. Aarhus Universitetsforlag, Århus 2013.

Langkilde, Charlotte (2018): *Færøerne. En moderne nation fødes*. Lindhardt og Ringhof, København 2018.

Lassen, Mathias (2014): *Niels Lassen Holm - ætt og søga*. Sprotin, Vestmanna 2014.

Mackenzie, George S. (1822): „Kort efterretning om Færøene; med Anmærkninger af Pastor H.C. Lyngbye og Dr.phil. Forchhammer." Í *For Historie og Statistik* I. Collin, København 1822.

Marmier, Xavier: *Expedition De La Recherce Au Spitzberg. Les Ferroe.* Revue des Deux Mondes, période initiale, Paris 1839.

Mortensøn, Ole D. (2014): „Skibsfarten til Færøerne under den kongelige færøske handel 1709-1856." *Sjæklen*. Årbog for Fiskeri- og Søfartsmuseet, Saltvandsakvariet i Esbjerg 2013. Esbjerg 2014.

Muhle, Carl A. (1844): *Carl Mogensens Færøeske Krønike*. Einars Prent og Forlag, Tórshavn 1970.

Muhle, Carl A. (1835): *Emancipationen af Færøerne og Grønland*. Bianco luno & Schneider, København 1835.

Nielsen, Carl F. (1876): *Stamtavle over Familien Hammershaimb eller Wenceslaus Francisus de Hammershaimbs Descendenter*. Hans Reitzels Forlag, København 1876.

Nielsen, Carl F. (1879): „Færøernes geistlige Stat eller Geistlighedens Personalhistorie i Færøernes Provsti." Í Wiberg, Sofus V. (1879): *Supplement til personalhistoriske statistiske og genealogiske bidrag til en almindelig dansk Præstehistorie, tilligemed et Anhang, indeholdende en ny Redaction af de Færøiske* Præsterætter. Anden forbedrede Udgave." L.B. Deichmanns Bogtrykkeri, Faaborg 1879.

Nicol, James (1841): *An Historical and Descriptive Account of Iceland, Greenland and the Faeroe Islands*. Simkin, Marshall & Co., Edinburgh 1841.

Nolsøe, Páll J. (1963): *Føroya siglingasøga* I. 2. útgáva. Egið Forlag, Tórshavn 1984.

Nolsøe, Páll J. (1949), „Nøkur skjøl." Í *Varðin*, 26. bind, Felagið Varðin, Tórshavn 1949.

Nørskov-Lauritsen, Niels (2007): „Koppeindpodningen i Danmark i det 18. århundrede." I Høiris, Ole og Ledet, Thomas (ritstj.):

*Oplysningens Verden. Idé, historie, videnskab og kunst*. Aarhus Universitetsforlag, Århus 2007.

Olsen, Óli (2016). *Nólsoyar-Páll. Siglingarmaður og skald*. Forlagið Kjølar, Tórshavn 2016.

Popper, Karl R. (1996): *Kritisk rationalisme. Udvalgte essays om videnskab og samfund*. Arnold Busck, København 1996.

Ræder, Jacob T. (1852): *Danmarks Krigs- og Politiske Historie fra Krigens Udbrud indtil Freden til Jönkjöping 1809*. Tredie del. C.A. Reitzel. København 1852.

Simonsen, Kim (2010): „Færøske erindringssteder og erindringspolitik - mellem trauma og sakralisering. Nationalisme og kristendom i færøsk erindringskultur, set gennem brugen af Færø Saga i nyere mindehøjtideligheder." Í *Den Jyske Historiker,* Nr. 124. Aarhus Universitetsforlag, Århus 2010.

Sølvará, Hans A. (2008).: *Klaksvíkar søga I*. Klaksvíkar kommuna, Sprotin, Vestmanna 2008.

Sølvará, Hans A. (2011): „Tilboðið, Alberti og danska stjórnin – ein søga um eina politiska mytu." Í *Fróðskaparrit* 59. Fróðskapur, Tórshavn 2011.

Sølvará, Hans A. (2020). „Ein klassisk søga í nýggjum hami." Í *Dimmalætting*, 11. september 2020.

*The London Gazette*, 6. februar - 10 februar 1810.

Ulsøe, Lisbeth (1994): „Vaccinationens velsignede bivirkninger – for slægtsforskere." Í *Personalhistorisk tidsskrift*. Samfundet for dansk genealogi og personalhistorie, København 1994:2.

Voss, Rasmus (2012): *Krigen ved verdens ende. Christiansø 1806-1808*. Sohn, København 2012.

Wandel, Carl F. (1915): *Søkrigen i de dansk-norske farvande 1807-14. Fra tabet af flaaden til freden i Kiel*. Jacob Lund, København 1915.

Wendt, Joh., C.W. (1836): *Bidrag til Børnekoppernes og Vaccinationens historie i Danmark, og om de sidste herskende Koppe-Epidemier*. Jens Hofstrup Schultz, København 1836.

West, John F. (1969): „Brillumanninum til verju." Í *Fróðskaparrit* 17. bók. Fróðskaparfelagið, Tórshavn 1969.

Østergård Uffe (1992): *The Construction of a Faroese Identity: Nordic, Norwegian, Danish - or Faroese?* Óprentaður fyrilestur á 39. Deutschen Historikertag, Hannover 1992.

Østergård, Uffe (2007): „Stat, Nation og National Identitet." Í Andersen, H. og Kaspersen, L.B. (ritstj.): *Klassisk og Moderne Samfundsteori*. Fjerde udgave. Hans Reitzels Forlag, København 1996/2007.

Óprentað tilfar:

Rentekammeret: Sager til journal for Færøerne og Grønland (1771 – 1848). Ríkisskjalasavnið.

Den Kgl. Vaccinationskommission Forhandlings- og korrespondanceprotokol 1801-1805. Ríkisskjalasavnið.

Kirkjubøkurnar. Tjóðskjalasavnið.

Skansaprotokollirnar. Tjóðskjalasavnið.

Færøes Revolution. Føroya Landsbókasavn.

Claus Lund – dagbók. Føroya Landsbókasavn.